# Miðnámsrit

## Greinasavn

2014

- Undirvísingartilfar
- Úr miðnámssøguni
- Námsfrøði og eftirmeting
- Úr søguni um búskaparliga hugsan

# Miðnámsrit 2014

# Innihaldsyvirlit

Formæli . . . . . . . . . . s. 5

*Fyrsti partur: Námsfrøði og eftirmeting*

Olav Absalonsen *Ársmet og opinleiki* . . . . . . . . . . s. 6

Olav Absalonsen *Meting í undirvísing og læring* . . . . . . . . . . s. 17

Martha W. Dalsgaard *Orðblindni* . . . . . . . . . . s. 22

Niels Ebrup (týðing Sólfinn Hansen)
*Floksstøddin ávirkar próvtølini* . . . . . . . . . . s. 25

Robert H. Frank (týðing Olav Absalonsen)
*Hví ger undirvísing í búskapi so lítlan mun?* . . . . . . . . . . s. 28

Tórður Johannesarson
*Námsfrøðiligt tiltak á Føroya Handilsskúla* . . . . . . . . . . s. 31

Alex Ocampo (Erla Bech Nolsø týddi)
*Etiskar reglur fyri lærarar?* . . . . . . . . . . s. 33

Olav Absalonsen *Próvtalsstigar* . . . . . . . . . . s. 35

Búgvi Poulsen *Námsfrøðiliga útbúgvingin* . . . . . . . . . . s. 43

Tórður Johannesarson
*Námsfrøðiliga útbúgvingin – ein føroysk avbjóðing* . . . . . . . . . . s. 45

*Annar partur: Undirvísingartilfar*

Pól Jespersen *Um at skriva undirvísingartilfar* . . . . . . . . . . s. 48

Viðtal við Dorit Hansen – ritstjóra á Námi . . . . . . . . . . s. 52
Olav Absalonsen Eru føroyskar skúlabøkur dýrar at gera? . . . . . . . . . . s. 54
Tórður Johannesarson *Næstan 80% av lærutilfarinum í føroysku miðnámsskúlunum er danskt* . . . . . . . . . . s. 58
Tórður Johannesarson *Støddfrøði á føroyskum* . . . . . . . . . . s. 61

*Triði partur: Brot úr miðnámsskúlasøguni*

Jákup í Gerðinum *Søgubrot um YF* . . . . . . . . . . s. 65
Eyðgunn Samuelsen *Føroya Tekniska Lærarafelag* . . . . . . . . . . s. 90
Tórður Johannesarson *Brot úr søguni um Lærarafelag Handilsskúlans* . . . . . . . . . . s. 95
Jákup Andreasen *Fiskivinnuskúlin 25 ár á baki* . . . . . . . . . . s.102
Heðin Samuelsen *Handilsskúlin – móttøka 5.mars 2014* . . . . . . . . . . s.107
Rúni Heinesen *Søgan um Tekniska skúla í Klaksvík* . . . . . . . . . . s.111

*Fjórði partur: Úr søguni um búskaparliga hugsan*

Olav Absalonsen *Cournot – og lógin um eftirspurning* . . . . . . . . . . s.114
Olav Absalonsen *Jules Dupuit og cost-benefit greiningar av almennum verkætlanum* . . . . . . . . . . s.119
Tórður Johannesarson *Joseph Alois Schumpeter – um íverksetaran* . . . . . . . . . . s.123

**Miðnámsrit 2014**

Blaðstjórn: Olav Absalonsen og Tórður Johannesarson

Umbróting, prent og innbinding: Føroyaprent

Útgevari: Forlagið Glint

ISBN: 978-99918-800-4-4

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerkt prentsmiðja 541 705

# Formæli

Tann 1. mars kom fyrsta Miðnámsrit út, sum er eitt netblað, ið liggur á heimasíðuni hjá Føroya Handilsskúla. Higartil eru trý rit komin út. Tað fjórða kemur út í desember í ár. Undirtøkan fyri netblaðnum hevur verið so góð, at vit hava gjørt av at geva greinirnar í teimum fyrstu ritunum út í bók.

Sum vit skrivaðu í fyrsta blaðnum, so er nógv spennandi og viðkomandi, ið rørist á miðnámsskúlaøkinum, og sum eisini hevur almennan áhuga, og tí er neyðugt at hava ein pall, har lærarar, leiðarar, embætisfólk, politikarar og onnur, ið vara av miðnámi, kunnu skriva í.

Í bókini eru 24 greinir. Av teimum hava 20 staðið í netútgavunum fyrr. Fýra nýggjar greinir eru við í bókini. Jákup Andreasen hevur skrivað um Fiskivinnuskúlan, Tórður hevur skrivað um kenda eysturríkska búskaparfrøðingin Schumpeter. Hinar báðar hevur Olav skrivað. Onnur er um opinleika um ársmet, og hin er um próvtalsstigar. Henda seinna varð prentað í Sosialinum í 2010; men er broytt og tillagað.

Vit takka øllum, sum hava skrivað greinir í bløðini – uttan tykkara íkast komu ongi Miðnámsrit út – stóra takk veita vit tykkum. Stjóranum á Føroya Handilsskúla, Helenu Dam á Neystabø, takka vit fyri, at blaðið hevur fingið innivist á heimasíðu handilsskúlans. Gunnvá Gray hjálpti okkum at seta fyrstu bløðini upp, og triðja blaðið settu Anni og Janni upp, teimum veita vit eina tøkk. Vit takka hesum fyri málsliga vegleiðing: Aref T. Olsen, Erling Isholm, Høgni Høgnesen, Óli Jákup Niclasen, Óli Petersen og Sólfinn Hansen.

November 2014
Olav og Tórður

# Ársmet og opinleiki

Olav Absalonsen

**Næmingarnir á Føroya Handilsskúla verða kunnaðir við skúlaársbyrjan um, hvussu ársmet verða givin, og lærararnir ynskja seg ikki aftur í tíðina við ógreiðum reglum. Fyri 9 árum síðani fór skúlin undir eina tilgongd at fáa greiðar reglur um ársmet og opinleika um hesar reglur. Henda grein sigur eisini frá, hvussu tungt og langdrigið tað kann vera at taka dystin upp við gamla siðvenju og vanahugsan, hóast alt talar fyri at hugsa nýtt.**

Tá ið FHS byrjaði í 1983, var hetta ein útbúgving við einari skipan, har ársmet skuldu gevast. Hetta var nýtt á handilsskúlanum. Á HH vóru bara próvtøkumet í próvnum, og ársmet skuldu ikki gevast. Seinni í 80'unum bleiv hetta broytt, soleiðis at ársmet skuldu eisini gevast á HH. At geva ársmet er ein uppgáva og avbjóðing, sum lærarar taka í stórum álvara, men tá ið henda uppgáva varð løgd á okkum, var ikki nógv hjálp at heinta frá myndugleikum. Hvør royndi í sínum lagi at loysa uppgávuna, og eisini royndu summi at ráðføra seg við starvsfelagar um hetta, og nakað av óformligum kjaki var eisini.

Í 2005 var greitt fyri fleiri av okkum, at hesi ógreiðu og óskipaðu viðurskifti um ársmet kundu ikki halda fram. Tað vóru í høvuðsheitum tríggjar orsøkir til, at vit mettu, at okkurt mátti gerast við hetta:

1. Tíðirnar broytast, og næmingarnir í 2005 vóru øðrvísi, enn næmingar vóru 20 ár frammanundan. Nú byrjaðu fleiri og fleiri at kæra, um tey vóru misnøgd við eitt ársmet. Í slíkum førum skal viðkomandi lærari gera eina frágreiðing um kæruna. Her vísti tað seg, at lærarin ikki altíð hevði so lætt við at grundgeva fyri ársmetinum.
2. Fyrrverandi næmingar nevndu, at skúlin átti at bøtt um tað, at næmingar frá byrjanini av skúlaárinum ikki fingu greitt at vita, hvussu ársmet verða givin.

3. Um hetta mundið vóru fleiri handilsskúlalærarar knýttir at RGU (Robert Gordon University) í Aberdeen í einari starvsfólkamenning, sum varð fíggjað av BP (British Petroleum) við serligum denti á námsfrøði – herundir meting í undirvísing og læring. Í hesi menningarætlan varð stórur dentur lagdur á, at útbúgvingin skuldi vera viðkomandi fyri okkara dagliga arbeiði og vera við til at loysa vandamál, ið har vóru. Eitt av hesum var spurningurin um ársmet.

## Ein granskingarætlan

Verkætlanin varð sett í verk sum ein sokallað aktiónsgransking, ið er væl egnað, tá ið broytingar skulu gerast, og tað ikki er heilt greitt frá byrjan, hvørjum hon skal enda við. Ein slík verkætlan hevur fleiri umfør – í hesum føri fleiri ár, áðrenn komið er á mál. Hon varð gjørd eftir hesum leisti:

1. Vit staðfesta, at vit hava eitt vandamál
2. Vit lýsa tað væl og virðiliga
3. Vit kanna eftir, hvat finst av gransking á økinum
4. Vit heinta upplýsingar í húsinum
5. Vit gera av, hvat vit skulu gera
6. Vit seta avgerðina í verk
7. Vit eftirmeta, hvussu tað gekk í fyrstu atløgu

Út frá eftirmetingini tað fyrsta árið gera vit av, hvat skal gerast øðrvísi árið eftir. Og so heldur verkætlanin fram so leingi, sum vit halda tað vera neyðugt.

## Staðfesting og lýsing av málinum

Vit hava tvey sløg av summativari meting í skúlanum: annað er ársmet við endan á skúlaárinum og onnur støðumet í árinum, og hitt er próvtøka við endan á skúlaárinum. Í próvnum telja ársmetini um 70% av endaliga úrslitinum, og próvtøkur telja um 30%. Myndugleikarnir hava gjørt útgreinaðar reglur fyri próvtøkurnar í próvtøkukunngerð, men ongar serligar reglur um ársmetini, sum telja meiri í úrslitinum enn próvtøkurnar. Tí má tað vera upp til skúlan at gera slíkar reglur.

Vit uppliva ofta, at verandi næmingar eru ónøgdir við metini, og tað kemur fram á ymiskan hátt. Onkuntíð tosa teir við læraran um tað, og so endar málið kanska har. Men onkuntíð kæra næmingar til leiðsluna, tí teir eru ónøgdir við sjálvt ársmetið, ella tí teir sakna eina grundgeving fyri ársmetinum. Vit hava orsøk til at halda, at kærurnar eru bara toppurin av ísfjallinum, tí í Føroyum skal nógv til, áðrenn fólk kæra, tá ið tey eru ónøgd við okkurt. Men her er ein broyting á veg, og næmingar í dag krevja meiri, enn næmingar gjørdu fyrr, og atferðin hjá teimum er sum hjá kundum og brúkarum. Tí kann skúlin ikki longur seta kikaran fyri blinda eygað.

Samrøður við fyrrverandi næmingar vísa greitt, at málið er álvarsligt: teir vilja vera við, at teir lærdu ov lítið í handilsskúlanum, tí at karaktergevingin var ógreið, sum hevði strategiska læring við sær ella var demotiverandi. Eftir at teir eru vorðnir meira búnir og kunnu tosa meira objektivt um evnið, mugu hesi sjónarmið takast í álvara. Atfinningarnar frá hesum næmingum eru: vantandi opinleiki um karaktergeving; ov nógv summativ meting tíðliga í skúlaárinum, formativa metingin eydnast ikki væl; og læringin fer av lagi.

## Hvat siga granskarar?

Yorke (1998) hevur skrivað um metingarleiðslu. Hansara tilmæli um til dømis starvsfólkamenning eru viðkomandi hjá okkum í strembanini eftir at menna metingarpraksis. Leiðslan má hava ein virknan leiklut at broyta verandi vanar og menna dygdina, tí tað er eitt samband ímillum metingarleiðslu og metingarhættirnar sjálvar.

Stefani (1998) mælir til at meta saman við teimum lærandi, soleiðis at tey menna seg at skilja, hvat krevst í læringini. Hon førir fram, at tey lærandi mugu gerast før fyri at skilja metingartreytirnar og skilja, hvat krevst á ymiskum stigum, um tey skulu gerast effektiv lærandi.

Ecclestone & Swann (1999) greiða frá gransking, sum vísir eina togan ímillum veruligan vilja at bøta um praksis og hugin at verja verandi praksis orsakað av avbjóðingum frá næmingum. Eitt motiv fyri at bøta um metingarpraksis er vandin fyri karakterglíðing: um tú vilt sleppa frá keðiligum ábreiðslum frá ónøgdum næmingum, so er at geva teimum hægri karakterir, enn teir hava uppiborið.

Taras (2001) førir fram, at um vit útihýsa næmingar frá metingum, so

taka vit ábyrgdina frá teimum. Tí mugu næmingar læra eginmeting. Hetta samsvarar við Stefani, men Taras ger aðrar og meira útgreinaðar reglur um, hvussu hetta skal gerast. Hon mælir til at taka næmingar við í karaktergeving, at rætta uppgávur og geva afturmelding og at bíða við karakterum til eftir, at næmingar hava mett egin avrik.

Knight (2002) mælir til at skilja ímillum metingarskipanir, ið hava feed-out sum endamál, og tær, ið hava feedback sum endamál. Hann førir fram, at próvtøkur og aðrar summativar metingarskipanir eru farnar so nógv av kós, at tað er trupult at vita, hvat ein karakterur sigur, og tað er vandamikið at líta á hann. Tað kunnu vera feilir í sjálvum teknikkinum, men eisini tað, at endamálini við metingum eru farin av lagi.

Smyth (2004) leggur dent á, hvussu umráðandi tað er at læra næmingar at skilja munin á summativari og formativari meting, og at læra hetta skuldi verið raðfest tíðliga í undirvísingargongdini. Hon grundgevur fyri at byggja fatanina hjá næmingum upp, hvussu og hví vit meta, og fyri at tvinna formativar metingarhættir saman við førleikamálunum í fakinum at fyrireika næmingarnar til summativa meting. Eginmeting er eitt lyklaorð eins og hjá Taras.

Tað er eingin andsøgn millum Knight, sum mælir til at skilja ímillum formativar og summativar hættir, og Smyth, sum mælir til at tvinna teir saman, tí at skilja ímillum snýr seg um at skilja, at endamálini eru ymisk, og at tvinna teir saman snýr seg um at fáa hættirnar at virka saman. Tí ræður um at skilja tey bæði endamálini fyri at fáa tey at virka saman og stuðla hvørjum øðrum.

Tá ið vit lesa tað, sum granskarar føra fram, verður málið lýst enn betur, enn tað var frammanundan. Fleiri tekin eru um, at stórur tørvur er á at styrkja vitanina hjá næmingunum um metingar (Smyth), at læra teir eginmeting (Taras), at bjóða teimum við í metingarumhvørvið (Ecclestone & Swann), og kanska eisini at meta saman við teimum (Stefani). Hetta er ein útgreining av, at opinleikin er lítil.

Vit skilja ikki nóg væl ímillum tær báðar metingarskipanirnar (Knight); og vit eru ikki tilvitað um endamálini við metingum (Yorke). Harumframt mugu vit broyta hugsan um summativa meting (Knight), og gera okkum greitt, hvørjum

endamáli hon skal tæna (Yorke). Hetta er ein útgreining av, at orðaskifti um evnið manglar.

Vit undirmeta metingar og eru ikki før fyri at síggja meting sum eina heildarskipan (Yorke) og sum eitt fjøltáttað samskifti (Knight), ið virka saman sum lutir í einari størri skipan. Til at bøta um hetta er tørvur á effektivari leiðslu (Yorke), og eisini er tørvur á starvsfólkamenning á økinum (Ecclestone & Swann). Hetta er ein útgreining av, at eingin hevur ábyrgdina, og at leiðsla skal til.

## Innsavnan av innanhýsis informatión

Ikki fyrr enn nýliga hava vit havt nakað formligt orðaskifti um metingar. Sjálvandi hava vit altíð havt óformligt prát millum starvsfelagar, sum vilja hjálpa hvørjum øðrum, sum sjálvandi er gott, men tað er ikki nóg mikið. Hóast alt hetta so er verandi praksis ein gomul og sterk siðvenja, og tað krevur orku og vilja at broyta hana. Ringir vanar hava havt góðar umstøður at festa røtur og vaksa. Metingarumhvørvið er veikt: manglandi námsfrøðilig leiðsla, manglandi orðaskifti um metingar, lítil ábyrgd og lítil opinleiki.

Tíðliga á ári í 2005 varð farið í holt við at kanna metingarnar, sum greitt er frá omanfyri. Tað varð gjørt við at spyrja lærarar, hvørji kriteriir teir brúktu sum grundarlag fyri ársmetinum, og hvussu teir gjørdu av, hvat ársmetið skuldi vera. Eg spurdi bara lærarar í føstum starvi, tí at tímalærarar eru bara settir í eitt ár hvørja ferð og tískil neyvan so áhugaðir í at menna hetta økið, sum fastir lærarar vóru. Harumframt vóru teir flestu av teimum 12 tímalærarunum ikki útbúnir í námsfrøði, hóast teir høvdu góðan fakligan førleika. Tilsamans 15 lærarar vóru spurdir, og av teimum svaraðu 12.

Spurningarnir vóru bara tveir í tali, og tað var við vilja: um eg hevði byrjað við einum spurnarblaði við nógvum spurningum, hevði tað uttan iva verið fatað sum eftirlit, og tíðin var ikki búgvin til slíkt eftir so nógv ár í tøgn. Ístaðin varð hugskotið nevnt á einum fundi, har lagt varð upp til, at tilfarið skuldi brúkast í einari menning av felags reglum um ársmet. Á henda hátt vóru lærararnir tiknir við frá byrjan í verkætlanini, sum er avgerandi fyri, at hon skal eydnast.

Sum nevnt, vóru spurningarnir: (1) hvørji kriteriir brúkar tú sum grundarlag fyri ársmetinum? Og (2) hvussu ásetir tú ársmetið? Ein av lærarunum kom við nøkrum áhugaverdum viðmerkingum, sum kundu verið góðar sum uppleggi til

kjak um evnið. Hann var eitt sindur í iva um orðið kriteriir, og hevði heldur viljað tosað um indikatorar ella parametrar. So nevnir hann, at vit skulu meta um dugnaskap, men vit meta um avrik, sum er ábending um dugnaskap. Ein annar var inni á tí sama, men hevði eina meira praktiska tilgongd til spurningin: hann sigur næmingunum við skúlaársbyrjan, at ársmet verður ásett eftir avrikum – og ikki eftir dugnaskapi, har hann tó hevur í huga, at avrik eru ábendingar um dugnaskap. Hesi bæði svarini vóru tey mest ullintu av teimum 12, og teir báðir svaraðu ikki rættiliga tí seinna spurninginum.

Hini 10 svarini kunnu verða býtt í tvey: 6 av svørunum vóru sera greið og greiddu frá ymiskum metingarháttum, og hvussu teir vóru vektaðir, tá ið ársmetið varð roknað; hini 4 nevndu ymiskar hættir, men vóru ógreið, tá ið tað kom til at áseta ársmet. Samanumtikið kunnu svarini verða býtt sundur, sum víst í talvu 1.

Talva 1. Sundurbýting av svarunum

| Fyrri spurningur leysliga svaraður. Seinni spurningur ikki svaraður | Metingarhættir nevndir. Ásetan av ársmeti kvalitativt ella leysligt | Metingarkriteriir upplýst. Ásetan av ársmeti kvantitativt við modifikatiónum | Svar tilsamans |
|---|---|---|---|
| 2 | 4 | 6 | 12 |

Tey 4 við kvalitativum ella ógreiðum ársmeti hava onkrar eyka upplýsingar, men tey 6 svara bara spurningunum og hava ongar eyka viðmerkingar. Sjálvt um formativ meting ikki er nevnd í spurningunum, so nevnir ein av teimum 4, at hann leggur dent á seinnu helvt av skúlaárinum, tá ið hann gevur ársmet; tað fyrsta arbeiðið hjá næmingunum, sum telur í ársmetinum, er við endan á fyrra hálvári.

Hinir tríggir av teimum 4 siga, at teir tosa við hvønn einstakan næming um ársmetið og eisini um støðumetið, sum verður givið mitt í skúlaárinum. Hugsanin er at verja metið ella at greiða næminginum frá, hvussu tað er ásett, og geva honum møguleika at siga sína meining. Hetta er ikki ein samráðing,

men ein av hesum lærarum bjóðar næmingunum ein møguleika at prógva tað, um hann heldur, at hann hevur hægri met uppiborið enn tað, sum lærarin hevur ásett. Allir tríggir siga, at næmingarnir eru sera samdir við læraran. Tað er soleiðis, lærararnir uppfata samrøðuna, men spurningurin er, um hetta er ein objektivur sannleiki. Tá ið lærarar vilja vera við, at næmingarnir eru nøgdir, kann motivið hjá teimum vera at verja tað, sum teir gera:

- Fyri tað fyrsta kann hugsast, at um næmingur heldur, at metið er ov høgt, so fer næmingurin ikki at siga tað við læraran, og lærarin uppfatar hetta sum, at teir eru samdir. Sostatt kann ov nógv semja vera tekin um karakterglíðing.
- Fyri tað annað situr lærarin við maktini, og hesin ójavni millum lærara og næming ger, at nógvir næmingar lata vera við at siga nakað, sjálvt um teir eru ósamdir.
- Fyri tað triðja so kann manglandi opinleiki um ársmet gera, at nógvir næmingar eru ikki førir fyri at kjakast við læraran um metingina.

Samanumtikið hevur innanhýsis kanningin styrkt fatanina, vit høvdu framman-undan um lítlan opinleika, veikt metingarumhvørvi og lítið orðaskifti um evnið, og fatanin um manglandi námsfrøðiliga leiðslu og lítla ábyrgd er ikki viknað.

## Støðutakan

Innsavningin av innanhýsis upplýsingum varð gjørd í fyrru helvt av 2005. Í november 2005 høvdu vit ein lærarafund, har einans meting var á skránni. Eg hevði eina framløgu á hesum fundi, sum hevði íblástur frá starvsfólkamenningini, sum skúlin hevði í samstarvi við RGU. Roynt var at hava fundin rímiliga óformligan fyri at fáa kjak í lag. Fundurin var mennandi, og fleiri av lærarunum vístu seg at vera sinnaðir at broyta metingarpraksis á skúlanum. At enda hevði eg nøkur ítøkilig uppskot um hetta.

Í februar 2006 var ein ætlan klár, har lærugreinirnar vóru býttar sundur í 8 bólkar, tí at metingarhættir eru lættari at tosa um, um lærugreinirnar hava okkurt til felags. Til dømis var støddfrøði fyri seg í einum bólki, fremmand mál í einum øðrum og so víðari. Vit høvdu ein innleiðandi fund við eitt umboð úr hvørjum bólki. Bólkarnir vóru bidnir um at tosa um metingar sum heild, men

serliga um ársmet, og gera reglur um metingarhættir, vekting og áseting av ársmeti, soleiðis at reglurnar vóru lættar at brúka og lættar hjá næmingunum at skilja í byrjanini av skúlaárinum.

Vit vóru tá 29 lærarar á miðnámi í handilsskúlanum í Havn. Av hesum vóru 17 í føstum starvi, og av hinum 12 høvdu 6 meira enn hálvt starv. Tí væntaðu vit, at 23 av 29 lærarum skuldu vera við í hesum arbeiði. Flestu av lærarunum vóru limir í tveimum ella fleiri bólkum. Fundirnir í bólkunum vóru lívligir, og eg fekk skrivligar frágreiðingar frá øllum. Hesar frágreiðingar vístu, at neyðugt var at geva bólkunum nakrar leiðbeinandi afturmeldingar. Vit stovnaðu eisini ein prosjektbólk, sum fór til verka í apríl 2006 við tí fyri eyga, at seta tær nýggju reglurnar í verk skúlaárið 2006-2007.

## Íverksetan og eftirmeting

Skúlaárið 2006-2007 komu nakrir lærarar skjótari avstað enn aðrir. Hetta gjørdi, at teir, sum vóru seinir í gongd, vórðu drignir við, tí tá ið næmingar síggja, at lærarar ikki hava sama praksis á hesum øki, so seta teir spurningar, sum leggja trýst á teir meira siðbundnu lærararnar, og allur skúlin flytur seg ímóti størri opinleika og betri dygd í áseting av ársmetum.

Tað fyrsta árið varð høvuðsdentur lagdur á at skapa opinleika um ársmet. Ein reglugerð fyri allan skúlan varð skrivað, og einstøku bólkarnir skrivaðu reglur um ársmet í viðkomandi bólki. Eftirmetingar eftir fyrsta árið førdu til nakrar ábøtur skúlaárið 2007-2008. Eisini varð reglugerðin víðkað til at rúma meting fyri at læra, men hetta varð í fyrstu atløgu bert sett í verk í 3-ára royndarflokkunum, sum byrjaðu í 2007.

Hesi árini mentist tilvitanin um ársmet og meting sum heild. Orðaskiftið um hesi evni bleiv størri – bæði óformliga og formliga. Hetta hevði eisini við sær, at sjónarmið hjá lærarum møttust og mentust. Reglurnar, sum lærarar gjørdu um ársmet, blivu eisini meira felags av hesi grund. Av góðum grundum er munur millum reglurnar í ymiskum lærugreinum, men vit halda fast um, at somu reglur mugu vera fyri somu lærugrein á sama stigi. Nógvir ymiskir metingarhættir verða brúktir í sambandi við ársmet, og tað skuldi gjørt, at ársmet eru meira eftirfarandi enn próvtøkumet, sum bara byggja á ein metingarhátt.

Í sambandi við hvat kann telja við í ársmetinum, varð spurningurin um uppmøting og kravdar innlatingar umrøddur. Fyrisitingarliga kunnu vit føra fram, at her er talan um kravt virksemi hjá næminginum, sum er treyt fyri at fáa ársmet, og tí kann hetta virksemi ikki telja við í ársmetinum. Tó vilja nakrir lærarar hava hetta virksemi at telja í ársmetinum, tí teir meta, at hetta kann motivera næmingin til at møta upp og lata inn, meðan aðrir lærarar hella til tað sjónarmiðið, at næmingurin skal vera virkin fyri at kunna fáa ársmet: tann, sum ikki møtir upp ella ikki letur inn, fær rætt og slætt ikki ársmet. Her koma vit inn á hugtøkini óbeinleiðis og beinleiðis motivatión: teir fyrr nevndu lærararnir nýta óbeinleiðis motivatión fyri at fáa næmingarnar at møta upp og lata inn. Orðaskiftið um hetta ber brá av, at vit blanda ymisk endamál við metingum saman: endamálið við kravdum innlatingum er fyrst og fremst at læra og ikki at verða dømdur.

Ársmet er formliga eitt støðumet við árslok. Tí eiga avrik tíðliga í skúlaárinum ikki at telja við í ársmetinum. Tað, sum eisini talar fyri hesum sjónarmiði, er, at næmingar skulu fáa frið at læra og ikki verða dømdir frá byrjan av. Øll, sum hava undirvíst í nøkur ár, vita, at næmingar, sum í byrjanini kunnu tykjast seinir, kunnu roynast sera væl í longdini, tí talan kann vera um fólk, ið hava trongd til djúpar reflektiónir, og sum ikki góðtaka einfaldar og grunnar frágreiðingar.

Verkætlanin varð eftirmett hvørt skúlaár, og ábøtur vórðu gjørdar. Á heysti 2010 minkaðu vit talið á bólkum og høvdu fundir við hvønn einstakan bólk, og í 2011 varð verkætlanin komin so væl áleiðis, at vit kundu siga, at vit vóru komin á mál við henni. Í dag er opinleiki um ársmet ein integreraður partur av skúlaársbyrjanini, ið øll taka sum eina sjálvfylgju – eisini nýggir lærarar. Skipanin er ikki fullfíggjað, og broytingar verða støðugt gjørdar. Á næstu síðu eru tvey dømi um, hvussu ársmet verða givin.

Talva 2. Dømi 1 um ársmet

| Metingarháttur | Vekt |
|---|---|
| Ársmet og ársroynd fyrra árið | 10% |
| Terminsroynd | 25% |
| Tímaroyndir | 20% |
| Verkætlan | 10% |
| Innlatingar | 20% |
| Framløgur og lestrarvirkni | 15% |
| Tilsamans | 100% |

Talva 3. Dømi 2 um ársmet

| Metingarháttur | Vekt |
|---|---|
| Ársmet fyrra árið | 10% |
| Ársroynd fyrra árið | 10% |
| Terminsroynd | 25% |
| Tímaroyndir | 30% |
| Verkætlan | 15% |
| Innlatingar og annað virksemi | 10% |
| Tilsamans | 100% |

Í báðum dømunum er talan um lærugreinir, sum taka tvey ár, og vit síggja, at tað fyrra árið í báðum førum telur sera lítið í endaliga ársmetinum. Sum heild líkjast reglurnar í hesum báðum lærugreinum, men vektingarnar eru ikki heilt eins. Í tí fyrra døminum telja innlatingar og lestrarvirkni munandi meira enn í tí seinna, har royndir og verkætlan telja meira. Veikleikar kunnu síggjast í báðum dømunum. Hvussu innlatingar, ið eru ætlaðar sum venjingar og ikki sum avrik, skulu telja, er ein tulkingarspurningur; og hvussu lestrarvirkni og annað virksemi skal tulkast, kann eisini vera ivasamt.

At fáa hesar reglur í lag, hevur verið drúgt, men tað hevur verið stríðið vert. Næmingarnir eru nú kunnaðir um ársmet við skúlaársbyrjan, og lærararnir ynskja seg ikki aftur í tíðina við ógreiðum reglum. Kærur koma so at siga ikki fyri longur, og um tær koma, eru tær nú sera lættar at handfara.

Skipanin hevur eisini vakt ans uttan fyri skúlan. Ein flokkur á læraraskúlanum, sum eg var gestalærari hjá, var sera hugtikin av verkætlanini, og tey spurdu nógv, tí tey høvdu ringar royndir av ársmetum, tá ið tey sjálv høvdu gingið á miðnámi, og fortaldu onkrar søgur um, hvussu ódámliga tað kann ganga fyri seg viðhvørt, tá ið ársmet verða givin. Fyri tey var tað gleðiligt, at Føroya Handilsskúli hevði gjørt nakað við at skapa opinleika um ársmet, men tey vóru vónbrotin av, at hetta var so lítið útbreitt.

## Keldur

ECCLESTONE, KATHRYN & SWANN, JOANNA, 1999. Litigation and Learning: tensions in improving university lecturers' assessment practice. Assessment in Education, Vol. 6, No. 3, pp. 377-389.

KNIGHT, PETER, 2002. Summative Assessment in Higher Education: practices in disarray, Studies in Higher Education, Vol. 27, No. 3, pp. 275-286.

SMYTH, KAREN, 2004. The benefits of student learning about critical evaluation rather than being summatively judged, Assessment and Evaluation in Higher Education, Vol. 29, No. 3, pp. 369-378.

STEFANI, LORRAINE, 1998. Assessment in Partnership with Learners, Assessment and Evaluation in Higher Education, Vol. 23, No. 4, pp. 339-350.

TARAS, MADDALENA, 2001. The use of tutor feedback and student self-assessment in summative assessment tasks: towards transperency for student and for tutors, Assessment and Evaluation in Higher Education, Vol. 26, No. 6, pp. 605-614.

YORKE, MANTZ, 1998. The management of assessment in higher education, Assessment and Evaluation in Higher Education, Vol. 23, No. 2, pp. 101-116.

# Meting í undirvísing og læring

Olav Absalonsen

**At meta um lærdómin er drívmegin í læringini. Tað er umráðandi at fáa næmingin við í hesa meting, soleiðis at hann lærir egin-meting og næmingameting. Um hetta og annað samstarv millum lærara og næming skal eydnast, er neyðugt, at báðir partar arbeiða fram ímóti felags málum. Tí eigur lærarin longu í byrjanini í eini undirvísingargongd at gera avtalu við næmingarnar um, hvørji málini eru. Felags mál eru treyt fyri, at lærarin kann virka sum leiðari í flokkinum. Námsfrøðiliga leiðsla skúlans kemur eisini inn í myndina fyri at samskipa felags undirvísingarmál í samsvari við endamál skúlans.**

Vit eiga at skilja ímillum formativa (mennandi) meting (at betra) og summativa (dømandi) meting (at gera av). Hugtøkini diagnostisk meting og varandi meting eru eisini strategiir fyri at læra. Spurningurin er eisini, hvør skal meta og nær. Tí hava vit hugtøkini:

- egin-meting, har næmingurin lærir at meta um seg sjálvan,
- næmingameting, har næmingar meta aðrar næmingar,
- kontinuerliga meting, sum fer fram alt árið, og
- endaliga meting ella eftirmeting, sum kann vera ein próvtøka.

## Summativ meting

Týdningurin av summativari meting er at taka samanum, gera av ella døma um, hvat næmingurin hevur lært, ofta sum eitt tal ella bókstavur og onkuntíð sum staðið ella ikki staðið. Hetta verður gjørt til uttanhýsis nýtslu (váttan ella prógv), og eigur tí at verða gjørt sum ein vísindalig kanning. Fyri at vera ein vísindalig kanning skal metingin lúka nøkur krøv:

- hon skal vera viðkomandi
- hon skal vera álítandi
- hon skal vera praktisk
- hon skal vera rímilig

At hon skal vera viðkomandi ber í sær, at hon skal kanna tað, sum hon er ætlað at testa, og at hon í odd og egg skal máta førleikamálini, sum eru lýst í námsætlan. Í veruleikanum kemur ofta fyri, at metingar eru óviðkomandi. At metingin er álítandi merkir, at hon er konsistent, soleiðis at skilja, at spurningurin ella próvtøkan verður dømd eins hvørja ferð. Álítandi døming er torfør at lúka í verki. Av tí at orðini viðkomandi og álítandi eru eitt sindur gerandislig, skulu vit lýsa við einum dømi, hvat tey merkja í hesum sambandi: Um vit hava eina linjál, har hvør sentimetur er 9 millimetrar, mugu vit staðfesta, at linjálin er ikki viðkomandi (hon er ikki valid), tí hon vísir skeivt; hinvegin er hon álítandi (reliable), tí hon gevur sama úrslit hvørja ferð.

At ein meting skal vera praktisk merkir, at hon skal ikki vera dýr, ikki tíðarkrevjandi, og hon skal vera løtt at brúka; neyðloysnir á hesum øki kunnu tó gera, at metingin verður minni viðkomandi.

At metingin skal vera rímilig merkir, at hon endurspeglar tað, sum er lýst í førleikamálunum, og at næmingarnir vita til fulnar, hvussu avrikini verða dømd. Teir eiga í góðari tíð at vera vitandi um metingartreytirnar fyri at skilja metingina. Í hesum sambandi er vert at nevna, at í næsta blað verður grein um, hvussu Føroya Handilsskúli í mong ár hevur arbeitt við at fáa størri opinleika um, hvussu ársmet verða givin.

Eftirmeting er her mest at skilja sum summativ meting (at døma ella gera av). Tó kann ein farri av formativari og diagnostiskari meting vera við í ávegis meting, sum til dømis kann vera ein terminsroynd.

Ávegis eftirmeting kann vera ein próvtøkulíknandi roynd, har roynt verður at døma um, hvat næmingurin hevur fingið burturúr higartil. Hetta endamál er summativt. Ein slík roynd kann eisini hava eitt diagnostiskt endamál, soleiðis at skilja, at lærarin kann brúka hesa roynd til at taka avgerðir um undirvísingina. Endamálið kann eisini vera formativt, har næmingurin fær afturmeldingar, sum føra til, at hann lærir av hesum.

## Formativ meting

Týdningurin av formativari meting er at bøta um læring og skapa nýggjan lærdóm. Formativ meting hevur ikki eina greiða alment góðkenda definitión, men ein definitión er: meting, ið hevur sum mál at geva afturmelding um avrik fyri at bøta um og fremja lærdóm. Formativ meting hevur hesar meginreglur:

1. at fáa greiðu á, hvat gott avrik er
2. at fremja egin-meting
3. at geva dygdargóða afturmelding
4. at seta gongd á dialog millum lærara og næmingar og ímillum næmingar
5. at stimbra positiva motivatión og sjálvsvirðing
6. at bjóða møguleikar at minka um munin millum verandi avrik og ynskt avrik
7. at lærarin fær vitan, sum kann brúkast sum hjálp at forma undirvísing, men hetta svarar til diagnostiska meting.

Fleiri serfrøðingar vísa á, at formativ meting við afturmelding er helst tað mest týðandi og gevandi, sum lærari kann gera fyri næmingarnar. Men av nógvum orsøkum verður hesin møguleiki ikki gagnnýttur til fulnar. Nakrar av hesum osøkum eru:

1. for nógv fokus á karakterir
2. for nógvir næmingar í flokkinum
3. modularisering av útbúgvingum
4. gomul siðvenja í undirvísing

Nógvir lærarar gera sær stóran ómak at geva positiva og uppbyggjandi afturmelding til næmingar, men teir uppliva ofta, at hetta er burturspilt arbeiði, tí næmingar eru sjáldan serliga áhugaðir í hesum viðmerkingum; teir eru meira karakter-fokuseraðir og leggja minni í viðmerkingar. Tá ið karakterur fyrst er givin fyri avrik, er hugurin at reflektera um avrikið ikki tann stóri. Tí eru hyggjuráðini at gevast við at geva karakter, meðan næmingurin er í gongd við at læra, tí tá flyta vit fokus frá at døma til at læra.

At nógvir næmingar kunnu vera í flokkunum, er eisini ein búskaparligur

spurningur, sum vit ikki fáa gjørt so nógv við. Ein leið kundi verið at havt stór hold til fyrilestrar og smáar klassar til venjingar, soleiðis sum gjørt verður í hægri skúlum. Men hetta krevur broytingar í hugburði um undirvísing og læring á miðnámi.

Í øðrum londum gremja tey seg um, at útbúgvingarnar verða meira og meira modulariseraðar, soleiðis at næmingar skulu til próvtøku í heilum. Teir taka fáar lærugreinir hvørja ferð sum modul í nakrar vikur, og so fáa teir nýggjar lærugreinir, so hvørt sum modulið er lokið. Hetta er ein stór forðing fyri formativari meting. Men í Føroyum eru vit í tí hepnu støðu, at gymnasiali reformurin leggur upp til langar undirvísingargongdir í teimum fakum, sum næmingurin skal hava á B- ella A-stigi. Um næmingur velur lærugrein á A-stigi, skal hann ikki til próvtøku fyrr enn eftir trimum árum. Vilja vit gagnnýta henda møguleika, lærir næmingurin meira. Royndir frá 3-ára HH, sum var, áðrenn búskaparbreytin kom, vísa, at úrslitini til dømis í støddfrøði B vóru nógv betri, tá ið næmingarnir fingu savnað seg um fakið í tvey ár, áðrenn teir skuldu til próvtøku.

## Diagnostisk meting

Sum leiðari hevur lærarin ofta brúk fyri at seta diagnosu fyri at velja leiðslustíl. Í undirvísing kann hetta vera ein meting av, hvat næmingurin hevur lært, men diagnosan kann eisini fevna um ymiskleikar við næminginum (til dømis hugburð til tað at læra og intellektuella menning). Diagnostisk meting verður brúkt tíðliga í eini læritilgongd, men verður eisini brúkt framhaldandi í skúlaárinum.

## Varandi meting

Varandi meting er meira ein hugsjón enn ein metingarháttur. Meðan summativ meting kannar, hvat var lært, og formativ meting er hjálp til at læra nú, so fyrireikar varandi meting næmingin til at læra í framtíðini. Hugtakið lívlong læring er ofta at hoyra, og tað ber boð um, at stórur tørvur er á at læra, eftir at formligur skúlalærdómur er lokin. Men tíverri er hugtakið so nógv misnýtt, at tað hevur mist ta upprunaligu meiningina. Lívlong læring er treytað av, at beinleiðis motivatiónin er so sterk, at djúp, skapandi læring stendur við, og næmingurin er mótstøðuførur ímóti stuttskygdum vinningi av grunnum lærdómi.

## Samanumtikið

Formativ meting í praksis (ikki í teoriini) leggur ov stóran dent á stuttskygd mál, og er fongd við summativum hugsanarhátti. Fyri at geva eitt íkast til lívlanga læring, so skuldi formativ meting havt sum mál:

- at næmingurin verður beinleiðis motiveraður,
- at hann nemur sær lærdóm á ein kritiskan og sjálvstøðugan hátt (sum tó krevur høgt intellektuelt stig),
- at hann mennir førleikan í egin-meting,
- at læringin verður sett í samband við lívið uttan fyri skúlan og við aðrar lærugreinir,
- at meiri fokus verður á at arbeiða og luttaka enn bara at ogna sær vitan – fyri at byggja brúgv millum skúlalærdóm og lærdóm uttan fyri skúlan.

# Orðblindni

Martha W. Dalsgaard

Orðblindni er vanligt, eisini í Føroyum, men tey fægstu munnu geva sær far um, at kanska millum 10 og 15 prosent av øllum føroyingum eru orðblindir, og møguliga 5 prosent av øllum føroyingum hava stórar trupulleikar av orðblindni.

Tó eru góðar vónir. Telduforrit finnast, ið fullkomiliga hava kollvelt møguleikarnar hjá orðblindum. Til dømis finnast pennar, ið kunnu skanna tekstir inn í telduna, so teldan kann lesa tekstin upp fyri tí orðblinda.

## Hvat er orðblindni?

Orðblindni, dysleksi, eru eyðsýndir trupulleikar við at læra at lesa og skriva. Hetta merkist sum seinfatandi og óneyv umseting av bókstavum og bókstavafylgjum til málljóð.

Orðblindni stendst hvørki av tvørrandi evnum ella av sjóntarni. Harafturímóti er tað torført hjá orðblindum at skifta samanhangandi talu sundur í teimum málljóðunum (fonemunum), ið eru støðið undir skriftini. Orðblindni vísir seg ofta saman við øðrum málsligum trupulleikum (dysfasi).

Orðblindni er arvaligt, men tað merkir ikki, at øll arva tað, minni enn so. Tað hevur einki við vantandi evni ella ágrýtni hjá tí einstaka at gera.

Heimskendu John Lennon, Bill Gates og Jamie Oliver eru orðblindir, men hava sanniliga nátt nógv.

## Staðfesting av orðblindni

Millum annað kann staðfestast við einari kanning, um lesi- og skrivitrupulleikar botna í orðblindni. Tað ber eisini til hjá skúlanæmingum og vaksnum við hesum trupulleika at fáa hjálp, so tey annaðhvørt læra at lesa og skriva, ella á annan hátt fáa atgongd til fakliga vitan. Tað er munur á at vera orðblindur og lesiveikur. Ert tú lesiveikur, hevur tú ilt við at lesa og hevur brúk fyri einum eyka skumpi at fáa lesingina á glið. Ert tú orðblindur, brýtur tú ikki lesikotuna uttan góða serundirvísing.

Tey orðblindu skulu hava sín lærdóm á ein øðrvísi hátt. Orðblindni er eitt

brek, sum við rættari hjálp kann bøtast um. Veruleikin er, at orðblind eru vanliga gávað menniskju við einum heilt ítøkiligum málsligum trupulleika.

## Støðan í dag

Hvussu er støðan í skúlunum nú á døgum viðvíkjandi orðblindni, og hvørja hjálp fáa hesir næmingar?

Í dag er støðan tann, at orðblindalærarar eru útbúnir til miðnámsskúlar, vinnuskúlar umframt kvøldskúlarnar, so hjálp er at heinta hjá teimum, sum hava fingið staðfest orðblindni ella á annan hátt halda seg vera orðblind.

Á samskipaða umsóknarblaðnum til miðnámsskúlarnar verður roynt at varnast tey, ið eru orðblind, so neyðug hjálp kann verða veitt. Tað, sum hevur týdning, er at viðurkenna orðblindni og at skipa tilboðini, so tað ikki verður steinur omaná byrðu at fáa fatur á røttu hjálpini, sum er til taks.

Í 2011 tóku 18 orðblindalærarar prógv. Hetta er ein útbúgving fyri tey, ið undirvísa vaksnum, 14 ár og eldri, sum eru orðblind. Luttakarar vóru lærarar, ið undirvísa í frítíðarundirvísingini, vinnu- og miðnámsskúlunum og lærarar, ið undirvísa í elstu flokkum fólkaskúlans. Hesir lærarar starvast í dag á omanfyrinevndu skúlum, og úrslitini eru sjónlig.

Áhugafelagið Lesi- og skriviveik hevur í fleiri ár veitt orðblindum ráðgeving og undirvísing, og Mentamálaráðið veitir felagnum árligan stuðul til hetta virksemi av serligari játtan á fíggjarlógini. Bæði lesivegleiðarar, orðblindalærarar og serlærarar undirvísa hjá felagnum.

Tað eru nógvar sólskinssøgur, har tey orðblindu tora at stíga fram og siga, at tey eru orðblind. Samstundis er orðblindni enn eitt brek, sum hevur havt ilt við at verða viðurkent. Vit hava nógv talandi dømi í dag, hvussu trupult tað hevur verið at berjast fyri egnum rættindum, men at tað veruliga eru mong, sum royna at stuðla, og at til ber at fáa eina útbúgving hóast orðblindni.

Nú á døgum eru fleiri tól, sum tey orðblindu kunnu nýta í sambandi við skúlagongd. Nógvar skúlabøkur eru lisnar inn, og ein føroyskur orðabanki er gjørdur, soleiðis at tað ber til at fáa bæði upplestur, lesi-og stavihjálp á fleiri málum. Eitt annað dømi, er forritið Dictus, ið skrivar orðini beinleiðis í Word, so hvørt sum tú sigur tey.

Ljós hevur verið varpað á orðblindni tey seinastu árini, bæði frá almennari

síðu og privatum felagsskapum. Tað gongur tann rætta vegin og tað er próvfast, at tess skjótari orðblindni verður staðfest og serkøn hjálp veitt, tess betri verður úrslitið.

*Niels Ebrup hevur skrivað greinina. Hon varð prentað í www.videnskab.dk 7. mai 2014.*

# Floksstøddin ávirkar próvtølini

Týðing: Sólfinn Hansen

Tess fleiri næmingar eru í einum 10. flokki, tess verri verður úrtøkan við víðkaðu fráfaringarroyndina.

Næmingar í 10. flokki fara 0,1 prosentstig niður í endaligum próvmeti, um 25 næmingar eru í flokkinum, í mun til um 15 næmingar eru í honum.

Um tú sum næmingur ynskir eitt hægri próvtal, er tað ein fyrimunur at ganga í einum flokki við lutfalsliga fáum næmingum. Næmingar fáa vanliga lægri próvtøl við víðkaðu fráfaringarroyndina, um teir hava gingið í einum stórum flokki.

Hetta er úrslitið av eini kanning av próvmetunum hjá næmingum, sum luku 10.-floksprógv árini 2003-2006. Kanningin varð almannakunngjørd í mai í ár (2014) í tíðarritinum Education Economics, og hon vísir, at ikki bert yngru næmingarnir fáa hægri próvtøl, um teir ganga í einum flokki við fáum floksfeløgum.

„Leingi hevur verið kjakast um, hvørt floksstøddin hevur týdning fyri fakliga støðið. Men okkara kanning vísir greitt, at støddin hevur týdning – eisini fyri eldru árgangirnar. Áður varð hildið, at hon fyrst og fremst hevði týdning fyri yngru næmingarnar“, sigur Karl Fritjof Krassel, ph.d.-lesandi við Center for Strategisk Uddannelsesforskning á Aarhus Universiteti.

„Kanningarúrslitini kunnu gera politikararnar betur førar fyri at taka avgerðir, og avdúkingin kann gera sítt til, at danskir skúlanæmingar gerast sterkari fakliga“, heldur hann fram.

## So nógv lækkar próvtalið

Sum næmingur í 10. flokki kanst tú rokna við, at próvtøkumiðaltalið lækkar 0,1 próvtalsstig, um flokkurin økist við 10 næmingum. Tað er altso ein fyrimunur at vera í einum flokki við 15 næmingum heldur enn einum við 25.

Ávirkanin er ikki ógvuslig, og hon flytur ikki tað heilt nógva. Men tað er ein verulig ávirkan, sum kann ávísast hagfrøðiliga.

Vit vísa á, at floksstøddin hevur týdning, men at hon helst ikki er tann mest týðandi viðvirkanin til, at næmingarnir gerast fakliga dugnaligir. „Týdningarmest er dygdin á lærarunum", sigur Karl Fritjof Krassel.

Karl Fritjof Krassel dugir ikki at siga, hvør floksstødd er tann besta fyri innlæring næminganna. Men vanliga verða 10. flokkar býttir í tvey, um teir annars høvdu fingið fleiri enn 28 næmingar. Og tað er í tílíkum sundurbýttum, smærri flokkum, at næmingarnir fáa bestu próvtølini.

## Stórir flokkar órógva framfýsni

Granskararnir hava eisini hugt at, hvønn týdning floksstøddin í 10. flokki hevur fyri, um næmingarnir taka víðkaðu fráfaringarroyndina. Hetta er ein meira framfýsin fráfaringarroynd, har næmingurin sjálvur velur at fara til próvtøku á hægri torleikastigi í m.a. donskum og støddfrøði, enn til fráfaringarroyndina eftir 9. flokk.

„Vit komu fram til, at floksstøddin eisini hevur ávirkan á, um næmingarnir taka víðkaðu próvtøkuna. Um tú ert í einum flokki við nógvum næmingum, er møguleikin fyri, at tú tekur víðkaðu fráfaringarroyndina í donskum, støddfrøði og enskum, minni. Orsøkin til hetta er helst, at lærararnir hava meiri tíð til einstaka næmingin í einum minni flokki", sigur Karl Fritjof Krassel.

## Fakta

- Kanningin er bert gjørd við støði í 10. flokkum í vanligum fólkaskúlum og privatskúlum – ikki eitt nú eftirskúlum.
- Flokkarnir høvdu í miðal 21 næmingar í hvørjum.
- 46.267 næmingar vóru við í kanningini av, um næmingarnir tóku víðkaðu fráfaringarroyndina.
- 29.184 næmingar vóru við í kanningini av, um floksstøddin ávirkar próvtalið. Talið á næmingum í tí partinum av kanningini var lægri, tí granskararnir bert tóku atlit at næmingunum, sum tóku víðkaðu fráfaringarroyndina í kravdu lærugreinunum. Hetta gav eitt betri hagfrøðiligt grundarlag.

- Kanningin er bert fram til 2006, tá ið nýggi próvtalsstigin varð settur í verk. Hetta tí at trupult hevði verið at samanborið millum gomul og nýggj próvtøl. Somuleiðis varð próvtøkuhátturin eisini broyttur samstundis.

Formaðurin í felagnum fyri skúlastjórar, Claus Hjortdal, ið umboðar umleið 3.800 skúlastjórar, er bilsin av nýggju úrslitunum. Hann ger vart við, at 10. flokkur er ein serligur árgangur í fólkaskúlanum, og tí skal ein vera varin við at nýta niðurstøðurnar úr kanningini á onnur floksstig. Tá hetta fyrivarnið er tikið, metir hann tó, at avdúkingin eigur at vera tikin við í grundarlagið fyri nýggju skúlaskipanini.

„Eg meti tað vera áhugavert í sambandi við, at fólkaskúlanýskipanin gevur skúlunum størri møguleikar at býta flokkarnar sundur í bólkar og harvið fáa meiri differentiering og tættari samband millum næmingar og lærarar. Mín vón er, at tølini verða gjølla greinað og samanborin við eldri úrslit, soleiðis at vit kunnu nýta hesa vitanina í nýskipanini“, sigur Claus Hjortdal.

## Góðir flokkar vaksa – trupult at samanbera

Granskararnir valdu at hyggja at 10. flokki burturav, tí tað gav teimum møguleikan at kanna sambandið millum næmingatal og próvtøl. Í yngru árgangunum er frammanundan greitt, at undirvísingin broytist eftir næmingatali, og tað hevði tí givið eina skeiva mynd at viðgjørt teir eisini.

Góðir flokkar vaksa vanliga, tí foreldrini gjarna vilja hava, at teirra børn ganga í teimum. Og øvugt minka teir minni góðu flokkarnir av somu orsøk. Hetta ger tað truplari at gera rættvísandi samanberingar millum yngru næmingarnar.

Karl Fritjof Krassel og starvsfelagi hansara valdu tí at kanna sambandið millum floksstødd og víðkaðu fráfaringarroyndirnar. Tá byrjað verður í einum 10. flokki í Danmark er tað nevniliga vanliga ein heilt nýggjur flokkur við øðrum floksfeløgunum og aðrari floksmentan, ið frammanundan hvørki kann hava stygt næmingar ella drigið teir at sær.

„Vit hyggja at 10. flokkum, tí har er tað gjørligt at fremja kanningina. Hetta er ein sniðfundigur háttur at fáa eitt greiðari úrslit. Eitt úrslit, sum vísir seg eisini at vera í tráð við líknandi kanningar uttanlands“, sigur Karl Fritjof Krassel.

*Henda grein stóð í New York Times 12. august 2007*

# Hví ger undirvísing í búskapi so lítlan mun?

Robert H. Frank
Týðing: Olav Absalonsen

Tá ið eg byrjaði at undirvísa í búskapi í 1970'unum, legði eg til merkis, at fólk hugdu undarliga upp á meg, tá ið tey hoyrdu, hvørjum eg undirvísti í. Tá ið eg spurdi tey hví, svaraðu fleiri teirra nakað so: „Eg hevði grundleggjandi búskap í skúlanum fyri mongum árum síðani, og har vóru allar hesar løgnu líkningarnar og kurvurnar."

Hesi keðiligu minni høvdu helst sínar orsøkir. Kanningar hava víst, at tá ið næmingar fóru til roynd í grundleggjandi búskapi seks mánaðir eftir, at teir høvdu verið ígjøgnum eitt skeið í innleiðandi búskapi, kláraðu teir seg ikki frægari í miðal enn tey, sum ongantíð høvdu havt búskap í skúlanum. Í øðrum pørtum av samfelagnum hevði ein sovorðin staðfesting ført til endurskoðan. Men í skúlaverkinum góðtaka næmingar og foreldur hesa støðu ár eftir ár.

Hví eru innleiðandi skeið í búskapi so ineffektiv? Eitt møguligt svar er, at lærarar royna at læra næmingarnar alt ov nógv. Eitt týpiskt skeið grýtir næmingarnar undir í hundraðtals evnum, og nógv av teimum byggja á fløktar líkningar og kurvur. Sum Nobelprístakarin George J. Stigler skrivaði fyri meira enn 40 árum síðani: „Tann stutta gjøgnumgongdin av hvørjum einstøkum av mongum teknikkum og problemum gevur ikki næminginum nakran grundleggjandi búskparligan logikk, sum hann kann nýta at greina búskaparligar spurningar, ið hann møtir sum borgari." Tann støddfrøðiliga formalisman, sum er blivin aðalmerki í búskaparligari gransking, hevur givið okkum nógv, men hon hevur ikki hjálpt næmingum á byrjanarstigi at læra grundleggjandi búskaparligar reglur.

Tey góðu tíðindini eru, at lærihættir, sum hava kollvelt undirvísing í fremmandamáli, eisini kunnu gera sama mun í búskapi og øðrum lærugreinum. Eg hevði spanskt í 4 ár í high school, men hevði sera trupult at fáa spaniólar

at skilja meg, tá ið eg var í Spania og ferðaðist. Tá var nógvur dentur lagdur á grammatiskar smálutir, sum svara til tað tekniska tilfarið, sum plágar næmingar, ið taka búskap á byrjanarstigi. Í málundirvísing í dag verður roynt at nýta ta organisku tilgongdina, sum børn nýta, tá ið tey læra sítt egna mál.

Fyrstu ferð eg upplivdi henda nýggja mátan var, tá ið eg skuldi undirvísa í støddfrøði og náttúruvísind í Nepal. Vit lærdu at málbera okkum grammatiskt rætt, men vit fingu onga undirvísing í grammatiskum reglum. Vit skuldu læra málið frá grundini og skuldu duga at undirvísa á nepali bara 13 vikur seinni. Tað, sum vit lærdu, var grundleggjandi, men tað bar til.

Eins og bara nakrir fáir einfaldir setningar gera smá børn før fyri at greiða frá nógvum ymiskum hugsanum, so kunnu nakrar fáar grundleggjandi reglur lyfta nógv í búskapi. Tann, sum leggur dent á hesar fáu reglur og lærir at nýta tær aftur og aftur í dømum, sum næmingurin kennir aftur, kann gerast kønur í teimum eftir einum semestri.

Mátin, sum ein ognar sær lærdóm, hevur týdning. Av tí at vit hava eina siðvenju at siga frá søgum, hevur mannaheilin ein íbornan eginleika at taka ímóti, tá ið onkur sigur frá. Fyri nógvum árum síðani kom eg út fyri einari uppgávu, sum nýtir júst hesa styrki. Tvær ferðir hvørt semestur biði eg næmingarnar seta ein spurning, ið er grundaður á okkurt, sum tey persónliga hava sæð ella lagt til merkis. Við 500 orðum í mesta lagi skulu tey nýta gundleggjandi búskaparligar reglur at svara spurninginum.

Ein stórur partur av næmingunum nýtir cost-benefit regluna, sum sigur, at ein rationellur persónur tekur avgerðir eftir, um vinningurin av avgerðini er størri enn kostnaðurin. Henda regla kann forklára avgerðir hjá myndugleikum, sum annars kunnu tykjast løgnar. Ein fyrrverandi næmingur, Greg Balet, spurdi, hvussu tað bar til, at foreldur skulu binda smábørn í barnastól, tá ið tey fara eitt stutt ørindi við bili, men hava loyvi at flúgva úr New York til Los Angeles við smábørnum í fanginum.

Eitt svar kundi verið, at um flogfarið dettur niður, ger tað lítlan mun, um barnið er íbundið ella ikki. Men Balet førdi fram, at av tí at tann veruligi vinningurin av at hava trygdarbelti í flogførum er at forða fyri skaða av turbulensi, skuldu barnastólar verið líka nýtiligir í flogførum sum í bilum.

Forkláringin má finnast á kostnaðarsíðuni, segði hann. Tá ið tú fyrst hevur

sett ein barnastól í bilin, kostar tað einki at brúka hann. Men um tú fert við flogfari úr New York til Los Angeles, mást tú keypa ein ferðaseðil afturat, sum kanska kostar $ 1.000. Barnastólar klára tískil oftari cost-benefit testina í bilum enn í flogførum. (Búskaparfrøðingar hava eitt einfalt svar til tey, sum ikki halda, at kostnaður hevur nakað at siga í avgerðum um trygd: „Fært tú bremsurnar í bilinum eftirkannaðar hvønn morgun á veg til arbeiðis?“)

Tá ið vit hugsa um týdningin av búskaparligum avgerðum, vit skulu taka, bæði sum einstaklingar og sum samfelag, mugu vit sanna, at effektivari venjing í búskapi hevði loyst seg. Og tá ið vit síggja, hvussu lítið undirvísing í búskapi nyttar, sum er, váða vit einki, um vit royna okkurt nýtt.

# Námsfrøðiligt tiltak á Føroya Handilsskúla

Tórður Johannesarson

**Lærarar á Føroya Handilsskúli hava í fimm ár havt námsfrøðilig tiltøk á skúlanum.**

## HH3 – ein royndarskipan

Í 2007 byrjaðu lærarar á Føroya Handilsskúla í Havn og á Kambsdali eina royndarskipan, ið kallaðist HH3. Henda nýggja skipanin var ein gymnasial skipan, har næmingar fingu møguleika at taka hægri handilsprógv upp á trý ár. Nú seks ár seinni hava vit fingið Búskaparbreytina, sum líkist nógv gomlu HH3-skipanini.

## Hugskotið um námsfrøðiliga tiltakið sprettur í HH3 í 2007

Áðrenn vit byrjaðu skúlaárið í 2007-08, hevði toymið á Føroya Handilsskúla í Havn, ið skuldi hava fyrsta flokkin, nógvar fyrireikingarfundir um nýggju royndarskipanina. Tey løgdu eina við, at skipanin skuldi roynast í orðsins sanna týdningi, nevniliga sum ein roynd. Tey settu seg saman og kjakaðust um, hvat vantaði í gomlu HH-skipanini. Toymið kom m.a. fram til, at tað var neyðugt at hava opinleika um ársmet. Somuleiðis átti tað námsfrøðiliga at verið raðfest høgt.

Kjakast var um m.a. tvørfakligt samstarv, undirvísingargongdir, hvat riggaði væl og minni væl í undirvísingini, hvussu vit kundu taka útgangsstøði í einstaka næminginum o.s.fr. Olav Absalonsen kom tá við hugskotinum um at hava eitt námsfrøðiligt tiltak, har lærarar kundu hava upplegg og kjakast um námsfrøðiligar spurningar. Tað gekk eitt heilt ár, áðrenn fyrsta tiltakið gjørdist veruleiki.

## Í november í 2008 brast fyri nevi

Tað var av stórum týdningi, at tað ikki skuldi vera møtiskylda til fundirnar. Tiltakið skuldi liggja uttan fyri vanliga undirvísing. Toymið var samt um, at samsýning ikki skuldi latast.

Tann 28. november í 2008 bleiv kallað inn til fyrsta námsfrøðiliga tiltakið. Olav hevði fyrsta uppleggið í desember í 2008. Hann hevði í 2006 skrivað ritgerð á Robert Gordon Universiteti um Føroya Handilsskúla. Har kom hann millum annað inn á næmingar og ymiskleika. Tað var tí natúrligt at hava upplegg um hetta. Í fyrsta upplegginum var ein framløga, sum var umleið 30-40 min. Síðan var kjak millum áhoyrarar um evnið í ein góðan tíma. Fyrsta tiltakið riggaði so mikið væl, at leisturin hevur verið hin sami. Summi av evnunum hava verið rættiliga ástøðilig, meðan onnur hava verið meira gerandislig, um t.d. um nýtslu av teldum í undirvísingini, at rætta uppgávur, undirvísingargongdir o.s.fr. Sum dømi um upplegg kunnu nevnast Classroom Management, detuktiv/induktiv læring, verkligi parturin í námsfrøðiligu útbúgvingini, Cooperativ Learning, toymisarbeiði í undirvísingini, stillu næmingarnir – hvussu røkka vit teimum?, meting í undirvísing o.s.fr. Lærarar á skúlanum hava tikið væl ímóti tiltakinum. Í hesum forumi hava teir kunnað kjakast og fingið góð hugskot til undirvísingina. Uppmøtingin hevur verið ómetaliga góð hesi fimm árini. Tað hevur ikki staðið á hjá fyriskiparunum at fingið lærarar at hava upplegg.

## Uppleggið hjá Alex Ocampo

Í apríl 2014 hevði Alex Ocampo eitt upplegg, sum hann kallaði Code of Ethics. Hann legði m.a. upp til kjak, hvørt lærarar á miðnámi kundu taka ímóti gávum ella tilboðum frá næmingum, ið hava arbeiði í síni frítíð. Í Danmark er eitt kjak, um tað er etiskt rætt, at námsfrøðingar taka ímóti gávum, tí at foreldur vilja vísa nøgdsemi. Tað er ikki óvanligt, at lærarar á miðnámi hava næmingar, ið arbeiða í t.d. handlum ella matstovum. Kunnu lærarar loyva sær at taka ímóti avslátri frá hesum næmingum? Alex hevur skrivað eina grein um hetta evnið. Erla Bech Nolsøe hevur týtt greinina, sum er prentað niðanfyri.

# Etiskar reglur fyri lærarar?

Alex Ocampo
Erla Bech Nolsø týddi

Hvar byrjar tú, um tú vilt stýra kroppum, sálum og sinnum í einum landi? Ein grein, ið kallaðist „How Dictatorships Brainwash Children“ frá NewsViewz@aol.com 3. juli 1997, kom við teirri hugsan, at við atburðinum hjá undanfarnum einaveldum í huga er enn møguligt hjá einari stjórn at heilavaska borgarar nú á døgum. Hon byrjar heilt einfalt við teimum, sum eru mest viðkvom og lættast at ávirka í samfelagnum: Børnunum.

Fyri at fremja tílík svikaráð vísir greinin á, at stjórnin má fyrst fáa fult vald á undirvísingarskipanini fyri tey ungu. Tey fyrstu árini hava mest at siga at mynda tey ungu sinnini eftir teirra ætlan. Síðani verður teirra egna tilfar nýtt í undirvísingini og undirvísingargongdir, sum tey sjálv hava lagt til rættis, soleiðis at næmingarnir læra virðini, sum stjórnin hevur ásett. Soleiðis verða lærarar, sum verða hildnir at vera vitanarbrunnar, sjálvvirkandi og sjónligir stuðlar í hesum svikaráðum.

Hóast tað er torført at góðtaka, mugu vit viðurkenna tað stóra valdið, ið lærarar hava at mynda framtíðina hjá einum samfelagi. Næmingar eru í skúla ein triðing av degnum, og lærarar kunnu alla hesa tíðina brúka teirra myndugleika at ávirka barnasinnini, sum teimum lystir. Um ein lærari vil fylla tey ungu sinnini við dragsli, kann hann gera tað. Og um foreldur ætla at taka myndugleika frá læraranum, kann tað tykjast skelkandi, at ein amerikanskur dómstólur eina ferð hevur givið skúlanum viðhald ímóti foreldrum, sum vilja blanda seg uppí undirvísingartilfarið. Í 2005 vórðu bæði foreldur og politikarar skelkað, tá ið ein rættur gjørdi av, at grundleggjandi rætturin hjá foreldrum at uppala børn síni „ikki náddi inn um dyr skúlans: Ein kommunalur skúli hevur rætt til at veita næmingum ta vitan, sum hann ynskir – kynsliga ella aðra“ (Ninth Circuit Decision Denies Parents’ Rights, 2005). Í grundini hava foreldur onga heimild at taka myndugleikan frá almenna skúlanum at velja, hvat børnini fáa at vita. Foreldur og alt samfelagið eru máttleys móti hesum almáttuga persóninum í samfelagnum – læraranum.

Hvat kann samfelagið gera við hetta? Skulu foreldur tiga, meðan tey óvirkin yvirgeva rættin til børn teirra til ein persón, sum tey als ikki kenna? Avgjørt ikki! Um lærarar skulu hava sosialu ábyrgdina at menna sinni og eginleikar hjá okkara ungdómi, so er alneyðugt við siðfrøðiligum (etiskum) reglum, sum kunnu skipa myndugleikan hjá læraranum. Sum lærari sjálvur kenni eg ikki tørvin at prógva fyri samfelagnum, at vit eru ábyrgdarfullir einstaklingar. Eg síggi tørvin at hava eina høvuðsvegleiðing til dagligar avgerðir, eina, sum kann hjálpa mær at skilja, hvussu eg skal bera meg at í ávísum umstøðum. Tílíkar reglur avspegla eldhugan fyri okkara arbeiði. Við ábyrgdini av okkara yngstu borgarum fylgir skyldan at verja tey ímóti valdsmisnýtslu. Tá ið vit vita, at fleiri børn fáa ov lítla umsorgan, skylda vit teimum at seta reglur í verk um atburðin hjá læraranum.

Av hesum orsøkum er kjakið um tørvin á reglum nyttuleyst. Siðfrøðiligar reglur við ásetingum um atburðin hjá læraranum eru treyt fyri, at lærarin kann virka ábyrgdarfult. Síðani er spurningurin bara, um vit sum lærarar vilja lata okkara sosialt ásetta vald frá okkum til siðfrøðiligar reglur, sum vit mugu svara fyri. Eru vit lærarar sinnaðir at geva okkum undir tílíkar reglur?

At enda mugu vit hava í huga, at vit bara eru lærarar frá 8 til 16. Flestu okkara gerast síðani aftur foreldur, sum ynskja einki minni enn tað besta fyri børn okkara. Og fara vit sum foreldur at himprast við at siga, at vit ynskja børn okkara vard ímóti villleiðandi sjálvútnevndum einaræðisharrum í føroysku skúlaflokkunum? Um svarið er nei, mugu vit í øllum førum seta siðfrøðiligar reglur fyri lærarar í verk.

## Keldur

Ninth Circuit Decision Denies Parents' Rights. (2005, December). Retrieved from Eagle Forum.

„Education Reporter“: http://www.eagleforum.org/educate/2005/dec05/9th-circuit.html

# Próvtalsstigar

Olav Absalonsen

**Tann nýggi 7-trinstigin, sum frammanundan varð settur í gildi í fólkaskúlanum, kom í gildi á miðnámi í 2013. Møguligt var annars at velja ein bókstavsstiga fyri at gera upp við siðvenjuna at rokna villleiðandi miðaltøl í prógvum, sum hevur óhepnar avleiðingar fyri undirvísing og læring.**

Tann nýggi 7-trinstigin er gjørdur eftir europeiska ECTS stiganum, sum er ein bókstavsstigi, og hesir eru samanbornir í talvu 1. Tann nýggi 7-trinstigin er gjørdur við tí fyri eyga at gera tað lættari at umseta próvtøl til ECTS stigan, enn tað er við 13-stiganum. Ein spurningur er tí, hví tann nýggi stigin er í tølum og ikki bókstavum. Orsøkin skal vera, at tað skal bera til at rokna eitt miðaltal út.

Talva 1: Samanbering av ECTS og 7-trinstiganum

| ECTS | A | B | C | D | E | Fx | F |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7-trinstigin | 12 | 10 | 7 | 4 | 02 | 00 | - 3 |

Ein próvtalsstigi er ein skali við intervallum sum til dømis teir, ið verða brúktir til at máta vekt, longd, tíð og hita. Men próvtalsstigar ella próvstavsstigar (ein karakterstigi kann eisini vera í bókstavum) verða brúktir til at umseta metingar um avrik hjá næmingum til eitt tal (ella ein bókstav). Ein slík umseting er altíð ein avrunding, og tá ið tú skalt rokna eitt miðaltal av fleiri mátingum, so skalt tú ikki runda mátingarnar ov nógv av, tí tað hevði gjørt, at miðaltalið verður skeivt. Í so máta hevur 7-trinstigin sama veikleika sum 13-stigin; hann er bara verri, tí hann hevur færri met at velja ímillum, og tí verða avrundingarnar í miðal størri. Hetta fyribrigdi kallar Peter Knight 'misnýtsla av tølum', tí at umsetingin

av einari meting um eitt avrik til eitt tal er útsett fyri manipulatión, sum er lýst við dømum í hesi greinini.

Spyrja vit spurningin, hví ECTS-stigin brúkar bókstavar og ikki tøl, er svarið, at tað er fyri at tað skal ikki bera til at rokna eitt miðaltal út, tí at hesi met eru avrundaðar ásetingar av metingum (um onkur kortini hevði funnið upp á at rokna eitt miðaltal av bókstavum, so hevði hann sett tøl á bókstavarnar og helst roknað við líka stórum intervallum millum bókstavarnar).

## Samanbering við 13-stigan

Myndugleikar og skúlar, sum brúka 7-trinstigan, samanbera hann við 13-stigan, sum víst í talvu 2. Av tí at báðir stigarnir verða brúktir til at rokna miðaltøl, kann talva 2 eftirkannast at vita, um hon samsvarar við linjubeina umrokning (sum til dømis umrokning millum stig Celsius og stig Fahrenheit). Talva 3 vísir hesa samanbering.

Talva 2: Almenn samanbering av 13-stiganum og 7-trinstiganum

| | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 13-stigin | 13 | 11 | 10 | 9 | 8 | 7 | 6 | 5 | 03 | 00 |
| 7-trinstigin | 12 | | 10 | 7 | | 4 | 02 | 00 | | - 3 |

Talva 3: Samanbering av 13-stiganum og 7-trinstiganum við miðaltølum í huga

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 13-stigin | 11 | 10 | 8½ | 7 | 6 | 5 | 3½ |
| 7-trinstigin | 12 | 10 | 7 | 4 | 02 | 00 | - 3 |

Talva 3 er tann linjubeina samanberingin millum stigarnar báðar og sigur tað sama sum mynd 1, har 13-stigin gongur frá 11 niður í 3½, ið svarar til -3 í nýggja stiganum. Av tí at samanberingin er linjubein, svarar 8½ í 13-stiganum til 7 í tí nýggja. Talva 3 samsvarar ikki við talvu 2, sum er ein almenn samanbering, og tað avdúkar, at 5 av 7 metum samsvara við met á 13-stiganum, at 13 og 00 í 13-stiganum eru ikki til í 7-trinstiganum, at 7 svarar til 8½ á 13-stiganum, og at –3 svarar til 3½ á 13-stiganum, og ikki 00, sum tann fyrra talvan sigur. Tá ið

tað snýr seg um at rokna miðaltøl, er –3 eitt frægari met enn 03 í 13-stiganum er, fyri ikki at tala um 00. Tann almenna samanberingin av hesum báðum próvtalsstigum (talva 2) er støddfrøðiliga skeiv og villleiðandi, tá ið miðaltøl skulu roknast. Umrokningar millum stigarnar kunnu verða gjørdar soleiðis (talva 3):

- Frá 13-stiganum til 7-trinstigan: falda við 2 og drag 10 frá.
- Frá 7-trinstiganum til 13-stigan: legg 10 afturat og dividera við 2.

Hesin umrokningarháttur er sum at rokna um millum Fahrenheit og Celsius, og umrokningin samsvarar væl við eina talvu í Uddannelsesguiden.dk, sum danska undirvísingarministeriið gav út í sambandi við upptøku av næmingum á hægri lærustovnar í Danmark í 2008, og ikki við ta almennu samanberingina av einstøku próvtølunum (talva 2). Tann linjubeina samanberingin av próvtalsstigunum er lýst í mynd 1.

Niðanfyri eru tvey dømi, har eitt miðaltal eftir 13-stiganum ikki hevði samsvarað við miðaltalið eftir 7-trinstiganum, soleiðis at tað ikki hevði ligið á linjuni í mynd 1, tí at talan er um ymiskar avrundingar av avrikum til met í báðum stigunum:

## Dømi 1

Ein næmingur fær hesi met eftir 13-stiganum: 10, 8, 7, 6, 5 og 03. Hetta gevur 6,5 í miðal, um øll metini viga líka nógv:

$$\frac{10 + 8 + 7 + 6 + 5 + 3}{6} = 6{,}5$$

Eftir 7-trinstiganum høvdu metini verið: 10, 7, 4, 02, 00 og 00. Hetta er í miðal 3,8:

$$\frac{10 + 7 + 4 + 2 + 0 + 0}{6} = 3{,}8$$

Ella 3,3, um 03 verður umsett til –3:

$$\frac{10 + 7 + 4 + 2 + 0 - 3}{6} = 3{,}3$$

Men tað skuldi verið 3,0, sum svarar til 6,5 eftir 13-stiganum, tá ið linjubein umrokning verður brúkt. Munurin kemur av, at 7 í 7-trinstiganum er hægri enn 8 í 13-stiganum, og 00 í 7-trinstiganum er nógv hægri enn 03 í 13-stiganum (-3 er eisini hægri enn 03 í 13-stiganum).

Mynd 1: 7-trinstigin sum funktión av 13-stiganum.




## Dømi 2

Ein annar næmingur fær hesi met eftir 13-stiganum: 8, 7, 6, 6, 5 og 03. Hetta gevur 5,8 í miðal, um øll metini viga líka nógv:

$$\frac{8+7+6+6+5+3}{6} = 5{,}8$$

Eftir 7-trinstiganum høvdu metini verið: 7, 4, 02, 02, 00 og 00, um 03 í 13-stiganum svarar til 00 í 7-trinstiganum. Hetta gevur 2,5 í miðal:

$$\frac{7+4+2+2+0+0}{6} = 2{,}5$$

Um 03 í 13-stiganum verður umsett til –3 í 7-trinstiganum, verður miðaltalið 2,0:

$$\frac{7+4+2+2+0-3}{6} = 2{,}0$$

Í hesum dømi hevði næmingurin ikki fingið prógv eftir 13-stiganum, men eftir 7-trinstiganum hevði hann klárað tað við hjálp av avrundingum – ella 'misnýtslu av tølum', sum Peter Knight kallar slíkan framferðarhátt.

Sjálvt um 5 met í 7-trinstiganum svara til 5 met á 13-stiganum, eru intervallini ikki eins fyri øll hesi 5 pørini, sum talva 4 vísir. Til dømis skuldi eitt stórt 9-tal eftir 13-stiganum verið 10 eftir 7-trinstiganum, og eitt lítið 8-tal eftir 13-stiganum skuldi verið 4 eftir 7-trinstiganum. Eisini sæst, at markið millum 5 og 03 á 13-stiganum er lægri enn markið millum 00 og –3 á 7-trinstiganum. Intervallini eru lýst í talvu 4. Hvørki 13 ella 00 í 13-stiganum eru við í talvuni, tí í 7-trinstiganum eru hesir karakterir uttan fyri samanbering, sum mynd 1 vísir.

Talva 4: Samanbering av 13-stiganum og 7-trinstiganum við intervallum

| 13-stigin | 11 | 10 | 9 | 8 | 7 | 6 | 5 | 03 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7-trinstigin | 12 | 10 | 7 | 4 | 02 | 00 | - 3 | |

Tann mest týðandi munurin millum próvtalsstigarnar er at finna í niðasta próvtalinum –3, sum her er sett at svara til 03 í 13-stiganum. Í 13-stiganum er 00 at skilja sum eitt absolutt null-punkt, sjálvt um tað ikki stendur beinleiðis í kunngerðini, sum sigur, at 00 er eitt undantaksmet, sum verður givið, tá ið einki ella einki fakligt avrik fyriliggur, og fyri at fáa 6 fyri eitt avrik krevst, at avrikið er í minsta lagi 50% av einum fullfíggjaðum avriki. Tað er sostatt ikki av tilvild, at hetta markið er millum 5 og 6, sum er helvtin av 11, ið verður givið fyri eitt fullfíggjað avrik.

Tað absolutta null-punktið er slept í 7-trinstiganum, tí her er fyrimyndin ECTS, og har er ikki brúk fyri meira enn tveimum metum, sum verða givin fyri ikki góðkend avrik: eitt, sum vísir, at avrikið var ikki langt frá at verða góðkent, og eitt, har avrikið var so mikið vánaligt, at tað var langt frá at vera góðkent. Tí er –3, sum svarar til F í ECTS-stiganum, eitt met fyri øll avrik, sum eru niðanfyri hetta lágmark, og tað tænir ongum endamáli at hava eitt uppaftur lægri met, sum bara hevði verið brúkt til at traðka á fólk, sum liggja niðri.

Men av tí at miðaltøl skulu roknast eftir 7-trinstiganum, verður tað niðasta

metið ein álvarsligur veikleiki, tí nú fáa øll avrik, sum eru undir eitt vist lágmark, –3, og tað telur líka nógv í miðaltalinum, um avrikið er út av lagi vánaligt, ella um tað er ikki so vánaligt. Eitt 7-tal vigar nú upp ímóti einum –3-tali á sama hátt, sum eitt 9-tal í dag kann viga upp ímóti einum 03.

## Hvat skal eitt miðaltal brúkast til?

Fyri at svara hesum spurningi, skulu vit gera okkum greitt, hví vit geva próvtøl. Evaluering í undirvísing og læring hevur tvey høvuðsendamál:

1. At fremja læring
2. At geva næminginum prógv, sum hann kann brúka sum váttan, tá ið hann søkir inn á aðrar lærustovnar ella søkir starv.

Í tí fyrra endamálinum eru próvtøl sjáldan fremjandi fyri læring, heldur ein forðing. Í tí seinna eru próvtøl eini boð til umheimin, at lærustovnurin váttar, hvat næmingurin dugir í hvørjari lærugrein. Tað eru eksternir brúkarar, sum lesa hesi prógv og brúka tey til at taka avgerðir eftir.

Kjarnan í spurninginum er, hví vit skulu rokna eitt miðaltal út fyri hesar brúkarar. Duga teir ikki sjálvir at lesa prógvið og gera sær eina meining um tað? Eisini kundi verið spurt, um mediantalið[1] ikki er eitt frægari tal fyri miðjuna av próvtalsbýtinum, enn miðaltalið er. Og um miðaltalið er so áhugavert, er standardfrávikið[2] ikki eisini áhugavert, so brúkarin sær, hvussu spjaðingin av metunum er? Tvey prógv við sama miðaltali eru ikki eins, um spjaðingin er ymisk. Hagfrøðingar nýta onkuntíð skemtisøgur at lýsa hetta fyrbrigdi. Ein er um mannin, sum hevði annað beini í bakarovninum og annað í frystiboksini, men miðal kropshitin hjá honum var normalur.

Í hægri lærustovnum í Danmark er siðvenja at taka næmingar inn eftir miðaltali, og tí er 7-trinstigin í tølum og ikki bókstavum. Tá ið ein nýggjur próvtalsstigi skuldi gerast, var annars møguleiki fyri at bróta hesa siðvenju,

---

1 Mediantalið er tað mittasta talið, tá ið øll tølini eru skipað eftir støð.

2 Standardfrávikið er eitt tal, sum lýsir spjaðingina av tølunum. Eitt stórt standardfrávik svarar til, at nógvir karakterir eru langt frá miðaltalinum.

sum ikki er annað enn ein gomul regla, sum tíðin langt síðani er farin frá (um hon nakrantíð hevur havt sína tíð). Í hagfrøði er altíð vandi fyri at misnýta tøl, og tá ið miðaltøl verða roknað, er hesin vandi eisini ofta til steðar. Dømi 3 lýsir hetta:

## Dømi 3

Ein næmingur fær hesi met eftir 7-trinstiganum: 10, 7, 00, 00, 00 og 00; hetta gevur 2,8 í miðal, og standardfrávikið er 4,5. Ein annar næmingur fær 7, 4, 4, 02, 02 og –3; tað er 2,7 í miðal, og standardfrávikið er 3,3. Eftir miðaltalsregluni er tað fyrra prógvið betri enn tað seinna, hóast tann fyrri er dumpaður í 4 av 6 lærugreinum, og tann seinni er dumpaður í einari av 6. Til samanberingar er mediantalið hjá tí fyrra 0,0; men hjá tí seinna er tað 3,0, sum er nógv betri enn hjá tí fyrra. Dømi 3 vísir tað absurda í at rokna miðaltøl av karakterum.

Ein álvarslig avleiðing av tí, at miðaltøl hava so stóran týdning eftir miðnám, er, at næmingar velja lærugreinir, har útlit eru fyri góðum metum, heldur enn at velja lærugreinir, sum eru hentar og viðkomandi at hava eftir miðnám. Tær skeivu avgerðirnar sum verða tiknar av myndugleikum og politikarum, fáa næmingarnar at velja taktiskt og flyta fokus frá at læra til at dyrgja eftir góðum miðaltølum. Og vit fáa eitt minni effektivt skúlaverk.

## Samanumtikið

- Tann nýggi 7-trinstigin er eitt framstig, tá ið met skulu umsetast til ECTS stigan.
- Tvær vegleiðingar, sum myndugleikarnir hava gjørt um umseting frá 13-stiganum til 7-trinstigan, samsvara ikki: tann vegleiðingin, sum samanber einstøku metini við 13-stigan, er ikki linjubein, men tann, sum samanber miðaltøl frá báðum stigum, hevur linjubeina umrokning.
- 7-trinstigin er ein samanblanding av tveimum prinsippum, sum ikki hóska saman. Annað er siðvenjan í Føroyum at rokna miðaltøl av øllum metum í einum prógvi; og hin er siðvenjan við bókstavsmetum, har miðaltøl ikki skulu roknast.

- 7-trinstigin er eitt afturstig í sambandi við at rokna miðaltøl, tí at miðaltølini verða skeivari, enn tey eru við 13-stiganum.
- Tað er at undirmeta próvtalsbrúkarar at halda, at vit mugu rokna eitt miðaltal fyri teir.
- Tað at miðaltøl hava so stóran týdning eftir miðnám, fær næmingarnar at taka skeivar avgerðir um valfak, og útbúgvingin verður minni effektiv.
- Tann europeiski bókstavsstigin hevði verið eitt betri val, tí hann hevði forðað fyri villleiðandi miðaltølum.

## Keldur

HOLM-LARSEN, S. OG PLISCHEWSKI, N., 2006, Karakterbekendgørelsen 2006, Kroghs Forlag.

KNIGHT, P., 2002. Summative Assessment in Higher Education: practices in disarray, Studies in Higher Education, Vol. 27, No. 3, pp. 275-286.

UDDANNELSESGUIDEN.dk, Ny karakterskala (Artikel), (niðurtikin 17. desember 2008).

# Námsfrøðiliga útbúgvingin

Búgvi Poulsen

Ein pína. Soleiðis hava mong óivað hugsað um hesa vælsignaðu námsfrøðiligu útbúgving, í dagligari talu pedogikum – bæði verkliga og ástøðiliga partin. Sjálvur helt eg lítið um ástøðiliga partin at byrja við. Ikki minst tí talan var um stein oman á byrðu. Lutfalsliga nýútbúgvin, studentaskúlalærari á øðrum ári, at enda liðugur á universitetinum og teimum nærum óteljandi pensumlistunum á fleiri túsund síður. Nú skuldi arbeiðast, ikki lesast.

## Ástøðiligi parturin

Eitt er ynskidreymur, annað er veruleikin. Fyrsta dagin av pedagogikum á Hotel Vágum fingu vit ein pensumlista á góðar túsund síður – ikki gott! Hesar góðar túsund síður skuldu lesast, samstundis sum arbeitt varð fulla tíð í Hoydølum. Og sum flestum kunnugt, er nógv at gera fyrstu árini sum miðnámsskúlalærari. Og at enda skuldi ein uppgáva latast inn, sum skuldi skrivast í próvtøkutíðini hjá næmingunum hjá mær – tá eg í veruleikanum átti at fyrireika próvtøkurnar. Úrslitið var, at eg var 'afturút' allan mai og juni mánað og ikki sørt smástressaður. Knýtt afturat ástøðiliga partinum vóru eisini 40 eygleiðingartímar, sum skuldu fáast frá hondini, áðrenn farið varð í jólafrí.

Meg minnist ikki at hava møtt nøkrum starvsfelaga, sum helt, at pedogogikummið var kærkomin biti. Gamaní, øll skiltu tankarnar aftanfyri, men kringumstøðurnar vóru ikki tær bestu. Øll vóru undirdýkt í arbeiði frammanundan, so tíðin til refleksión var sera avmarkað. Og tað er stórt spell, tí tey evni, sum verða tikin upp, eru viðkomandi fyri okkara gerandisdag sum undirvísarar, og ástøðini kunnu faktiskt nýtast í undirvísingini eftir ávísa jótran.

Tað stutta av tí langa er, at um vit skulu fáa fult burturúr hesi týðandi og kostnaðarmiklu eftirútbúgving, má atlit takast at tí, at kandidatarnir fáa tíð til at arbeiða og hugsa um ástøði og didaktikk.

## Verkligi parturin

Summi síggja fram til verkliga partin. Onnur fara nærum grátandi av landinum.

Tveir mánaðir burturi frá familju og vinum. Bæði fyrimunir og vansar eru við at fara til Danmarkar at taka verkliga partin. Í Danmark eru nógv fleiri miðnámsskúlar við fleiri ymiskum pedagogiskum profilum. Allir starvsfelagarnir, ið hava verið á verkliga partinum, eg havi tosað við, hava gjørt sær ymsar royndir. Onkur teirra fer ongantíð aftur at undirvísa induktivt, tað riggar ikki! Onkur annar fann út av, at lærarastýrdari talvuundirvísing faktiskt eisini er lív lagað í nýggju donsku skipanini. Flestu hava nokk funnið út av, at vanligu donsku miðnámsskúlarnir ikki eru so nógv øðrvísi enn teir føroysku. Men danir hava betri møguleikar at gera ymsar royndir, eitt nú á Ørestadsgymnasium, sum er kent frá fjølmiðlunum fyri sín serliga pedagogikk, og Høje Taastrup, sum hevur serflokkar fyri næmingar við asberger syndromi.

Nógvar av royndunum kunnu vit eins væl gera okkum í føroysku miðnámsskúlaskipanini, men møguleiki má eisini vera fyri at sleppa á onkran av donsku miðnámsskúlunum, sum hava serlig fokusøki uttanfyri tað, vit síggja í Føroyum.

Sjálvur haldi eg, at eitt pedagogikum, har ástøðiligi og verkligi parturin hanga náttúrliga saman, er besta loysnin. At pedagogikum-kandidatarnir fáa tíð og høvi at royna at fáa samanhang í undirvísingina hjá sær við stuðli av royndum lærara, ljóðar sum ein dreymur. Sum nevnt aðrastaðni á hesum síðum, er pedagogikum ein dýr skipan. Ein skipan, sum vit í veruleikanum neyvan hava fingið fult burturúr, sum er. Við nýggja YF-sáttmálanum kann útbúgvingin leggjast øðrvísi til rættis. Møguligt verður at fáa alt at ganga upp í eina hægri eind.

Hóast alt, havi eg verið glaður fyri bæði ástøðiliga og verkliga partin av pedagogikum. Eg fekk nógv burturúr skrivligu uppgávuni, har eg kundi fara til botns í evninum, og refleksiónin slapp framat. Eisini verkliga partinum í Sønderborg fekk eg nógv gott burturúr, ikki minst teimum góðu vegleiðarunum, sum eg hevði á Alssundsgymnasiet. Men eg haldi bara, at tað eigur at vera upp aftur betri.

# Námsfrøðiliga útbúgvingin – ein føroysk avbjóðing

Tórður Johannesarson

**Hanna Jensen hevur sett mentamálaráðharranum fyrispurning um t.d. námsfrøðiliga útbúgving í Føroyum. Í svarinum sæst, at eingin ætlan er um at flyta útbúgvingina til Føroya beint nú. Seinastu árini eru lærarar frá Syddansk Universitet komnir til Føroya at hava ástøðiliga partin í NÚ. Tann verkligi parturin av NÚ verður í høvuðsheitum tikin í Danmark.**

## NIS – námsfrøðiliga innleiðsluskeiðið

Lærarar, ið byrja á einum miðnámsskúla, skulu á eitt námsfrøðiligt skeið, sum MMR skipar fyri. Talan er um eitt námsfrøðiligt innleiðsluskeið, ið tekur tríggjar dagar. Lærarin fær nøkur ráð um didaktikk og námsfrøði. Seinastu 15 árini eru tvey fólk komin til Føroya úr Danmark at hava skeiðið. Hesi eru knýtt at Syddansk Universitet. Spurningurin tó, um Fróðskaparsetur Føroya ikki kundi tikið sær av NIS?

## Námsfrøðiliga útbúgvingin

Tá ið ein lærari er settur í fast starv á einum miðnámsskúla, skal hann innan tvey ár hava tikið námsfrøðiliga útbúgving, sum er býtt sundur í ein ástøðiligan og ein verkligan part. Tey seinastu árini eru nógvir lærarar sendir at luttaka í ástøðiliga partinum, men tað kunnu ganga upp í 10 ár, áðrenn verkligi parturin verður tikin.

## Tann ástøðiligi parturin

Annaðhvørt ár hava umleið 20 lærarar tikið ástøðiliga partin í námsfrøði. Kandidatarnir taka skeiðið upp á eitt ár. Tað eru leiðslurnar á skúlunum, ið

senda teir á skeiðið. Tað eru bæði lærarar í føstum starvi og tímalærar, ið fara. Skeiðið er skipað í modul. Tað eru tveir lærarar frá Syddansk Universitet, ið koma til Føroya at hava hesi. Teir koma higar umleið fýra ferðir um árið. Á skeiðnum fáa kandidatarnir gott innlit í námsfrøðilig ástøði og háttaløg. Tað er sera læruríkt hjá teimum at koma saman at skifta orð um námsfrøðiligar, didaktiskar og praktiskar royndir í góðum og friðarligum umhvørvi.

Í ástøðiliga partinum skal kandidaturin eygleiða undirvísing á egnum skúla og á øðrum skúlum, umleið 40 tímar. Hetta er ein sera mennandi gongd, har teir sleppa at uppliva, hvussu aðrir lærarar gera. Hetta má metast at vera ein styrki í núverandi skipan. Í mai mánaði skulu teir skriva eina uppgávu, sum skal verjast í juni. Uppgávan kann antin skrivast á føroyskum ella donskum. Eftir at hava lokið ástøðiliga partin, skal verkligi parturin takast.

## Tann verkligi parturin

Næstan uttan undantak eru kandidatar farnir til Danmarkar. Onkur einstakur er farin til Skotlands. Í Danmark skal kandidaturin undirvísa á einum gymnasialum skúla. Hann skal m.a. luttaka á námsfrøðiligum tiltøkum, lærararáðsfundum, toymisfundum og øðrum. Lærarin sleppur eisini at eygleiða undirvísing á danska skúlanum, áðrenn hann sjálvur skal undirvísa. Hetta tekur umleið 9 vikur. Hjá summum kann tað kennast møtimikið at skula undirvísa á fremmandum máli. Onkur kandidatur følir, at tað námsfrøðiliga verður køvt, tí at so stór orka verður løgd í umseting. Málið er týdningarmesta amboðið í allari námsfrøði. Hjá summum er lítil vinningur í verkliga partinum, tá ið ræður um námsfrøði.

Tá ið 5 vikur eru farnar, skal kandidaturin til eina miðskeiðis eftirmeting. Tá kemur umboð fyri danska Kenslumálaráðið at hyggja eftir og eftirmeta undirvísingina. Tá ið tær 9 vikurnar eru farnar, skal lærarin endaliga eygleiðast. Tá koma t.d. rektarin á skúlanum, vegleiðarar, toymissamskipari og ein uttanhýsis eygleiðari at meta um undirvísingina. Síðan fær hann eina endaliga eftirmeting. Í allari gongdini eru danskir vegleiðarar knýttir at námsfrøðiligu útbúgvingini hjá føroysku kandidatunum.

## Lærarar í føroyskum – einastu vegleiðarar í miðnámskúlaøkinum

Tað eru bert lærarar í føroyskum, ið kunnu taka námsfrøðiligu útbúgvingina í Føroyum. Hesir eru teir einastu, ið kunnu vera vegleiðarar hjá kandidatum, ið taka NÚ. Samstundis eru føroysklærarar teir einastu á miðnámi, ið kunnu mennast sum vegleiðarar. Tað er spell, at aðrir lærarar ikki fáa sama møguleika.

## Verkligi parturin í námsfrøði – 100.000 kr.

Tað er sera dýrt hjá MMR at senda ein lærara uttanlands í 9 vikur at taka verkliga partin. Meðan hann er burtur, fær hann sína løn, sum man liggja um 70.000 kr. Hann fær umleið 15.000 kr. fyri kost og uppihald. Skúlin skal finna avloysarar fyri kandidatin, og síðani koma aðrar útreiðslur. Í meðal „kostar“ ein kandidatur 100.000 kr.

## Hví ikki lata Fróðskaparsetur Føroya yvirtaka NÚ?

Fróðskaparsetur Føroya hevur starvsfólk, ið fakliga eru før fyri at taka sær av námsfrøðiligu útbúgvingini fyri miðnám. Námsvísindadeildin kundi staðið fyri útbúgvingini og lagt ein part út til skúlarnar. Við at taka tað besta úr núverandi NÚ og við at ment eina føroyskan skipan, kundu vit fingið eina útbúgving, sum er lagað til okkara samfelag. Vinnararnir høvdu verið Fróðskaparsetur Føroya, føroyska undirvísingarverkið, landskassin, skúlarnir og lærararnir.

# Um at skriva undirvísingartilfar

Pól Jespersen

Eg var heilt ungur, tá ið eg visti, at náttúruvísindi skuldu verða mítt øki. Tá visti eg kortini ikki, at undirvísing og tað at skriva undirvísingartilfar fór at fylla so nógv í mínum arbeiðslívi, men afturlítandi vil eg siga, at undirvísingin hevur verið ein stórur framíhjárættur, eitt privilegium, og skrivingin hevur verið bæði ein stór gleði og ein plága, tí hesin hugurin gevur tær so lítlan frið.

Eftir at hava lisið alisfrøði og støddfrøði var eg í pedagogikum í Danmark fyrra hálvár í 1979. Har hevði eg góðar vegleiðarar. Tað fall mær lætt at skriva, og tey eggjaðu mær til at gera egið undirvísingartilfar. Hetta var ein lærurík tíð.

## Hoydalar

Í august í 79 byrjaði eg so í lærarastarvi í Hoydølum. Eg treivst beinanvegin væl í leiklutinum sum lærari, men merkti skjótt, hvussu danskur skúlin var. Ikki bara vóru lærubøkurnar fyri tað mesta danskar – tað eru tær vist enn. Ein ikki lítil partur av lærarunum var tá danskmæltur. Tað var ikki nógv at siga til tað, tí vit vóru ikki før fyri at manna lærarastørvini við føroyskmæltum lærarum. At krevja, at danskir lærarar skuldu tosa føroyskt frá fyrsta degi, bar jú ikki til. Eg hugsaði við mær, hvussu skeivt hetta kendist, at føroyskir næmingar, sum nóg illa høvdu fingið málsligt fótafesti, skuldu verða noyddir at tosa danskt í tímunum og at læra alt nýtt gjøgnum danskt mál og donsk eygu. Av einhvørjari orsøk var henda kenslan sterkast, tá ið eg sat úti um landið sum próvdómari í próvtøkutíðini. Málsliga medvitið frá yngri árum, sum var viknað í útlegdini, mentist undir hesum umstøðum skjótt aftur, og tað, saman við royndunum frá pedagogikumtíðini, gjørdi, at eg fór at skriva egið undirvísingartilfar. Tað byrjaði í smáum við royndarvegleiðingum og notum um ymiskt.

## Farloyvi at skriva lærubók

Eg minnist, at onkrir vaksnir næmingar, sum eg hevði á kvøld-HF í fýrsunum, plagdu at gera vart við, at einki rúm var fyri føroyskum dømum. Støddfrøðibókin

var jú donsk. Eg fekk hug at gera nakað við hetta. Jákup í Gerðinum og Kjartan Danielsen høvdu frammanundan skrivað tilfar til málsligu deild, tað gav eisini mær dirvi. Endin var so, at eg søkti um farloyvi. Tá ið eitt ár var farið, vóru støddfrøðilærubók og uppgávubók klárar at taka í brúk. Í Føroyum er tað so, at tú fært ikki nógv afturljóð, tá ið tú fæst við slíkt arbeiði. Frá næmingunum fekk eg tó bara positivar afturmeldingar. Tey søgdu mær, hvussu frígerandi tað var at lesa lærugreinina á móðurmálinum. Fleiri søgdu mær eisini, at bókin var vælegnað til sjálvlestur. Tað dámdi mær væl at hoyra, tí hon var í fyrsta lagi ætlað HF-skeiðunum, sum tóku ímóti fleiri næmingum, sum ikki vóru í somu støðu sum tey, ið komu í studentaskúla beint úr framhaldsdeildini.

Frá myndugleikunum hoyrdist tó annað lag. Tað ljóðaði nakað soleiðis: „Nú, tá ið vit hava eina føroyska lærubók, noyðast vit at hava føroyskar próvtøkuuppgávur ...' Hvør skal siga, móðurmálið er bara ein byrða í føroysku miðnámsskúlunum – eitt haft um beinini. Tey orðini brendu seg føst í minnið. Á ein hátt skilji eg tó væl støðuna. Spurningarnir eru nógvir. Hvør skal røkja hetta? Og er tað sunt bara at hava eina bók? Hava vit ráð til fleiri? Vit eru jú so ørkymlandi fáment í Føroyum. Bókin varð annars nøkur ár seinni broytt og umskrivað og eftir tað eisini brúkt hjá málsligum í 1.g.

Gerandisdagurin sum lærari byrjaði aftur, men hugurin at skriva var einki minkaður. Tað endaði so við, at eg royndi at skriva, meðan eg undirvísti – tað vóru strævin ár. Men tað var eisini stuttligt og spennandi. Snorri Fjallsbak og eg skrivaðu t.d. tríggjar lærubøkur til alisfrøði. Vit vóru púra samdir um fakliga stigið. Okkara bøkur skuldu ikki vera fakliga lakari enn tær útlendsku, heldur tvørturímóti. Tað kom als ikki upp á tal at elta ta fakligu niðurlaðing, sum t.d. hevur sermerkt nógvar samsvarandi danskar lærubøkur í seinni árum. Serliga ernir vóru vit av triðju bókini „Mekanikki 2", sum vit mettu vera millum tað frægasta av sínum slagi í norðurlondum tá – tað var í 1996. Ætlanin var annars, at alisfrøðibøkurnar, sum vit mettu vera størstu avbjóðingina, skuldu vera fimm í tali. Eg kann enn harmast um, at vit ikki fullførdu tann setningin, men fyritreytirnar broyttust, Snorri fór t.d. í annað starv. Eg keddi meg tó ikki, tí tað vóru aðrar útgávur, sum eg arbeiddi við, t.d. Relativitetsástøðinum.

## Alisfrøði og evnafrøði til framhaldsdeildina

Í 1999 ringdi Niels Petersen á Skúlabókagrunninum til mín um alisfrøði og evnafrøði til framhaldsdeildina. Niels hevur umsitið flestu útgávurnar hjá mær. Hann hevur verið ein pressari, hevur torað at tikið djarvar avgerðir. Tað eigur hann mikið rós uppiborið fyri. Henda verkætlanin fevndi um til samans 9 bøkur og knappar 1300 síður, tá ið av tornaði. Tilfarið varð týtt og tillagað úr donskum, og eg legði so mítt afturat eftir besta førimuni. Talan var um eitt spennandi samstarv millum nógv fólk – t.d. teknaði Óli P. til bøkurnar; tað var ikki keðiligt. Hetta vóru fyrstu útgávurnar, ið eg hevði við at gera, sum fingu eina rættiliga prentlistarliga viðgerð. Tað var eg takksamur fyri. Í sambandi við eina lærubók til somu lærugrein í miðnámsskúlunum høvdu næmingarnir virknan leiklut – tey rættlósu tilfarið, sum varð skrivað og býtt út so hvørt. Tann dagin, tey fingu húgvuna á høvdið, fingu tey so hvør sítt eintak av prentaðu bókini.

Sum nevnt skalt tú ikki vænta at fáa stórvegis afturljóð, tá ið tú fæst við slíkt arbeiði í Føroyum. Nøkur ár eftir, at hesar bøkurnar vóru givnar út, spurdi eg tí ein lærara, sum brúkti tær, um hetta stríðið hevði verið ómakin vert. Hann svaraði mær soleiðis: „Tað skal eg siga tær so væl – nú hevur lærugreinin fingið eitt mál!“ Tað var ógvuliga hugaligt at hoyra. Og tað er hetta, sum er kjarnin í málinum, at fáa lærugreinunum føroyskan málburð. Royndirnar hjá mær hava annars verið tær somu sum hjá øðrum: At næmingarnir taka væl undir, og at tað eru lærararnir við øllum sínum útlendska viðføri, sum gremja seg.

## Málspurningar fylla nógv

Mínar royndir frá lærubókaskrivingini eru, at mál og málspurningar fylla nógv. Tú hevur eyðvitað skyldu at vanda tær um málið, tá ið tú fæst við slíkt arbeiði, men samstundis munnu hyggjuráðini vera ikki at fara ov langt frá vanligum talumáli, tí so vil brúkarin ikki kennast við úrslitið, og so er einki vunnið. Í 1980-árunum sýntist at vera ein vilji til at skapa eitt føroyskt fakmál á fleiri økjum. Soleiðis minnist eg hesa tíðina, men hvat hendi? Fróðskaparsetrið, sum natúrliga átti at gingið á odda í hesum arbeiði, tveitti líkasum frá sær. Soleiðis kendist tað ið hvussu er, og úrslitið var, at einsamallar eldsálir sótu hvør í sínum lagi og stríddust við málspurningarnar.

Nú er so eitt málráð eftir ynski løgtingsins farið til verka. Eg vóni, at málráðið fer at taka avgerðir, sum vit øll kunnu standa saman um. Tíverri hava vit longu nú sæð, hvussu einstaklingar royna at órógva arbeiðið í ráðnum. Tað er stórt spell. Okkara fámenta fólk dugir ikki bara illa at standa saman, tað hevur eisini ilt við at góðtaka ásetingar hjá myndugleikunum. Vónandi letur ráðið seg ikki taka av fótum, og vónandi megnar tað hóast ágangin at savna fólkið um eina felags málpolitiska stevnu.

Fakfólk eiga sjálvandi at leggja seg eftir at duga sítt fakmál, sama um tey eru handverkarar, miðlafólk ella lærarar. Tað málsliga eigur at vera ein sjálvsagdur partur av fakliga stoltleikanum. Hjá lærarum hevur førleikin at duga at skriva harumframt stóran týdning. Tað hevur eitt langt læraralív lært meg.

# Viðtal við Dorit Hansen – ritstjóra á Námi

Tórður Johannesarson

**Dorit hevur starvast sum ritstjóri í Námi síðani 2008 (tá Føroya Skúlabókagrunnur). Sum ritstjóri samskipar hon ávísar útgávur. Hon hevur fyri tað mesta arbeitt við lærugreinunum føroyskt og enskt. Umframt hetta ritstjórnararbeiði ger hon eisini ymiskar samskiftisuppgávur í Námi.**

**Hvussu stór er játtanin til lærutilfar á miðnámi, og hvussu nógvar bøkur (pappír og net) kunnu gevast út um árið?**
Játtanin til Nám er fyri 2013 11,7 milliónir kr. Harumframt er søla á uml. 7 milliónir kr., men av søluni fer nógv til at fíggja útreiðslur tengdar beinleiðis at framleiðsluni – prent, høvundalønir, grafikarar, goymsluleiga, avgreiðsla o.s.fr. So statt er nettovinningurin uml. 10%, og tá eru ritstjóralønir ikki taldar við.

Skipanarliga verður ikki ávísur partur av játtanini oyramerktur til miðnám. So statt er talið á bókum ójavnt og hongur saman við, hvussu stórt virksemið er á júst tí økinum ta ávísu tíðina, men hyggja vit at teimum seinastu tveimum árunum, eru á leið tvey ársverk innanhýsis í Námi farin til miðnám og útgávur har.

**Hvussu nógv fær ein týðari fyri at týða eina læribók til miðnám (bókin er umleið 300 s.)?**
Tað er rættiliga tørført at meta um – men 75.000 – 100.000,- kr. Tað veldst, um talan er um reguleran tekst á 300 síður, ella hvussu tað heila hongur saman. So upphæddin kann eisini vera lægri.

**Fáa tit javnan fyrispurningar frá lærarum um at gera ella týða bøkur til miðnám?**
Nei!

**Hvussu nógvar lærubøkur til miðnám eru í gerð í løtuni?**
Beint nú er rættiliga nógv virksemi til miðnámið, tí nýtt undirvísingartilfar er í gerð í føroyskum til C-stig og hetta tilfar verður eisini givið út til B- og A-stig. Júst útkomin er Fysiologi, og harumframt er tilfar ávegis í støddfrøði. Í fjør kom s-bók út til enskt C-stig, og í fyrra árið kom „Rúmdin“ út. Eisini er Føroysk bókmentasøga 2 í gerð.

**Hvussu er samstarvið við Systime?**
Samstarvið er grundað á, at Nám fær atgongd til undirstøðukervið hjá Systime. Uttan hetta samstarv høvdu vit ikki kunnað givið s-bøkur út, tí at vit hava hvørki fígging ella tíð til at menna okkara egna undirstøðukervi (plattform) til s-bøkur. Fyrimunurin er, at tað er ikki neyðugt hjá Námi at menna alt hetta undirstøðukervið frá grundini. Tað hava vit ikki fígging til og enn minni tíð til. Harumframt er avtalan, at Nám hevur atgongd til alt tilfar, sum Systime hevur givið út á danska marknaðinum. So statt standa allar útgávur hjá Systime okkum í boði at týða og laga til føroysk viðurskifti, umframt at vit kunnu skriva upprunaføroyskt tilfar inn í undirstøðukervið, so sum gjørt verður til føroyskt á miðnámi. Dømi um týdda útgávu er „From where you are“.

# Eru føroyskar skúlabøkur dýrar at gera?

Olav Absalonsen

Ofta verður ført fram, at tað loysir seg ikki at skriva føroyskt undirvísingartilfar, tí at marknaðurin er so lítil, at tað er ómøguligt at fáa tað at hanga saman búskaparliga. Hetta er ein meting, ið er vinnubúskaparlig, og tað er eyðvitað lætt at seta eitt roknistykki upp, ið vísir, at tað loysir seg ikki út frá vinnubúskaparligum áhugamálum: Bókin verður seld í so fáum eintøkum, at tað vigar ikki upp ímóti tí, sum tað kostar at gera hana, ella skal hon seljast so dýrt, at eingin keypir hana, og er hetta tí ein ómøgulig verkætlan.

Men um vit víðka sjónarringin nakað, soleiðis at vit síggja út um tað vinnubúskaparliga, kann hugsast, at niðurstøðan verður ein onnur. Skúlar eru ein samfelagsuppgáva, sum vit hava valt at brúka nógvan pening til. Landskassin brúkar umleið 850 milliónir um árið til útbúgving og gransking. Tað kostar einki at ganga í skúla í Føroyum, og tað er ein politikkur, ið byggir á ta hugsjón, at tað loysir seg at brúka pening til hetta, tí vit mugu hava útbúgvið fólk til allar uppgávur bæði á sjógvi og landi, um samfelagið skal virka í longdini. Nyttan av útbúgving er at tryggja ein høgan livifót í longdini.

## Viðkomandi tilfar

Í hesum sambandi slepst illa undan at taka støðu til, um vit skulu hava føroyskt undirvísingartilfar í Føroyum, og kanska er spurningurin tá, um vit yvirhøvur hava ráð til ikki at gera nógv meiri av føroyskum tilfari, enn vit gera í dag. Føroyskar lærubøkur hava tann fyrimun, at tær eru skrivaðar á føroyskum til føroyingar. Tær útlendsku hinvegin eru vanliga skrivaðar til útlendingar og taka støði í einum fremmandum samfelag, sum flestu føroyingar hava ilt við at kenna seg aftur í. Ein, sum gekk á skipsføraraskúla fyri nógvum árum síðani, fortaldi hesa søgu:

Teir flestu í flokkinum høvdu siglt sum fiskimenn í mong ár. Eitt fak á skúlanum var Virkisbúskapur, og bókin, sum var donsk, byrjaði við setninginum:

*Gitte Hansen åbner en modebutik på Strøget i København …*

Teir fingu sær ein bíligan látur. Men hetta lýsir støðuna hjá føroyska skúlaverkinum í eini øðuskel. Bókin byrjar við onkrum, sum málbólkurin skal kenna seg aftur í, fyri at tað skal vekja áhuga fyri fakinum, men skotið fer langt við síðuna av. Her skal tó nevnast, at á eingilskum finnast lærubøkur, ið eru skrivaðar til ein breiðan málbólk, tí at bókin er ætlað at verða nýtt í nógvum londum, men hetta er vanliga til hægri útbúgvingar. Í eingilskt mæltum londum eru lærubøkur ein týðandi útflutningsvøra. Á permuni stendur ofta 'International version'.

## Nyttuvirði

Tá ið vit tosa um, hvat loysir seg, er sostatt umráðandi at taka nyttuvirði av føroyskum tilfari við. Um vit venda eyguni móti kostnaðarsíðuni, so kostar tað at gera eina bók. Rithøvundarnir skulu hava løn, so kemur rættlestur, sniðgeving, perma, myndir, umbróting, prentumsiting og annað. Men alt arbeiðið er í landinum, og vit halda lív í fleiri virðismiklum fakum. Lærubókarithøvundar eru ofta lærarar, sum vita og hava eina meining um, hvussu ein lærubók skal leggjast til rættis. Fakliga er hetta sera mennandi, og tað er gott fyri skúlan og fyri samfelagið.

Í pengarenslinum (búskaparligu ringrásini) fara pengarnir av einari føroyskari bókaútgávu úr einum búskaparligum geira í annan. Um Nám gevur bókina út og fíggjar hana, fara pengarnir í fyrstu atløgu úr Landskassanum sum løn og gjald til fyritøkuna, ið ger bókina, sum aftur rindar starvsfólkum sínum løn. Øll hesi gjalda skatt av innkomuni og avgjald, tá ið pengarnir verða brúktir; hesin partur kemur innaftur í landskassan. Tá ið næmingarnir keypa bókina, kemur nakað innaftur tann vegin. Beinleiðis innflutningur er næstan eingin. Fyri at tryggja nyttuna av føroyskum skúlabókum átti søluprísurin at verið hildin lágur, tí tað kostar samfelagnum einki; tað er bara eitt gjald frá húsarhaldum til forlagið, og lægri prísurin er, fleiri fáa nyttu av bókini.

Men velja vit í staðin at keypa útlendskar lærubøkur, fara allir pengarnir

beinleiðis av landinum. Vit missa ikki bara tað. Evnarík fólk í landinum sleppa ikki at menna síni evni at skriva ella gera annað arbeiði, ið hoyrir til eina bókaútgávu, og næmingarnir fáa ikki bøkur, sum eru skrivaðar til teir.

## Hugsjónarbroyting

Eitt, ið vit skulu leggja til merkis, er, at útlendskar lærubøkur kunnu vera sera dýrar, tí útlendsku forløgini vita, at tað er lærarin, sum ger av, hvørja bók næmingarnir skulu brúka, og tá ið tann avgerðin er tikin, eru næmingarnir noyddir at keypa. Tá ið tann, sum tekur avgerðina, ikki skal gjalda, er hetta ein møguleiki hjá vinnurekandi forløgum at vinna pening. Í marknaðarførsluni fara forløgini eisini eftir at ávirka læraran og egna tey millum annað við vegleiðandi loysnum til allar uppgávur fyri at appellera til letina, sum liggur í okkum øllum.

Eitt annað, sum útlendsk forløg brúka, er at hava nógv aktuell dømi í bókini, og tað er eisini ein eyka tænasta, tí so skal lærarin sleppa undan at finna dømi sjálvur, og hann kann í frið og náðum undirvísa eftir bók, men samstundis blívur bókin skjótt for gomul. Tað passar forløgunum væl, tí so kunnu bøkurnar ikki brúkast aftur, og tey kunnu gera nýggjar útgávur annað hvørt ár, og tað tryggjar framhaldandi virksemi.

Tá hava føroysku bøkurnar eina heilt aðra visjón, og endamálið er ikki at vinna pening, men at útvega málrættað og væl egnað undirvísingartilfar, sum hevur varandi nýtsluvirði, tí at tey aktuellu dømini fylla nógv minni. Um tey skuldu við, so hevði bókin longu verið for gomul, áðrenn hon kemur út. Hugskotið er, at bókin verður supplerað við øðrum tilfari, sum lærarin finnur ella ger. Í búskapi, handilsskapi og øðrum samfelagsligum lærugreinum er neyðugt at fylgja við í samfelagnum, og tí er ein føroysk lærubók í tílíkum lærugreinum einans ein grundbók, og annað tilfar skal til.

Fyri 12 árum síðani yvirtók Landsstýrið undirvísingarmál, ið ikki framman-undan vóru á føroyskum hondum – millum onnur handilsskúlan og tekniska skúlan. Formliga hevur hetta havt ta broyting við sær, at allar lógir, kunngerðir, rundskriv og námsætlanir verða gjørd í Føroyum. Hetta skuldi havt við sær, at skúlin bleiv meira føroyskur enn frammanundan. Men fyri tey, sum hava fylgt nakað við, er syrgiligt at staðfesta, at so hevur ikki verið, tí tað er freistandi

at laga føroyskar námsætlanir neyvt eftir teimum donsku fyri at kunna brúka danskar lærubøkur. Henda gongd er ikki mennandi fyri føroyskar útbúgvingar – hvørki fakliga ella námsfrøðiliga, og hon tænir ikki næmingunum – og samfelagnum enn minni.

Hugsjónin má vera at gera og útvega meiri av føroyskum undirvísingartilfari, tí tað er ein fyritreyt fyri dygd í læring og undirvísing. Kostnaðurin er eingin forðing, tí føroyskt undirvísingartilfar kostar í veruleikanum einki.

# Næstan 80% av lærutilfarinum í føroysku miðnámsskúlunum er danskt

Tórður Johannesarson

| | |
|---|---|
| Føroyskt lærutilfar | 21,5% |
| Danskt lærutilfar | 78,0% |
| Eingilskt lærutilfar | 0,5% |
| Tilsamans | 100,0% |




**Á vári í 2014 gjørdi eg eina kanning, ið sýndi, hvussu nógv av lærutilfarinum á Føroya Handilsskúla var á móðurmálinum. Eg kannaði allar pensumlistar á skúlanum, sum vórðu latnir MMR í 2011. Kanningini vísti, at meginparturin av tilfarinum var á donskum máli.**

## Avmarking

Í november søkti eg MMR um at fáa innlit í pensumlistar, ið vórðu latnir inn fyri 2012. Eg legði dent á at kanna hesar lærugreinir: alis- og evnafrøði, altjóða búskapur, landalæra, samfelagsfrøði (samfelagslæra), sølubúskapur (marknaðarføring), støddfrøði, søga (samtíðarsøga) og virkisbúskapur. Allar hesar lærugreinir eru á A-, B- og C-stigi.

Eg valdi hesar lærugreinir, tí at tær geva eina heildarmynd av samlaðu støðuni. Eg valdi ikki at taka málsligu lærugreinirnar við. Um vit t.d. taka føroyskt, so er lærutilfarið næstan 100% føroyskt. Í donskum man næstan alt tilfarið vera á donskum. Sigast skal, at í onkrum mállærugreinum verður føroyskt tilfar brúkt; men alt hetta tilsamans man neyvan broyta heildarmyndina.

## Hví er so lítið av lærutilfarinum á føroyskum á miðnámsskúlunum?

Tað kunnu vera tvær høvuðsorsakir, at so nógv av lærutilfarinum er danskt. Tann fyrra man vera, at so fáar lærubøkur eru á móðurmálinum. Tann seinna man vera, at lærarar eru ov afturhaldsinnaðir.

## Fremmandagerð

At so stórur partur av lærutilfarinum er á donskum, ger, at okkara miðnámsskúlanæmingar fáa gott innlit í donsk viðurskifti.

Tann málsliga støðan krevur ómetaliga nógv av lærarunum, tí at teir skulu umseta alt úr donskum til føroyskt. Næmingarnir eru í somu støðu. Tað hevði verið nógv léttari, um vit høvdu lærutilfarið á føroyskum og við føroyskum dømum; tá kundu næmingar sloppið undan fremmandagerð. Í lærugreinini støddfrøði eru t.d. bert 15% av tilfarinum føroyskt. Tað kann hugsast, at um lærutilfarið var á føroyskum, so kundi verið léttari at fingið næmingarnar t.d. at skilja støddfrøði?

Vit læra okkara næmingar væl og virðiliga um Danmark og donsk viðurskifti á miðnámsskúlunum, t.e. at sjónarhornið á føroyskum miðnámsskúlunum er danskt. Í løtuni verður nógv tosað um fráflyting. Tað kann hugsast, at miðnámsskúlarnir í Føroyum eru við til at geva okkara næmingunum eina fatan av, at Danmark og danskt er heimligt. Teir verða gjørdir fremmandir fyri øllum føroyskum. Vit ala teir kanska upp til eina komandi tilveru í Danmark?

## Hvat kunnu vit gera?

Vit mugu øll taka ábyrgd av støðuni, líka frá politiska myndugleikanum til hvønn einstakan lærara. Vit mugu fáa eina hugburðarbroyting. Tað hevði verið eitt frambrot, um politiski myndugleikin hjálpti. Hetta kann gerast við at játta meiri pening til skúlabøkur, t.d. at geva lærarum møguleika at fara í farloyvi, so teir kunnu gera lærutilfar á føroyskum. Eitt annað hugskot kundi verið, at skúlaleiðslurnar hjálptu til við at eggja lærarum at gera og brúka føroyskt lærutilfar.

Bæði yrkisfeløgini hjá miðnámsskúlalærarum kundu í komandi sáttmálum

lagt dent á lærutilfar til miðnámsskúlar. Vit miðnámsskúlalærarar mugu eisini fara í gongd at gera tilfar. Vit kunnu síggja hetta sum part av okkara persónligu og fakligu menning. Um vit skipaðu okkum í toymi og fóru í gongd við at gera tilfar í felag, so er skjótt komið á mál. Tað snýr í ein mun um at samskipa og at hava rætta hugburðin.

Nógvir lærarar á miðnámsskúlunum hava lyndi til at vera atfinningarsamir mótvegis føroyskum lærutilfari. Vit hoyra onkuntíð miðnámsskúlalærarar tosa um, at teir ikki vilja brúka føroyskt lærutilfar, tí at næmingarnir ikki skilja hesi og hasi orðini, sum eru „so føroysk". Tað er spell, at teir við hesi grundgeving ikki vilja brúka eina heila læribók. Nøkur fá nýggjyrði kunnu neyvan gera tann stóra skaðan móti eini heilari bók á einum fremmandum máli?

# Støddfrøði á føroyskum

Tórður Johannesarson

Í januar 2014 kannaði eg føroyskt lærutilfar í føroysku miðnámsskúlunum skúlaárið 2012-13. Eg las pensumlistar, sum lærarar sendu Mentamálaráðnum í 2013. Kanningin vísti, at bert 20 % av frálærutilfarinum á miðnámsskúlunum var á føroyskum. Í støddfrøði var støðan henda:

1. á C-stigi vóru 37 % av tilfarinum á føroyskum,
2. á A- og B-stigi vóru 0,5 % av tilfarinum á føroyskum.

## Støddfrøði á C-stigi

Vit kunnu spyrja, hví ikki meiri føroyskt er á C-stigi. Helst eru fleiri orsøkir. Tann størsta man vera vantandi tilfar, tó at tilfar er til. Í 1990 kom bókin „Støddfrøði til HF-felagslærugrein" eftir Pól Jespersen. Áðrenn bókin kom, var lítið og einki støddfrøðitilfar til miðnám – bert slíkt óprentað, sum lærarar nýttu hvør í sínum lagi. Pól skrivar soleiðis í formælinum til bókina um, hví hon bleiv til:

> *„Í formæli til Alisfrøði, sum H.D. Joensen gav út í 1969, sigur hesin djarvi undangongumaður seg longu heilt frá skúlaárum at hava havt meira enn ein varhuga av, at henda lærugrein, sum honum dámdi so væl, og sum hann fullvæl skilti var fyritreytin fyri øllum framburði, var vísindagreinin, sum alt tøkni hongur uppií, helst fór at verða ein tann størsti vandin fyri móðurmálið.*
>
> *Undirritaði hevur mangan sannað hesi orð, bæði sum næmingur og seinni sum lærari í støddfrøði og alisfrøði. Sterkast man henda kenslan hava verið, tá ið eg sum próvdómari havi sitið kring landið í próvtøkutíðini og hoyrt næmingar í hesum báðum lærugreinum bera fram hetta løgna ryggbrotna málið, sum ikki er nakað mál, og ið hvussu so er ikki er næminganna egna mál.*

*Málmenning tekur tíð, og skulu vit gera okkum vónir um at menna málið í hesum lærugreinum, er fyrsta stigið yvirhøvur at veita føroyskum innivist í lærubókunum. At nýta føroysk dømi og eitt nøkulunda liðiligt føroyskt mál, sum næmingarnir vilja kennast við, um enn tað so ikki er fullment, har sum vit annars hava nýtt fremmand dømi og fremmant mál.“*

Bókin hjá Póli er ætlað næmingum á C-stigi. Hyggja vit í verkið, so er málið ómetaliga gott. Einki uppgjørt ella tilgjørt, setningarnir sita væl. Bókin ger støddfrøðina til tað, sum støddfrøðin eigur at vera – eitt amboð í gerandisdegnum. Námsfrøðiliga er bókin ómetaliga góð, framsetingin og dømini passa væl til støðið. Samstundis er hon akademisk.

Ein onnur góð bók er handbókin hjá Mortani Dalsgarð og Edvardi Olsen. Hendan bókin verður eisini brúkt á C-stigi á miðnámi. Hon er væl skrivað og er námsfrøðiliga góð.

Í støddfrøði á C-stigi er kunngerðin á føroyskum. Tá ið næmingur fer til roynd, eru uppgávurnar eisini á føroyskum, men frálærutilfarið, sum hann brúkar alt árið, er tíðum danskt. Vit plaga at siga, at próvtøkan skal endurspegla dagligu frálæruna, men so var ikki í støddfrøði C skúlaárið 2012-13. Tveir triðingar av næmingunum fingu frálæru við donskum tilfari. Til próvtøkuna fingu hesir mongu næmingar tískil ikki somu møguleikar sum teir, ið brúktu føroyskt tilfar.

## Støddfrøði á A- og B-stigi

Næmingar, ið tóku støddfrøði á A- og B-stigi í miðnámi í 2012-13, brúktu danskt frálærutilfar burturav, 99,5 %. Tað kemst allarmest av, at einki føroyskt tilfar er. Vit kunnu argandi siga, at á A- og B-stigi speglar frálæran próvtøkurnar, tí tær eru eisini á donskum.

Í 2013 kom nýggja breytaskipanin. Samstundis fingu vit nýggjar námsætlanir fyri støddfrøði A og B. Hetta var stórt framstig, og nú skuldi ein hildið, at Mentamálaráðið fór undir at gera uppgávur á føroyskum, men so tykist ikki at vera. Støddfrøðilærarar siga, at Mentamálaráðið hevur ikki pening til føroyskt, og tískil er heldur eingin nevnd at gera uppgávurnar. Var tað, so kundi nevndin so við og við fingið móðurmálið inn í lærugreinina og eggjað høvundum til at gera føroyskt tilfar.

Við ikki at raðfesta føroyskt, menna vit heldur ikki støddfrøði sum lærugrein, hvørki fakliga ella málsliga. Vit velja heldur at lata danir gera danskar uppgávur fyri okkum. Tað kann ikki vera rætt.

Summi føra fram sum próvgrund, at føroyskir næmingar eru so kringir í donskum, at tað ger ikki mun. Men munnu næmingarnir skilja so væl danskt, tá ið ræður um fakheiti og annað í samband við støddfrøði? Eg ivist. Vit mugu minnast til, at teir hava brúkt føroyskt tilfar allan fólkaskúlan, tí í fólkaskúlanum raðfestir myndugleikin støddfrøði frammarlaga. Føroyskt tilfar er tøkt frá 1. til 9. flokk. Á fólkaskúlastigi verður støddfrøðimál dyrkað. Til dømis er ein støddfrøði-handbók, sum eisini kann brúkast á miðnámi.

Bert 37 % av næmingunum, ið komu á miðnám í 2012, brúktu føroyskt tilfar, og í støddfrøði á B- og A-stigi er málið púra danskt. Hevur myndugleikin hugsað um, at danskt nú er vallærugrein, sum bert lítil partur av føroysku miðnámsskúlanæmingunum velur? Neyvan. Tí kunnu vit komandi árini vænta, at førleikin hjá næmingum at skilja danskt fer at minka. Samstundis verður verri og verri hjá lærarum í støddfrøði at brúka danskt tilfar á miðnámi.

## Tilmæli

Á føroysku miðnámsskúlunum gingu sambært heimasíðuni hjá Studna 2.388 næmingar í 2012/13. Flestu teirra skulu hava støddfrøði. Sostatt er stórur marknaður fyri skúlabókum.

Tað eru fleiri møguleikar at gera støddfrøðitilfar á føroyskum. Ein er, at myndugleikin játtar pening, so fólk sleppa at gera lærubøkur. Ein annar er, at Nám heitir á onkran at týða eina bók til føroyskt.

Vil myndugleikin ikki raðfesta móðurmálið í støddfrøði á miðnámsstigi, so kunnu støddfrøðilærarar taka seg saman í toymi og gera tilfar. Talið á støddfrøðilærarum í føroyskum miðmámsskúlum er sambært heimasíðum umleið 35. Í bókini hjá Póli Jespersen eru umleið 400 roknistykki, so um hvør lærari ger um 10 stykkir, er komið á mál.

Best man tó vera, at ein blaðstjórn ger arbeiðið. Eitt umboð fyri hvønn skúla kann sita í slíkari stjórn. Tá fær hvør skúli eigaraskap í bókini, og tað skuldi verið lætt at fingið næmingar at keypt bøkurnar. Tað kundu verið bæði S-bøkur og pappírsbøkur. Stóri vansin við slíkum er, at tær verða kopieraðar. Um

ritstjórnin t.d. gjørdi broytingar annað hvørt ár, so er aftur ein nýggjur skari av keyparum.

## Støddfrøðin og framtíðin

Pól Jespersen royndi í 1990 at dyrka eitt mállendi við at geva út eina bók í støddfrøði. Í bókini „Støddfrøði til HF-felagslærugrein" vísir hann, at tað ber til at brúka føroyskt á hesum týðandi øki. Nú í eina tíð hevur tað ligið í órøkt á miðnámsstigi. Skal tað eydnast at varðveita og menna málið í støddfrøði, mugu støddfrøðilærarar brúka málið í frálæruni. Tað er spell, um vit ikki unna okkara unga ættarliði lærubøkur í einari av týdningarmestu lærugreinunum í miðnámsskúlunum.

# Søgubrot um YF

Jákup í Gerðinum

**Jákup í Gerðinum er føddur 1936 úti í Gerðinum í Vestmanna, byrjaði á VBV 1951, preliminerprógv 1953, studentur 1955, sivilverkfrøðingur 1962, arbeiddi á København Belysningsvæsen 1962-64, lærari í Hoydølum 1964-88. Fyrisitari hjá Føroya Handverksmeistarafelag 1988-99. Síðan tá eftirløntur.**

Tórður Johannesarson hevur biðið meg skriva eina grein til Miðnámsrit um YF við denti á denti á tey fyrstu árini. **Herðingar** í endurgivnum tekstum eru mínar. Yrkisfelag studentaskúla- og hf-lærara (YF) varð stovnað 5. apríl 1982. Frammanundan høvdu flestu lærararnir verið limir í Gymnasieskolernes Lærerforening (GL). Sáttmálasettu lærararnir vórðu løntir eftir sáttmála millum GL og Finansministeriet. Tænastumenn fingu yvirtíðarløn, samsýningar og niðursett tímatal eftir GL-sáttmála.

Áðrenn eg fari at greiða frá, hví vit tóku okkum úr GL og stovnaðu YF, haldi eg tað vera hóskandi at nema eitt sindur við lønarviðurskiftini hjá lærarunum fyri 1961, tí hesi hava vist ongantíð áður verið umrødd alment. Petur Martin Rasmussen hevur trivið í studentaskúlasøguna í ársfrágreiðingi frá 1964, men sum hann skrivar: *... so gjørdist hetta meira søgan um studentaskúlamálið enn um sjálvan skúlan*. Í 50 ára minningarritinum frá 1987, sum Jógvan Jespersen legði til rættis, verður heldur ikki komið inn á lønarviðurskiftini. Bæði Petur Martin og Jógvan skriva um tey trongu hølisviðurskiftini. Her kann til stuttleikar skoytast uppí, at Th. Nygaard og Chr. Haraldsen hava verið í Sandavági og hugt at militerhospitalinum, og í brævi dagf. 5. juli 1944[1)] skriva teir til kommunustýrini í Vágum um sína áskoðan at nýta militerhospitalið til studentaskúla.

## Árini 1937-59

Frá hesum tíðarskeiðnum havi eg funnið ymist tilfar í kjallaranum á Studentaskúlanum í Hoydølum um lønarviðurskiftini. Eg haldi tey vera so mikið áhugaverd, at nøkur av teimum verða endurgivin í heilum líki. Sama kann

sigast um skjøl, sum liggja í landsstýrinum. Á Landsskjalasavninum er einki funnið (enn).

Í brævi frá 15. juli 1937 til *Undervisningsinspektøren for Gymnasieskolerne* Dr. Højberg Christensen [2)] greiðir Th. Nygaard frá ætlanini um studenta- og preliminerkeið. Og á ólavsøku í 1937 handar Th. Nygaard løgtingsins vinnunevnd *Uppskot til tvey ára studentaskeið*[3)]. Hesi bæði skrivini eru sjálvandi rættiliga lík. Skeiðið byrjar við einum nýmálsligum fyrsta flokki og einum fyrsta árs fyrireikingarflokki (preliminerflokkur). Flokkarnir hava 32 undirvísingartímar hvør um vikuna ella tilsamans 64 tímar.

Tað er søguliga áhugavert at síggja, hvussu nógv lærararnir tóku á seg fyri at fáa tímatalvuna at ganga upp, tá ið studentaskúlin byrjaði 1. september í 1937. Teir 64 tímarnir vórðu býttir út á lærararnar soleiðis: Erik Petersen, sum var cand. mag. í donskum og musikki, skuldi undirvísa í donskum, føroyskum, geografi, natúrufrøði, natúrulæru, rokning og matematikk í tilsamans 24 tímar um vikuma. Chr. Haraldsen, sum var cand. mag. í fronskum og týskum, skuldi undirvísa í týskum, fronskum, søgu, fornaldarfrøði og føroyskum í tilsamans 24 tímar. Th. Nygaard, sum var cand. mag í enskum og týskum, skuldi undirvísa í enskum í tilsamans 10 tímar. Chr. Lützen, yvirlærari, undirvísti í 2 tímar í matematikk, og Jacob Dahl, próstur, undirvísti 4 tímar í latíni. Bæði Nygaard og Haraldsen høvdu prógv frá Føroya Læraraskúla, áðrenn teir fóru niður at lesa.

Um lærararlønirnar stendur í uppskotinum:

> *Av lærarunum fáa Kr. Haraldsen og Erik Petersen, sum einki annað arbeiði hava, hvør 300 kr. um mánaðin við plikt til at undirvísa í 24 tímar um vikuna; fyri yvirtímar verður goldið 4 kr. fyri hvønn undirvístan tíma. Hinir lærarnir fáa 4 kr. fyri hvønn undirvísingartíma. Fyristøðumaðurin fær 500 kr. um árið.*

Th. Nygaard var framvegis lærari við realskúlan í Havn, og tí fekk hann tímaløn fyri at undirvísa 10 tímar um vikuna. Hugtøk sum skyldugt tímatal og niðursett tímatal fyri at rætta skrivligar uppgávur tykjast ikki at vera til í 1937 og heldur ikki nøkur ár seinni. Og lærararnir hava heldur onga eftirlønarskipan. Í 1938

koma Bergstedt (mat-fys) og Ladegaard Pedersen (søga, latín) á skúlan og verða her til eftir kríggið.

Nygaard sendir løgtinginum eina *Frágreiðing um yrki studentaskúlans* á hvørjum ári. Í september 1939[4)] skrivar hann m.a.: ...*Í mai og juni 1939 varð hildin eksamia fyri fyrstu ferð. Tríggir censorar komu niðri frá. Úrslitið var, at allir næmingarnir, sum vóru innstillaðir, fingu prógv*. So nevnir hann nøvn og úrslit og heldur fram: *Úrslitið má soleiðis sigast at vera rættuliga gott samanborið við úrslitini á øðrum studentaskeiðum*. Tað gekk soleiðis bara væl, hóast leikmenn undirvístu næmingunum í ávísum lærugreinum.

Í kladdu til skúlans fíggjarætlan fyri 1940-41[5)] sæst, at fasta lønin er 345 krónur mánaðarliga fyri at undirvísa 29 tímar um vikuna. Yvirtíðarlønin er nú 10 kr. um mánaðin fyri hvønn yvirtíma. Fyristøðumaður (Th. Nygaard) undirvísir 21 tímar um vikuna fyri 260 krónur mánaðarliga. Harafturat fær hann 500 kr. árliga fyri at vera fyristøðumaður. Tað er ilt at síggja nakað ávíst lutfall millum tímar og lønir hesi árini. Tað kann hugsast, at lærararnir fáa eina mánaðarløn sum líkist lønini, sum lærararnir við realskúlan og læraraskúlan fáa. Vit vita, at skúlin fór í gongd uttan nakra løgtingssamtykt og uttan nakra peningajáttan. Edward Mitens, sum var formaður í Vinnunevdini, tók persónliga ábyrgdina av hesum, eisini ta fíggjarligu. Tað er tí ikki so løgið, at heldur eingin greið lønaravtalað var í 1937.

Sum flest øllum kunnugt, rindaðu næmingarnir 20 krónur um mánaðin fyri skúlagongdina. Hetta munaði rættiliga væl – yvir 20% – fyrstu árini. Løgtingið tók ikki skúlapeningin av fyrr enn 1. apríl 1955. Aðrar inntøkur hjá studentaskúlanum vóru 1000 kr. frá Havnar býráð, og tilskotið frá statinum var um 400 kr. fyri hvønn studentaskúlanæming og um 140 kr. fyri hvønn preliminarist. Tað skal tó viðmerkjast, at ómúgvandi næmingar fingu skúlapeningin aftur sum studning frá løgtinginum/landsstýrinum. Eg haldi meg minnast, at eg fekk 400 kr. árliga, meðan eg gekk á VBV.

Í einum brævi dagf. 25.01.1961[6)] frá Studentaskúlanum til Undervisningministeriet skrivar Haraldsen soleiðis um Lærernes lønforhold:

*Efter at kursus´ lærere i nogle år havde været lønnet efter overenskomst, vedtog Lagtinget i 1941, at lærerne ved kursus skulle lønnes efter samme regler, som gælder for danske gymnasielærere. Denne ordning blev fulgt til 1958.*

Eg veit ikki, hvat ið hetta er fyri sáttmáli (overenskomst), sum lærararnir skulu hava verið løntir eftir 1937-41, og í Løgtingstíðindunum fyri 1937-40 stendur einki um, hvussu lærararnir við studentaskúlan skulu lønast. Í teimum brøvum, sum Nygaard sendir løgtinginum í 1940 og 1941, og sum eru endurgivin niðanfyri, bendir alt á, at lønarviðurskiftini eru ógreið.

Í eini kladdu til *Frágreiðing um yrki studentaskúlans* í skúlaárinum 1939-40 frá 31.08.1940[7)], skrivar Nygaard millum annað:

> *Eg loyvi mær upp í hesa frágreiðing at skoyta eina umsókn frá øllum lærarunum við skeiðið um eitt dýrtíðartillegg, eins og aðrir, ið eru í løgtingsins ella statins tænastu fáa tað. Framvegis loyva vit lærarar okkum at søkja tingið um, at okkara ansetilsis- og lønarviðurskifti* ***verða skipað á einum tryggari grundarlagi enn higartil****, soleiðis at vit kunna vera eins væl stillaðir og lærarar við statsskúlarnar viðvíkjandi ancienniteti, pensión o.ø.. Summir av okkum hava longu virkað við skúlan í 3 ár og áttu soleiðis eftir vanligum lønarreglum at fingið okkara fyrstu lønhækkan.*

Nygaard loyvir sær síðan at nema við sína egnu støðu, tí hann torir ikki at sleppa undirvísingini við realskúlan, tí støðan við studentaskúlan er so ótrygg. Hann endar frágreiðingina soleiðis:

> *Nú sær ikki út til nakra broytan brádliga, og noyðist eg tí at biðja løgtingið um, so skjótt sum tað ber til, annaðhvørt at loysa meg frá studentaskúlanum, ella at tryggja mína støðu soleiðis, at eg kann siga plássið við realskúlan frá mær uttan at líða nakran vansa.*

Sambært eini ódagfestari kladdu[8)], men sum má vera frá aug. 1941 skrivar Nygaard – heldur speiskliga – aftur til løgtingið um lønarviðurskiftini:

> *Fyri einum ári síðani søkti eg vegna allar lærararnar við studentaskeiðið løgtingið um, at okkara løn- og ansetilsisviðurskiftir vórðu umskipað soleiðis, at vit kundu vera* ***eins væl stillaðir*** *og lærarar við statsskúlarnar. Úrslitið av hesi umsókn, sum var okkum kunngjørt, eftir at løgtingssetan var endað, var ein skipan, sum, tó at hon í ymsum førum merkir eitt framstig, als ikki er eftir okkara tykki. Eg loyvi mær tí at søkja tingið um, at henda sak verður tikin uppaftur til nýggja viðgerð í hesi tingsetuni.*

*Okkara krav er stutt sagt hetta:* ***somu løn og somu vilkor í heila tikið, sum okkara starvsbrøður við studentaskúlarnar í Danmark****. Mær tykist hetta krav vera so rímiligt, at tað nýtist ikki at begrundast; men eg skal tó nevna, at um ikki hetta krav verður uppfylt, so skjótt sambandið kemur aftur í lag við Danmark, vilja ið hvussu er summir, kanska allir lærararnir, sum nú eru við hendan skúlan, skjótast møguligt, royna at sleppa sær niður til ein annan skúla, har løn og vilkor eru betri; og teir ið koma í staðin, um nakar fæst, verða neyvan av tí besta slagnum. Tí tykist tað mær, at um tað er løgtingsins ætlan at dríva studentaskúla við undirbetaltum lærarakreftum, og skal tað vera neyðugt, enntá í eini tíð, hvar peningur tykist at tróta minni enn nakrantíð áður, so er tað rættiliga vónleyst at halda fram, og so er betri at leggja henda skúla niður aftur í dag enn í morgin, og síðan at halda fram sum áður við* ***at gráta og syngja um latínskúlan, sum fór fyri bakka, aðru ferð píndur í hel av f.l.***

*Eg loyvi mær at nevna eitt enn: Í 1939 beint áðrenn kríggið brast á, kom uppskot frá undirvísingarministeriinum til stovnan av statsskúla. Uttan at vilja siga, hvat ið var rætt ella skeivt, loyvi eg mær at minna á tað faktum,* ***at tað var av løgtingsins ávum, at einki spurdist burtur úr hesum uppskoti****; og tey sum líða undir tí eru ikki teir løgtingsmenn, sum forkoma uppskotinum uttan at seta nakað annað og betri í staðin, men lærarar og næmingar við løgtingsins studenta- og preliminerskeið. Eg sigi lærarar, tí eg haldi tað ikki vera óbeskeðið at trúgva, at vit, sum hava virkað við studentaskúlan, høvdu fingið loyvi til at hildið fram við tann nýggja skúlan løntir í hvussu er sum adjunktar. Tað er tí ikki meir enn løgtingsins skylda at skaffa okkum ta løn og tey vilkor, sum tað hevur forðað okkum í at fingið á annan hátt.*

Henda skortfleingjan hjálpti, tí løgtingið eftirlíkar kravinum frá lærarunum, og í Løgtingstíðindum frá 1941 sæst, at hetta uppskot verður samtykt 16-0 hin 13. nov.:

1. *Skúlastjóri Nygaard og hinir lærararnir við studentaskúlan verða frá 1. januar 1942 løntir sum adjunktar sambært ta av skúlastjóranum í málinum*

*givnu uppgávu um, hvussu hesir verða løntir. Leiðarasamsýningin verður hækkað skúlastjóranum frá 500 uppí 1.200 kr. um árið.*

2. *Tingið játtar studentaskúlanum ókeypis telefon.*
3. *Landsnevndin verður heimilað úr økonomiska grunninum at veita ómúgvandi studenta- og preliminerskúlanæmingum ein hóskandi studning.*

Nú valdar so friður um fastlønarviðurskiftini til 1958, tá ið studentaskúlalærararnir í Danmark kunnu verða sáttmálasettir í staðin fyri at vera tænastumenn. Tað vendi eg aftur til niðanfyri.

Viðvíkjandi tímaniðurskurði fyri skrivlig heimaarbeiði og samsýning fyri umsjón við søvnum er einki at finna fyrr enn eftir kríggið. Sambært einum ódagfestum skjali[9] við yvirskriftini *Yvirlit yvir tað eykagjald, sum lærararnir við studentaskúlan sambært „Ministeriets Skrivelse af 29. dec. 1922" eiga til góðar fyri skrivlig heimaarbeiði síðan 1. jan. 1942, tá ið teir eftir løgtingsviðtøku av nov. 1941 vórðu løntir sum adjunktar, og til 31. juli 1946 (útgangin á hesum skúlaári)* fáa lærarar nú samsýning fyri skrivlig arbeiði; men soleiðis sum eg lesi nevnda skriv, fáa lærararnir tó í mesta lagi tríggjar tímar samanlagt fyri skrivligt heimaarbeiði. Í brævi frá 22. september 1950[10], sum landsstýrið sendir fysikklærara viðvíkjandi eftirgjaldi, verður víst til trý rundskriv frá Kenslumálaráðnum um skrivlig heimaarbeiði og umsjón við søvnum. Tey eru frá 05.02.1948, 22.04.1949 og 01.04.1950. Í einum brævi frá 14.11.1956[11] til landsstýrið vísir Nygaard á, at sambært áðurnevnda rundskrivi frá 05.02.1948 verður í mesta lagi goldið fyri 5 tímar, hóast arbeiðið tekur væl longri tíð. Í sama brævi skrivar hann eisini, at ivaleyst var tað best, um lærararnir ikki høvdu stórvegis fleiri tímar enn teir normalu 27 um vikuna. Her sær út til, at 27 tímar eru tað skylduga tímatalið, sum eisini var nýtt í Danmark til 1958.

## Kreppa á Studentaskúlanum 1959-61

Áðurnevnda skriv frá 25.01.1961[6] til *Undervisningsministeriet* undirskrivað av Chr. Haraldsen, kst. kursusleder, snýr seg um at fáa Kenslumálaráðið at góðkenna studenta- og preliminerskeiðið sum gymnasium við realdeild, nú undirvísingin á skeiðunum er longd eitt ár. Í tí sambandi verður greitt frá ymsum viðurskiftum m.a. um Lærernes lønforhold:

*Efter at kursus´ lærere i nogle år havde været lønnet efter overenskomst, vedtog Lagtinget i 1941, at lærerne ved kursus skulle lønnes efter samme regler, som gælder for danske gymnasielærere. Denne ordning blev fulgt til 1958. Men den danske tjenestemandslov af 7. juni 1958 er ikke trådt i kraft for vort vedkommende. Vore løndele beregnes stadigvæk efter den forrige lønningslov, og Lagtinget har hidtil nægtet fortsat at yde os samme løn, som vore kolleger i Danmark oppebærer.*

*Men sagen er ikke afsluttet endnu. Der er af Lagtinget nedsat et udvalg, som skal udarbejde forslag til ny lønningslov for blandt andre lærerne ved kursus, og Lagtinget skal i indeværende samling tage stilling til denne lov, som bliver så afgørende for vor skoles fremtid. Hvis der nemlig sker det, at man fortsat vil stille os lærere ved Lagtingets studenterkursus lønmæssigt dårligere end vore danske kolleger, så kan vi ikke forvendte at få lærerkræfter fra Danmark, hvad vi nødvendigvis må have, da vi allerede i næste skoleår må ansætte 2 eller 3 nye cand. mag.er og ikke i øjeblikket har kvalificerede folk herhjemme til disse stillinger. Når dertil kommer, at nogle af vore yngre lærere vil søge bort, hvis lønspørgsmålet ikke bliver bragt i orden, så vil man forstå, at vort kursus vil komme i de største vanskeligheder på grund af lærermangel.*

Nær fær almenningurin so at vita, at studentaskúlin er í svárum trupulleikum? Tað einasta eg higartil havi funnið í bløðunum, er henda lýsingin frá mai 1960 í sambandi við upptøkuroynd til preliminerskeiðíð og innmelding til studentaskeiðið (mín **herðing**):

*Studentaskúlin*

*Við tí fyrivarni, at* ***stórur vandi er fyri, at skúlin noyðist at steðga vegna læraratrot****, um lønarviðurskiftini ikki koma í rætt lag, verður upptøkuroynd til preliminerskeiðið*

…

*Við sama fyrivarni verður eisini tikið móti innmelding til studentaskeiðið*

…

Th. Nygaard

Tað letur ikki til, at hendan lýsingin fær føroysku bløðini at spyrja Nygaard, hvat ið er á vási. Tá ið eg einki fann í bløðunum um læraratrot ella lønarviðurskifti, var farið í landsstýrið at leita. Elsta skjalið, sum eg havi funnið har úti um hesi viðurskifti, er hetta brævið frá Føroya Lærarafelag[12)] til landsstýrið dagf. 17.11.59:

*Føroya Lærarafelag biður Føroya landsstýrið um at skipa so fyri, at lærararnir við studentaskeið løgtingsins fáa somu løn sum studentaskúla-lærarar í Danmark, og at henda skipan fær gildi frá 1/4 1959.*

*Um lønarskipanin við studentaskúlan her ikki er á somu hædd sum lønarskipanin við studentaskúlarnar í Danmark, verður tað ringt at fáa lærarar til skúlan, og kann tað tí vera væntandi, at skúlin kann koma at mangla kvalificeraðar lærarar.*

*F.v.*
*Poul E. Petersen*

Føroya Lærarafelag ber helst ótta fyri, at læraratrotið fer at fáa fylgjur fyri Læraraskúlan, har sum studentaskúlalærararnir eisini undirvísa.

Næsta skjalið er bræv dagfest 25. februar 1960 frá studentaskúlalærarunum til landsstýrið[13)]:

*Undirritaðu lærarar við studentaskúlan kenna tað sum skyldu sína at gera landsstýrið og avvarðandi myndugleikar var við ta støðu, sum okkara hægra undirvísing er komin í.*

*Soleiðis sum næmingatalið er vaksið ár undan ári, fer ongin at ivast í, at hesin skúlin er ein veruligur og týðandi táttur í okkara samfelagsligu menning. Tað er tí hugstoytt at mega viðganga, at um ikki avgerandi vend kemur í, er størstur vandi fyri, at skúlin fer fyri bakka.-*

*Soleiðis sum tað nú liggur fyri, eru tað tvey høvuðsmál, sum mega loysast, um skúlanum skal vera lív lagað: annað er húsaspurningurin, hitt er læraratrotið.-*

*Vit eru ikki í iva um, at landsstýrið er sinnað til og heldur seg ført fyri at fremja tær tilætlaðu byggiætlanir sum skjótast. Men nú er ongin tíð út at geva.-*

*Læraratrotið er eftir okkara tykki ikki minni átrokandi, og tað slepst ikki undan í bræði.*

*Tað er ein veruleiki, at í komandi árum noyðast vit at vissa skúlanum lærarar úr Danmark; men sum landsstýrinum kunnugt, er læraratrotið har ovurhonds stórt. Sambært tær seinastu uppgávurnar vantar í løtuni yvir 500 cand. mag.'ar ella 25% av øllum gymnasiulærarum, og í næstum fer trotið at koma upp móti 1000.*

*Ein treyt fyri at vissa okkara skúla ta neyðturviligu tilgongd av forsvarliga útbúnum lærarakreftum er at skapa kappingarfør arbeiðsviðurskiftir og lønarkor. Hvørki er gjørt enn.*

*Vit halda tað vera óráð, at longur verður drálað við at seta ta lønarligu nýskipan í verk, sum framd var í Danmark í farna ári. Tað er púra greitt, at hesum slepst ikki undan, soleiðis sum viðurskiftini eru, og vit mæla til, at lønarspurningurin verður greiddur sum skjótast.*

*Vit loyva okkum at vísa til, at fólkaskúlalærarnir her á landi hava fingið lønarkrøv síni framd sambært danskar lønarreglur. So mikið meira umráðandi er tað, at lærarar studentaskúlans fáa somu sømdir.*

*Vit vóna, at landsstýrið hevur eina fatan av, hvussu týdningarmikið tað er at fáa loyst henda spurning sum skjótast, og vit eru altíð fúsir at samráðast við landsstýrið um hetta mál.*

| | | |
|---|---|---|
| *Th. Nygaard* | *Erik Petersen* | *Sofus Joensen* |
| *Arnbjørn Mortensen* | *Andrias Højgård* | *Chr. Lützen* |
| | *Chr. Haraldsen* | |

Th. Nygaard, skúlastjóri fær hetta brævið[14)] hin 28. apríl 1960 frá sínum yngru starvsfeløgum:

*Aftan á at Føroya Løgting hevur felt uppskot landsstýrisins um broyting av tænastumannalønunum, og vit fyri framtíðina mega rokna við at koma at arbeiða fyri munandi minni løn, enn tað stendur okkum í boði á donskum gymnasium – har vit, undir tí ovurhonds stóra lærarartrotinum, til eina og hvørja tíð kunnu fáa starv – vilja vit lata tygum vita av, at vit vegna tey vánaligu og ótryggu lønarkor halda okkum vera noyddar at fara at hugsa um at søkja starv uttanlands.*

*Og longri niðri skriva teir:*

*Limaskapur okkara í Dansk Magisterforening loyvir okkum heldur ikki at*

*arbeiða undir verri lønarkorum enn danskir gymnasiulærarar.*

*Vit vilja gera vart við ætlanir okkara í so góðari tíð, at tygum skulu fáa stundir til at umráða tygum, og vilja biðja tygum sum skjótast – áðrenn nakað stig verður gjørt frá okkara síðu – at skaffa okkum vissu um, hvussu fer at verða tænastumannaviðurskiftunum viðvíkjandi.*

*Vit vóna hóast alt, at Føroya Landsstýri fær borið tað so í bandi, at vit kunnu blíva verandi her, men teimum áður nevndu treytunum ber ikki til at víkja frá.*

*Á Studentaskúlanum, tann 28. apríl 1960.*

*Andrias Højgård        Sofus Joensen        Arnbjørn Mortensen*

Og sama dag sendir Nygaard landsstýrinum hetta sera speiska og hvassorðaða brævið[15)]:

*Lærararnir við studentaskúlan hava áður í skrivum gjørt landsstýrið vart við, hvussu hættislig støðan er fyri skúlan, og at tað stendur um lív ella deyða, mest orsakað av húsaneyðini og teimum óloystu lønarviðirskiftunum.*

*Nú er so tað ótrúliga hent, at løgtingið – eftir at hava veitt summum av sínum tænastumonnum og øllum fólkaskúlalærarunum fullar sømdir samsvarandi tær lønarreglur, sum galdandi eru í Danmark. – hevur sýtt øðrum tænastumonnum, harímillum studentaskúlalærararunum, somu sømdir*

*Tað er eyðsæð, at lærararnir ikki vilja lata sær slíkt órættvísi lynda, og tað er eyðsæð, at eingir lærarar fáast til skúlan undir ringari treytum, enn teimum standa í boði við skúlar í Danmark, og tað er eisini eyðsæð, at ið hvussu er teir yngru lærararnir vilja søkja burtur hiðani.*

*Sostatt dugi eg ikki at síggja, hvussu skúlin skal kunna halda fram, og tað tykist mær, at tað hevði verið nógv sømiligari og ruddiligari, um løgtingið samtykti at taka skúlan av, heldur enn at royna at pína hann í hel, um so er, at landið ikki orkar at bera tað, hann kostar.*

*Undarliga ósambærligt má tað eisini tykjast, tá ið lønarviðurskiftini hjá fólkaskúlalærarunum verða greidd við at avreiða 5% av skúlanum aftrat til statin, at ein líknandi útvegur ikki eisini verður nýttur at greiða lønarviðurskiftini hjá studentaskúlalærarunum. Her hevði bert verið neyðugt*

*at tikið ímóti tí tilskotinum, sum staturin letur til øll onnur students- og preliminerskeið í ríkinum, (hetta man í løtuni liggja um einar 1000 kr. fyri hvønn dimitteraðan student og nakað minni fyri hvønn preliminarist). Ella tá ið staturin verður biðin um at gjalda 55% av lønunum til fólkaskúlalærararnar, hví verður so tað sama ikki gjørt, tá ið talan er um studentaskúlan? Ella enn betri, tá ið løgtingið samtykkir at heita á statin um at byggja nýggjan og tíðarhóskandi læraraskúla og seta serligar lærarar við hann eftir donskum lønartreytum sjálvandi – kann nakað annað hugsast? – hví verður ikki tað sama gjørt, tá ið talan er um studentaskúlan? Ikki skal nakað av hesum skiljast sum uppskot til nakra loysn frá mínari síðu.* ***Eg loyvi mær bert at spyrja, tí eg dugi ongan logikk at síggja í hesum skúlapolitikkinum, ið rikin verður. Ella er tað so, at studentaskúlin skal nýtast sum ein lítil fjøður í tí nationala hattinum? Lítið mansligt tykir mær tað tá vera at lata lærararnar gjalda fyri pyntið við avklíptum lønum.***

*Støðan er nú sum sagt tann, at eg dugi ikki at síggja nakran møguleika fyri, at studentaskúlin kann halda fram, um ikki lønarviðurskiftini hjá lærarunum sum skjótast – og tað hastar nógv – verða greidd á ein slíkan hátt, at teir í ongum føri fáa ringari sømdir, enn teimum standa í boði við studentaskúlar í Danmark, og hetta má eisini tryggjast teimum í tíðini frameftir, so leingi tey politisku viðirskiftini Danmarkar og Føroya millum eru, sum tey eru.* ***Verður hetta ikki gjørt, leggi eg við hesum skrivi starvið sum fyristøðumaður studentaskúlans frá mær og vil rokna meg at vera leysan, tá ið hetta skúlaárið er komið at enda t. 1. aug.***

*Samstundis má eg biðja landsstýrið gera av, um lýsast skal eftir nýggjum næmingum. Hetta plagar at verða gjørt um hesa tíðina, men eg trúgvi ikki, at skúlin, sum støðan er í løtuni, kann mannast við kvalificeraðum lærarakreftum til komandi skúlaár, og eg hætti mær tí ikki at taka ábyrgdina av at taka nýggjar næmingar inn. Og verður avgjørt at steðga skúlanum, er best at hetta verður kunngjørt sum skjótast, so teir næmingar, sum annars høvdu ætlað sær higar, fáa umrátt seg.*

Við hávirðing
Th. Nygaard

Í brævi dagf. 18. mai 1960 til landsstýrið skrivar Dansk Magisterforening16) m.a.:

*Med telegram af 30. april d.å. tillod Dansk Magisterforening sig at give udtryk for sin misbilligelse af, at reguleringen af lønningerne for de af **foreningens medlemmer**, der er ansatte ved Lagtingets Studenterkursus, endnu ikke havde fundet sted. Foreningen tillod sig samtidig at stille en nærmere skriftlig redegørelse i udsigt.*

....

*Under indtryk af denne situation må Dansk Magisterforening tilråde sine medlemmer ved Lagtingets Studenterkursus at søge arbejde i Danmark, såfremt deres lønforhold ikke bringes i orden snarest muligt på en tilfredsstillende måde, ligesom man vil fraråde andre medlemmer at påtage sig arbejdet ved samme kursus.*

...

Tað er soleiðis líkt til, at studentaskúlalærararnir eru limir í Dansk Magisterforening og ikki í Gymnasieskolernes Lærerforeing (GL). Hví so var, havi eg ikki fingið uppspurt.

Aftur tann 19. mai 1960[17)] biðja biðja teir 7 studentaskúlalærararnir landsstýrið um í hesari tingsetu at leggja fyri løgtingið spurningin um lønarviðurskifti lærarannа:

*Skal nakar møguleiki vera fyri framhaldi av skúlanum aftan á summarfrítíðina, er tað avgjørt neyðugt, at tað verður veitt lærarunum somu lønarábøtur, sum ríkisins tænastumenn í Føroyum hava fingið.*

*Annars fara lærarar at søkja burtur, og skúlin má støðga vegna læraratrot.-*

*Sofus Joensen   Andrias Højgaard   Arnbjørn Mortensen*

*Erik Petersen   Chr. Haraldsen   Th. Nygaard   Chr. Lützen*

Hin 13. juni 1960[18)] svarar landsstýrið studentaskúlalærarunum soleiðis aftur:

*Í skrivi frá 19. f.m. hava lærararnir á studentaskúlanum heitt á landsstýrið um at leggja fyri løgtingið spurningin um lønarviðurskifti læraranna.*

*Sostatt verður hervið sagt frá, at tað ikki bar landsstýrinum til at leggja fram undir eykatingsetuni, men landsstýrið vil leggja fram uppskot fyri ólavsøkutingið um, at tænastumenn landsins fáa somu lønarsømdir sum ríkisins tænstumenn hava fingið.*

Um kvøldið 10. august 1960 hevur landsstýrismaðurin Niels Winther Poulsen fund við Nygaard, Haraldsen, Mortensen, Chr. Lützen, A. Højgård og Sofus Joensen. Í fundarf rásøgnini[19)] skrivar J. P. Ellendersen, flt. m.a.:

*Nygaard segði, at hann helt fast við sína støðu viðvíkjandi stjórastarvinum, tí hann dugdi ikki at síggja, hvussu skúlin kundi halda fram, uttan at lønarviðurskiftini vóru tey somu sum aðrastaðni, men hann vildi ikki siga seg undan um neyðugt at taka tímar á skúlanum, men tók fyrivarni viðv. yvirtímalønini.*

*Mortensen hevði ikki sagt upp og vildi byrja aftur á skúlanum, men ætlaði sær at søkja burtur. Hann vildi tó helst steðga, til tingið hevði tikið avgerð í málinum.*

*Haraldsen hevði ongan hug at siga upp, men tók undir við Nygaard í tí, at hann helt ikki at skúlin kundi halda fram, um lønarviðurskiftini ikki komu í lag.*

*Højgaard helt fram, at hann faktiskt var leysur, við tað at hansara aspiranttíð var úti 1. august í ár, og hann helt fast við tað, sum hann hevði greitt N. W. Poulsen frá í juni mánað í ár, at hann ikki ynskti at gerast tænastumaður uttan mun til hvørjar lønarreglur tingið viðtók, men ynskti at verða settur við sáttmála.*

*Sofus Joensen hevði somu støðu sum A. Højgaard. Tó at hansara aspiranttíð ikki var úti, kendi hann seg leysan, við tað at hann longu í juni mánað í ár hevði boðað landsstýrismanninum frá, at hann ikki kundi halda fram undir núverandi lønarkorum, men ynskti at verða sáttmálasettur.*

*Landsstýrismaður segði, at hann var glaður um, at tað vísti seg, at nú vóru líkindir til at halda fram við skúlanum m. a. tí at landsstýrið møguliga saman við fíggjarnevndini átti at hava heilmild til at gera sáttmála við teir báðar Højgaard og Joensen.*

*Aftan á fyrispurning frá landsstýrismanninum søgdu Højgaard og Joensen, at teir* ***ikki*** *vóru sinnaðir til at byrja aftur, fyrr enn sáttmálin var í lagi.*

Skúlin helt fram, og Chr. Haraldsen varð settur sum fyribils skúlastjóri. Tá ið skúlin søkir eftir lærarum til skúlaárið 1961/62, og lærararnir framvegis ikki hava

fingið nýggja lønarskipan, noktar GL limum sínum at søkja. Vegna lærararnar skrivar Andrias hin 16. juni 1961 til GL[20]:

*Lad mig først på lærerkollegiets vegne udtrykke vores påskønnelse af, at GL ønsker at varetage eller i det mindste med interesse følger den lønmæssige udvikling for lærerne ved Lagtingets studenterkursus.*

Andrias vísir so á, at løgtingið hevur samtykt nýggja lønarlóg fyri tænastumenn og sendir GL eitt eintak av lógini og vísir á greinar, sum lærararnir ikki eru nøgdir við. Og víðari skrivar hann:

*Reaktionen fra GL kom ikke uventet. Vi vil håbe, at de antydede forhandlinger mellem GL og landsstyret må føre til en endelig klaring af sagen og skabe ro om lønproblemet.*

*Såvidt vi har forstået, påtænker GL at fraråde sine medlemmer at søge opslåede stillinger. Lærerkollegiet ønsker i denne forbindelse at udtale, at vi ikke mener at kunne tage stilling til den påtænkte „blokade' Sagen har for vores vedkommende andre sider end de rent lønmæssige, og der er mange hensyn at tage i betragtning. For øjeblikket anser vi det for mest formålstjenligt at afvente den videre udvikling i sagen. Vi håber, at GL er indforstået med, at vi, under de foreliggende omstændigheder, indtager en sådan holdning.*

Lærararnir biðja um at vera kunnaðir um gongdina í málinum, og enda brævið við at vóna, at henda ósemjan skjótt verður loyst nøktandi fyri allar partar.

Blokadan hjá GL noyddi landsstýrið at samráðast við GL. Samráðingar eru í Havn, og 14. juli 1961 skriva Petur Mohr Dam og Niels W. Poulsen fyri landsstýrið og Bernard Baunsgaard fyri GL undir hesa avtaluna:

*Det pligtige timetal og overbetalingen følger reglerne i Danmark med tilbageregulering til 1. oktober 1960.*
*(so eru eisini onnur punkt í avtaluni, sum gjøllari greina fastar lønir o.a.)*
*Såsnart lagtinget kaldes sammen, forelægges normeringsspørgsmålet for lagtinget og søges gennemført hurtigst muligt.*

*Såsnart vedtagelse foreligger, ophæves* ***blokaden*** *(mín herðing).*

Løgtingið samtykti semjuna, men tó ikki fyrr enn eftir, at skúlaárið byrjaði 21. august. Vit síggja her, at í 1961 hevur GL tikið sera virknan lut í lønartrupulleikunum hjá studentaskúlalærarunum, hóast teir hvørki vóru limir í GL og heldur ikki hava biðið GL lagt uppí. Eftir hesa semjuna verða teir limir í GL, sum samstundis tykist at missa áhugan fyri limunum í Føroyum. Tað vendi eg aftur til seinni.

## Árini 1964-81

Eg byrjaði at starvast sum lærari í Hoydølum í august 1964. Tá var Povl Skårup umboð fyri GL. Umboðið skuldi syrgja fyri, at lærarar gjørdust limir í GL, og krevja limagjald frá teimum. Skårup fór aftur til Danmarkar í 1967, og eg gjørdist síðan GL-umboð. Sum umboðsmaður skilti eg rættiliga skjótt, at okkara limaskapur í GL var ikki til so nógva nyttu. Vendi eg mær skrivliga til GL við onkrum trupulleika, fekk eg sjáldan nakað svar og noyddist tí at ringja niður. Men GL vildi ongantíð átaka sær at loysa nakað mál fyri okkum. Eg var eisini inni á gólvinum hjá GL og fekk at vita, at Statsministeriið hevði álagt teimum bara at ráðgeva limunum í Føroyum og annars ikki leggja seg út í viðurskiftini í Føroyum. Tú kanst so spyrja, hví vit so ikki bara meldaðu okkum úr GL. Svarið er helst, at vit hava kent ein ávísan tryggleika við limaskapinum, hóast vit fingu lítla og onga hjálp frá GL. Og tá – í seinnu helvt av 60-unum – vóru vit bara eini 10 lærarafólk, sum vóru limir í GL og tískil í so fáment at stovna eitt yrkisfelag.

Mær vitandi hava studentaskúlalærararnir ikki havt í umbúna at stovna yrkisfelag fyrr enn í 1975, tá ið vit fingu bræv dagfest 3. mars 1975 frá nývalda landsstýrinum við Atla P. Dam sum løgmanni, har tað verður boðað okkum frá, at ***avtalan*** um at verða løntur eftir GL-sáttmála fer úr gildi 1.oktober 1975. Hetta var ein fylgja av samgonguskjalinum, ið m.a. segði, at landsstýrið bert vildi samráðast og gera sáttmálar við føroysk fakfeløg. Hesa avgerðina hjá landsstýrinum tóku lærararnir fult og heilt undir við. Men longu 22. september sama ár boðar landsstýrið frá, at tað hevur samtykt at framleingja lønaravtaluna til ***serligur føroyskur lønarsáttmáli ella lønarregla eru gjørdar fyri tykkara stætt***, sum landsstýrið málber seg tá. Henda avtalan, sum landsstýrið

sipar til í brævinum frá 1975, er helst tann avtalan, sum varð undirskrivað hin 14.07.1961 av P. M. Dam og Niels W. Poulsen vegna landsstýrið og B. Baunsgaard vegna GL. Eg boðaði beinanvegin GL frá hesi landsstýrisavgerð og spurdi, hvussu vit ruddiligast endaðu limaskapin í GL. Sum vant ønti GL okkum ikki aftur. Hóast fleiri áminningar svarar GL umsíðir í september 1976 og mælir okkum til at velja eina nevnd, sum skal ráðgeva GL í samráðingum við landsstýrið. Tað kundu vit als ikki góðtaka. Tvey ár seinni, í september 1978, gevist eg sum GL-umboð, og Katrin Thomassen tekur við.

Brævaskiftið millum GL og umboð tess í Føroyum fram til 1982 er tíverri ikki at finna, hvørki á YF-skrivstovuni ella í Hoydølum. Tað ber kortini til at gera sær eina mynd av samskiftinum, tí í YF-gerðabókini eru brøv umrødd. Við gerðabókini, formansfrágreiðingum og tí, sum eg og onnur kunnu ørminnast, ber til at siga, at meirlutin av lærarunum vildu bíða við at taka støðu, til landsstýrið spældi útaftur. GL helt tað vera óðamannaverk av okkum at stovna yrkisfelag, tí vit vóru so fáment og vildu harvið standa sera veik í samráðingum við landsstýrið. GL mælti okkum heldur til at verða verandi í GL og velja eina nevnd, sum skuldi ráðgeva GL um okkara áhugamál.

## GL fær øði í okkum

Tá ið skúlin byrjar aftur eftir jólafrítíðina í 1981/82, boðar okkara GL-umboð frá, at vit skulu rinda 1000 kr. eyka til GL fyri at styrkja verkfalsgrunnin hjá teimum. Tá var ovboðið hjá mær og øðrum við. Tveir dagar seinni boðaðu Arnbjørn Mortensen, Róland í Skorini og eg frá við uppslagi á lærarastovuni, at vit meldaðu okkum úr GL, og Gunvør Hoydal, Pól Jespersen og Hans Jacob Debes skrivaðu seg á sama lista og vildu eisini melda seg úr GL. Okkara GL-umboð fær okkum tó at útseta útmeldingina – fyrst til 1. februar, og síðan til 1. mars, so stundir kundu vera til at seta seg í samband við GL og møguliga fáa greiðu á okkara fakfelagsligu støðu. Ein nevnd verður niðursett at kanna viðurskiftini. Hetta eykagjaldið var kanska ikki júst ein virðilig umbering fyri at melda seg úr GL, men var kortini tað lítla skumpið, sum skuldi til, fyri at vit av álvara tóku okkum saman og fóru undir at stovna okkara egna yrkisfelag. Og lat tað ikki verða gloymt, at tey nógvu lærarafólkini, sum ikki høvdu føroyskt

sum móðurmál, tóku undir við okkum, sum gingu á odda, og møttu eisini á stovnandi aðalfundinum.

Hin 08.02.1982 varð hetta skrivið sett upp á lærarastovunum:

*Til lærararnar við studentaskúlan og HF-skeiðini*

*Viðvíkjandi GL*

*Undirritaðu, ið enn eru limir í GL, vilja hervið gera vart við okkara støðu nú ein nevnd er vald at kanna okkara fakfelagsviðurskifti og tilknýti til GL, og nú GL-umboðið hevur boðað frá, at limir í GL-stjórnini eru altráir eftir at koma higar fyri at varðveita okkum sum limir.*

*Hvussu úrslitið enn verður, sum nevndin kemur til ella fær fleirtal fyri, so halda vit fast við, at vit eiga at stovna eitt felag fyri lærarar við studentaskúlar og hf-skeið. Hetta felag skal ikki vera nøkur deild av GL, men so longi vit fáa lærarar úr Danmark, sum eru GL-limir, verður neyðugt við einari samstarvsavtalu. Og møguliga skulu eisini gerast avtalur við hini norðurlondini.*

*Grundirnar til, at vit meina, at eitt føroyskt felag við heimstaði í Føroyum er tað einasta rætta, eru:*

1. *at Føroya Landsstýri bert vil gera sáttmála við eitt føroyskt felag,*
2. *at vit eru ivaleysa nógvir til at stovna eitt felag og longu áttu at havt gjørt tað,*
3. *at okkara viðurskifti á mangan hátt eru ólík teimum donsku,*
4. *at vit ongantíð kunnu fáa fulla nyttu av einum felag, ið hevur heimstað heilt suðuri í Keypmannahavn,*
5. *at vit hava dømi um, at GL ongan áhuga hevur havt fyri at loysa okkara trupulleikar, hvørki hjá einstaklingum ella okkum sum heild,*
6. *at vit blíva meira fakfelagsmeðvitandi, tá vit hava okkara egna felag og sjálvir skulu stríðast fyri okkara áhugamálum.*

*Tað, sum ikki má henda, er, at vit koma í ta støðu, at vit, sum eru millum*

*tey hægstløntu her á landi, verða tvungin til at gera eitt felag, tí tað danska felagið, sum vit ikki vildu sleppa, ikki kann hjálpa okkum longur. Hetta hevði verið stór skomm.*

*Annars er gongdin tann, at fleiri og fleiri taka seg úr donskum felagsskapum og stovna føroysk feløg. Føroya Arbeiðarafelag tók seg úr De Samvirkende Fagforbund í 1955. Føroya Lærarafelag tók seg úr Danmarks Lærerforening í 1980. So fáir sum 8 socialráðgevarar tóku seg í 1979 úr Dansk Socialrådgiverforening og stovnaðu sítt egna felag, og nú frættist, at pedagogarnir ætla at taka seg úr Socialpædagogernes Landsforening. Orsøkirnar eru tær somu: a) samráðingarrætturin og b) at serstøk føroysk viðurskifti hava lítlan og ongan áhuga í Keypmannahavn.*

*Vit halda tí onga grund vera til at fáa limir úr GL-stjórnini higar, fyrrenn vit eru klárir við einum uppskoti um samstarvsavtalu.*

*Hoydalar 8/2 – 1982*

*Jákup í Gerðinum Hans J. Debes Pól Jespersen*
*Zakarias Wang Róland í Skorini*

*Ikki GL-limur, men stuðli tankanum um fø. felag: Jonhard Mikkelsen*

*Onnur, ið stuðla okkum, kunnu venda sær til Jákup í G.*

Tað verður ov drúgt at greiða frá øllum fundarvirkseminum, sum fór fram í tíðini til stovningardagin 5. apríl 1982. Ein kanning millum limirnar vísti, at tey flestu vóru fyri, at vit stovnaðu okkara egna felag, tó treytað av eini samstarvsavtalu við GL. Á fundi 15. mars varð ein nevnd vald, sum skuldi samráðast við GL og fyrireika sjálvstøðugt fakfelag. Í hana komu Gunvør Hoydal, Zakarias Wang, Sámal í Skorini, John Mortensen og eg. Tveir mans frá GL – Erik Steensgaard, næstformaður í GL, og Henrik Hoffmann, fulltrúi, komu til Føroyar eftir umbøn frá okkara GL-umboði. Fundur var við hesar hin 26. mars, og umboðaðu Gunvør, John og Zakarias fyrireikingarnevndina. Eg var sjúkur og kundi ikki møta. GL-umboðini hildu, at áhugamálini hjá GL's limum í Føroyum vóru best vard innan fyri GL, og at teir stóðu við tey lyfti, sum teir høvdu sett fram í brævi frá 5.12.1980 um, at vit kunnu fáa eina nevnd til at taka sær av ráðgeving viðvíkjandi okkara áhugamálum. Men samráðingarrætturin kundi ikki leggjast til hesa nevndina, tí myndugleikin til at seta á verkfalsgrunnin var hjá GL-stýrinum.

Gunvør, John og Zakarias førdu fram, at ein og hvør loysn, sum bar við sær, at samráðingarrætturin lá hjá einum donskum felag, vildi eisini hava við sær, at vit sum ráðgevandi nevnd ongantíð kundu standa sum ein eind úteftir mótvegis øllum teimum ymsu myndugleikum, sum vit skuldu samráðast við. GL-umboðini søgdu, at vit sjálvandi høvdu frælsi til at stovna okkara egna felag, um limirnir ynsktu tað, men tað hevði rættiliga stóran týdning fyri einum góðum samstarvi við GL framyvir, at vit fylgdu teirra reglum fyri útmelding. Vit máttu melda okkum út hvør sær, og limaskapurin í GL vardi til 31. juli.

Fyrireikingarnevndin, sum var vald á fundi 15. mars, fór beinanvegn til verka at gera uppskot til felagslóg og kundi longu 30. mars boða til stovnandi aðalfund mánadagin 5. apríl 1982, kl.14, í skúlanum í Hoydølum. Hetta var í dymbildagavikuni.

Í hondskrivaðu gerðabókini hjá YF stendur:

*Ár 1982, mánadagin tann 5. apríl kl. 14, komu vit undirritaðu limir saman á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði í Hoydølum og samtyktu har at stovna eitt felag fyri lærarar á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði og samtyktu lógir felagsins, tó so at orðingin av grein 2, stk. 4 og stk. 5, skuldi endaliga samtykkjast á fundi hósdagin 15. apríl 1982 kl. 16 í Hoydølum, har eisini stýrið skal veljast.*

Tey 32, sum møttu, hava undirskrivað gerðabók felagsins í hesi røð:
Jákup í Gerðinum

Birta Jacobsen
Jákup Reinert
Hanus A. Samuelsen
Pól Jespersen
Svanna Hanusardóttir
Niels Gjerding
Inger Flø Jørgensen
Valdemar Dalsgaard
Jette Hoydal
Bozena Rasmussen
Hanne Jacobsen

Kirsten Brix
Zacharias Sørensen
Kjartan Danielsen
André Niclasen
Bergljót Joensen
Ulf Timmermann
Hans Pauli Joensen
Andru M. Magnussen
Kári Nosøe Olsen
Finnur Lützen

Róland í Skorini
Hans J. Debes
Malan Johannesen
Zakarias Wang
Snorri Fjallsbak
Mads A. Winther
Sámal í Skorini
Gunvør Hoydal
Ole Laursen
Hanne Amiri

Lærararnir, sum ikki vóru á aðalfundi, meldaðu seg eftir páskaferiuna so við og við í felagið, og dagin eftir eykaaðalfundin vóru 49 limir í YF. Limatalið vaks støðugt og var komið upp á 100, áðrenn eg gavst í 1988. Á eykaaðalfundinum 15. apríl varð lóg felagsins samtykt. Carl V. Weihe varð valdur til grannskoðara, og hann skuldi skipa fyri stýrisvalinum, sum fór skrivliga fram. Hin 8. juni 1982 kunngjørdi Carl Vilhelm úrslitið av fyrsta stýrisvalinum. Tað komu 40 atkvøðuseðlar inn, og í stýrið vórðu hesi vald: Jákup í Gerðinum, Pól Jespersen, Gunvør Hoydal, John Mortensen og Sámal í Skorini. Tiltakslimir: Bozena Rasmussen, Ole Laursen og Bent Ole Christensen.

Yrkisfelagið var bara fyri lærarar, sum undirvístu við studentaskúlar ella hf-skeið. Hóast vit vóru fáment, vildu vit t.d. ikki hava akademikararnar á Læraraskúlanum ella á Fróðskaparsetrinum við, tí hetta, hildu vit, fór at seinka samráðingunum við landsstýrið um lønarsáttmála. Tá ið YF varð stovnað, vóru trý lestrarstøð, nevniliga Studentaskúlin- og HF-skeiðið í Hoydølum, HF í Klaksvík og HF í Suðuroy. Hin 28. apríl 1982 samtykti løgtingið at stovnseta Studentaskúla- og HF-skeið í Eysturoynni, men framvegis vóru í YF høpi bara trý lestrarstøð, tí HF í Klaksvík og skúlin í Eysturoynni vórðu roknað sum eitt lestrarstað. Í lógini varð ásett, at stýrið skuldi hava 5 limir og tríggjar tiltakslimir, har ið hvørt lestrarstað í minsta lagi skuldi hava ein lim og ein tiltakslim. Stýrið skipar seg við formanni, næstformanni (nf.), skrivara (skr.) og kassameistara (ksm.). Lógin er sjálvandi broytt fleiri ferðir, og m.a. er reglan um, at øll lestrarstøðini skulu verða umboðað í stýrinum, ikki galdandi longur.

Tey 6 árini, eg var í stýrinum, vóru altíð tríggir stýrislimir úr Hoydølum, ein úr Klaksvík/Eysturoy og ein úr Suðuroy. Eg var formaður øll árini. Hini stýrislimirnir vóru:

**1982/83:** Gunvør Hoydal (skr.) og Pól Jespersen (ksm.) úr Hoydølum. Sámal í Skorini úr Klaksvík/Eysturoy og John Mortensen (nf.) úr Suðuroy.
**1983/84:** Gunvør Hoydal (skr.) og Pól Jespersen (ksm.) úr Hoydølum. Hóraldur Joensen úr Klaksvík/Eysturoy og John Mortensen (nf.) úr Suðuroy.
**1984/85:** Pól Jespersen (ksm.) og Snorri Fjallsbak (skr.) úr Hoydølum. Hans Andrias Joensen úr Klaksvík/Eysturoy og John Mortensen (nf.) úr Suðuroy.
**1985/86:** Pól Jespersen (ksm.) og Snorri Fjallsbak (skr.). Jógvan Mørkøre (nf.) úr Klaksvík/Eysturoy og Ole Laursen úr Suðuroy

**1986/87:** Hendrik Dahl (ksm.) og Malan Johannesen úr Hoydølum. Jógvan Mørkøre (skr.) og Ole Laursen (nf.).
**1987/88:** Hendrik Dahl (ksm.) og Jógvan Mørkøre (skr.) úr Hoydølum. Hans Andrias Joensen (nf.) úr Klaksvík/Eysturoy og Ole Laursen.

Formenn fyrstu árini:
**1982-88:** Jákup í Gerðinum
**1988-90:** Jógvan Mørkøre
**1990-92:** John Mortensen
**1992-94:** Hans Andrias Joensen

## Samstarvið við GL og hini norðanlondini

Útmeldingin úr GL gekk væl, og í juni undirskrivaðu YF og GL eina samstarvsavtalu. Av tí at vit steðgaðu at rinda limagjald til GL, snúði avtalan seg mest um, hvussu eftirstøðurnar í limagjaldi skuldu avgreiðast. GL lovaði at stuðla YF at gerast limur í Nord-Lär (Nordiska Lärerrådet), sum var ein felagsskapur av lærarafeløgum úr øllum norðanlondum. YF gjørdust limur longu um heystið 1982 við viðmæli frá GL, og luttóku vit eisini á fundinum í Helsinki í mars 1983. Einir tríggir lærarar fóru aftur til Danmarkar, tá ið skúlaárið endaði í 1982, og teir høvdu ongar trupulleikar at venda aftur til GL, hvørki til nýtt arbeiði ella til arbeiðsloysi[21)].

Tað løgna var, at meðan vit vóru limir í GL, kendu vit ongan har, men tá ið vit gjørdust sjálvstøðug og komu at kenna oddafiskarnar í feløgunum í Íslandi, Noregi, Svøríki og Finnlandi, komu vit eisini at kenna GL-stýrið nógv betur. Nú eru yvir 30 ár síðan, eg kom at kenna formenninar í hinum 5 norðurlendsku feløgunum, og gjørdust vit vinmenn. Vit hava eisini hitst av og á, eftir at vit fóru frá. Og seinasta summar vóru vit saman eitt langt vikuskifti í fjallasmáttuni hjá norska formanninum. Nú er ikki ætlanin, at greinin skal vera politisk, men eg havi ongantíð skilt, hví afturhaldskreftirnar her á landi altíð ávara í móti vandanum fyri isolatión, hvørja ferð tosað verður um meira sjálvsræði. Eg kann ikki bara mær at nevna, hvat ein eldri lærari segði á aðalfundinum hjá Lærarafelagnum í 1980, tá ið tað tók seg úr Danmarks Lærerforening: Man skal vera góður við sítt land, men ikki steingja seg burtur frá øðrum[22)]. Eg havi ongantíð skilt, hví nakar steingir seg úti við at standa á egnum beinum.

## YF fer til arbeiðis

Tá ið stýrið varð valt 6. juni, fór tað beinanvegin til arbeiðis. Fleiri fundir – eisini ein limafundur – vóru, áðrenn vit hildu summarfrí. Fríggjadag seinnapart var fastur fundardagur, og tað er hann framvegis, skilst. Umframt stýrisfund einar tríggjar ferðir um mánaðin, vóru arbeiðsfundir, telefon-, lima-, aðal-, eykaaðal- og samráðingarfundir. Tað var sjáldan nøkur vika fundarfrí, tá var heldur vanligari við fleiri fundum í somu viku. Stýrislimirnir fingu ikki aðra samsýning enn frían limaskap í YF.

*Landsskúlafyrisitingin*

Sum nevnt fekk YF beinanvegin gott samstarv við GL og hini norðurlendsku feløgini. Men á heimavølli gekk heldur trekari. Landsskúlafyrisitingin, ið var tann stovnur, sum vit skuldu samskifta mest við, hevði sera ilt við at góðtaka, at eitt lærarafelag var komið afturat, sum eisini vildi hava ávirkan á og vildi verða hoyrt um viðurskifti, sum viðvíktu limum tess. Men so við og við vandist Landsskúlafyrisitingin við YF, og samskiftið kom í eina natúrliga legu.

*Rektaramálið*

Longu á jóansøku í 1982 mátti YF hvessa frá sær, tá ið rektari skuldi setast við nýstovnaða studentaskúlan í Eysturoynni, og mótmælið frá YF gjørdi óivað sítt til, at ein, sum leyk treytirnar í lýsingini, varð settur í starv. Hetta var eitt keðiligt mál, og kom eg persónliga at merkja, hvat tað vil siga at vera formaður og harvið verða gjørdur eitt við felagið.

*Sáttmálar við landsstýrið*

Ein av fyrstu uppgávunum hjá stýrinum var at gera eitt uppskot um sáttmála við landsstýrið. Longu í november sendu vit landsstýrinum eitt uppskot og bóðu um samráðingarfund. Fyrsti samráðingarfundurin varð longu 9. des. 1982 við ein fulltrúa, sum tó beinanvegin legði dent á, at einki av tí hann segði var bindandi fyri landsstýrið, t.e. hann hevði ikki fulltrú at gera bindandi avtalur við okkum. Hóast fulltrúin ikki hevði fulltrú, hildu samráðingarnar fram, og á 8. fundinum hin 25.02.1983 vóru vit samd um eitt uppskot, sum fulltrúin skuldi

leggja fyri landsstýrið. Landsstýrið vrakaði uppskotið. Tað var serliga arbeiðstíðin og yvirtíðarlønir, sum ikki hóvaðu landsstýrinum. Hereftir vildu vit sjálvandi bert samráðast beinleiðis við løgmann ella landsstýrismenn. Pauli Ellefsen var løgmaður og umsat arbeiðsviðurskifti. Eilif Samuelsen var landsstýrismaður í skúlamálum, og Torbjørn Poulsen umsat fíggjarmál. Hóast Pauli hevði lønarmál, læt hann fyri tað mesta Eilif taka sær av sáttmálasamráðingunum. Sum formaður í Føroya Lærarafelag í 12 ár var Eilif vanur við lønarsamráðingar. Vit fundaðust javnan til skúlaárið endaði í juni 1983, tó uttan nakað úrslit.

Føroya Lærarafelag, sum hevði sáttmálasamráðingar um heystið 1983, kravdi eisini skylduga tímatalið sett niður, og tað eydnaðist. Vit sendu landsstýrinum nýtt uppskot 24.11.1983 við krøvum, sum líktust teimum, sum fólkaskúlalærarar høvdu fingið. Nakrir fundir skuldu til afturat, og loksins varð okkara fyrsti sáttmáli undirskrivaður sjálvan grækarismessudag 1984. Tað tók soleiðis 15 fundir og 15 mánaðir at fáa okkara fyrsta sáttmála við landsstýrið til høldar. Samanborið við í dag var tað kanska ikki so galið, tí nú fáa yrkisfeløgini sjáldan nýggjan sáttmála við landsstýrið, fyrr enn eitt ár ella longur aftan á, at tann gamli gekk út. Sáttmálan fekk gildi frá 01.03.1984 og kundi sigast upp til 01.10.1985. Vit vóru nøgd við sáttmálan, m.a. tí hann var betri enn GL-sáttmálin. Nú fingu bókavørðar, umsjónarfólk, umsitingarleiðarar og dagligir leiðarar tímaniðurskurð í staðin fyri viðbót. Og lærarar, sum ferðaðust millum fleiri undirvísingarstøð, fingu nú ferðatíðina roknaða inn í arbeiðstíðina.

Fyrsti sáttmálin varð sagdur upp at fara úr gildi 01.10.1985. Vit høvdu eingi beinleiðis høvuðskrøv til næsta sáttmála, men heldur at kalla nakrar stillingar til fyrsta sáttmálan. Og eftir bara fýra fundir varð nýggjur tvey ára sáttmáli undirskrivaður av Atla P. Dam løgmanni hin 25.10.1985.

Samráðingarnar um triðja sáttmálan í 1987 vórðu bæði drúgvar og truplar. Og hesa ferð mátti semingsmaður uppí. Okkara høvuðskrav var at fáa arbeiðstíðina setta ein tíma niður, tí Føroya Lærarafelag hevði fingið arbeiðstíðina niðursetta bæði í 1984 og í 1986 við tilsamans 1½ tíma, og harafturat hevði arbeiðsmarknaðurin fingið eina viku afturat í frítíð uttan lønarniðurskurð. Landsstýrið segði kortanei til, at longd frítíð á arbeiðsmarknaðinum skuldi ávirka okkara arbeiðstíð. Í skrivi til løgmann 10. november boðaðu vit frá, at vit vóru

fúsir at koma aftur til samráðingar, um landsstýrið vildi játta at samráðast um kompensatión fyri 5. feriuvikuna í rímiligari góðari tíð innan 01.08.1989, ella at spurningurin verður lagdur fyri ein gerðarrætt. Vit vildu hava svar innan 6 dagar, og landsstýrið varð eisini kunnað um okkara tiltøk. Tá ið einki svar kom frá landsstýrinum til ásettu tíðina, vórðu hesi tiltøk sett í verk:

a. 2. ársuppgávuvegleiðingin varð niðurløgd.
b. Alt nevndararbeiði, t.d. í próvtøkuuppgávunevndum, varð niðurlagt.
c. Eingir terminskarakterir vórðu skrivaðir.
d. Terminsroyndaruppgávur vórðu hvørki gjørdar ella rættaðar
e. Eingin átók sær vaktarhald við terminsroyndina.
f. Eingin átók sær fleiri undirvísingartímar, t.d. vikartímar.

Fyri ikki at forða næmingunum í at gera tiltøk, samtykti stýrið, at fráverur næminganna ikki skuldu førast. Á limafundi 14. desember var stórur meirluti fyri at fara í verkfall 4. januar 1988. Sama dag skrivaðu vit til landsstýrið og skutu upp at lata semingsmenn koma upp í samráðingarnar. Og 16. desember samdust partarnir um at velja Carl V. Weihe og Árna Absalonsen til semingsmenn. Seinnapartin dagin eftir byrjaði semingsfundurin. Hetta var ein hósdag og longu fríggjamorgunin kl. 6 eydnaðist at fáa semju um ein tvey ára sáttmála. Í semjuni vóru trý protokollat, har eitt viðvíkti arbeiðstíðini. Ein nevnd skuldi setast at greiða spurningin, og hon skuldi verða liðug við arbeiðið, áðrenn sáttmálin gekk út. Hesa uppgávuna greiddi nevndin. Men hetta hevur kanska ikki stóran áhuga longur, tí nú verður arbeitt við einum ársnormi.

*Felagshús*

YF var ikki gamalt, tá ið vit fóru at hugsa um at útvega okkum eini felagshús. Aftan á fleiri royndir eydnaðist í mai 1986 at keypa húsini hjá Hanusi í Skálavík frá arvingum Jenny og Jóannesi Simonsen. Húsini í Havn vóru eisini dýr tá, og kostaðu tey 1.020.000 kr. Handil hevði verið í kjallaranum, so høgt var til loftið. Í 1989/90 vóru húsini umvæld fyri 1 mió. og vóru sum nýggj. Frá november 1986 var húsið opið mána-, miku- og fríggjadag klokkan 15 – 17, men limirnir

nýttu ikki hendan møguleika so nógv. Samskifti millum limir og stýrið gekk fyri tað mesta fyri seg í skúlunum. Henda fasta skrivstovutíðin varð tí skjótt tikin av, og hevur felagið ongantíð havt fast skrivstovufólk.

*Onnur mál,*
sum stýrið og arbeiðsbólkar tókust við tey fyrstu árini, vóru t.d.: starvsfelagaviðtøkur, tryggingarspurningar, pedagogikum, at ummæla ymiss álit, at velja lim í Skúlabókagrunnin og setanarreglur fyri ikki-føroyingar. Eg haldi, at vit fingu nógv av skafti tey fyrstu 6 árini, men øll mál vóru sjálvandi ikki loyst, sum vit arbeiddu við, tá ið eg gavst í 1988.

## Yrkisfelagið Miðnám

Við Løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2012 um gymnasialar miðnámsútbúgvingar fóru studentaskúlar og hf-skeið í søguna saman við handilskúlunum og Fiskivinnuskúlanum. YF fór ikki beinleiðis í søguna, men í 2012 kastaðu Yrkisfelag studentaskúla- og hf-lærara og Lærarafelag Handilsskúlans saman í Yrkisfelagið Miðnám. Hetta var skilagott, og vil eg enda við at ynskja nýggja felagnum alt tað besta.

## Keldur

(í tekstinum verður víst til hesi skjøl soleiðis: [1) 2) 3) …])
Í kjallaranum í Hoydølum:

a) Svørt arkivmappa (25 x 35 cm) við 12 brævbjálvum við áskriftini Dokumenter: 1), 2), 3), 4), 5), 6), 7), 8), 9),15)

b) Lummi (charteque) við áskriftini Brævaskiftið við landsstýrið: [11), 18)]
Úr skjalasavninum hjá løgmansskrivstovuni: [10), 12), 13),14), 16), 17), 19), 20)]
Løgtingstíðindi 1941
Løgtingstíðindi 1961
Gerðabøkur, Kunningar og Formansfrágreiðingar hjá YF
Kunning frá Flemming Petersen í brævi dagf. 05.05.1982[21)].
Skúlablaðið 1980[22)]

# Føroya Tekniska Lærarafelag

Eyðgunn Samuelsen

Forsøgan til, at lærararnir á teknisku skúlunum í 1997 settu á stovn Føroya Tekniska Lærarafelag, er nær tengd at skúlasøguni og gongdini í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark. Undirvísing av handverkslærlingum var til fyrst í 1960'unum kring landið. Frálæran var um kvøldið eftir arbeiðstíð.

Í 1960-62 avgjørdu donsku skúlamyndugleikarnir, at tað bert skuldu vera tveir tekniskir skúlar í Føroyum. Um sama mundið varð byrjað at skipa skúlarnar sum dagskúlar. Henda skipan varð fult útbygd í 1964. Skipanin við forskúla til lærlingar kom í 1968/69. Skipanin gjørdi, at tørvur var á lærarum í fullum starvi. Áðrenn hetta vóru undirvísararnir tímalærarar úr vinnuni.

Tann fyrsti lærarin, ið bleiv settur í fast starv í Klaksvík, var Fischer Hansen. Hann byrjaði á skúlanum í 1971 og fekk fast starv í 1973. Setanin var sambært sáttmála við DTL, t.e. Dansk Teknisk Lærerforening. Skúlin var limur í Dansk Skolelederforening. Í 1975 vórðu Eyolv Joensen og Pól Kristian Henriksen settir í fast starv.

Tað, at skúlarnir vórðu skipaðir á henda hátt, við føstum lærarum og dag-undirvísing, gjørdi, at tørvur varð á skipaðum fakfelagsarbeiði. Lærararnir á Tekniska skúla í Klaksvík stovnaðu 3. mars 1979 lokalfelagið KTL (Klaksvíkar Tekniska Lærarafelag), ið var eitt lokalfelag undir DTL. Felagið var virkið til 1985. Í trý ár var einki virksemi; men 5. februar 1988 var aðalfundur í KTL, har nýggj nevnd varð vald. Eyðgunn Samuelsen gjørdist forkvinna, Hans Jacob á Kósini næstformaður og Bjørn Kastalag kassameistari. Nakað seinni kom eisini lokalfelagið í Havn, ið nevnist TTL.

Faklærarnir á skúlunum vóru limir í lokalu feløgunum, ið høvdu eina nevnd, ið hevði samskiftið við DTL um hendi. Limatalið í hesum báðum feløgum taldi tilsamans 24 limir, ávikavist 9 í Klaksvík og 15 í Havn.

## Blokkstuðulin

Tann 1. januar 1988 kom blokkstuðulin í gildi. Hetta gjørdi, at broytingar komu í sambandi við setanarmyndugleika og pensiónsviðurskifti.

Frá 1988 og frameftir vórðu lærarar settir í starv av Landsskúlafyrisitingini. Pensjónin skuldi gjaldast av Føroya Landsstýri. Higartil vóru lærarnir løntir sambært danska sáttmálanum og vóru limir í Erhvervsskolernes pensionskasse. Samgongan frá 1990 til 1994 hevði ta støðu, at hon ynskti ikki at samráðast um lønar- og sáttmálaviðurskifti við eina rúgvu av donskum fakfeløgum.

Hetta gjørdi, at deildirnar hjá DTL í Føroyum máttu brynja seg út til at átaka sær hesa uppgávu. Lokalu feløgini KTL og TTL fóru undir eitt meira miðvíst samstarv. Nevndarlimirnir í feløgunum fingu álitismannaútbúgving hjá móðurfelagnum í Danmark. Vald varð ein samráðingarnevnd við 4 fólkum, formanni og næstformanni úr KTL og TTL, hesi vóru: Eyðgunn Samuelsen og Hans Jacob á Kósini úr KTL og Petur Hentze og Herluf Simonsen úr TTL.

## Nýggj skúlaskipan

Samstundis setti táverandi landsstýriskvinnan í mentamálum, Marita Petersen, út í kortið, at skipast skuldu fleiri útbúgvingar á teknisku skúlunum. Støðisútbúgving innan tøkni, SIT, byrjaði í 1993. Árið eftir byrjaði hægri tøknilig útbúgving, HT. Arbeiðið við at skipa bygnað og innihald í hesum útbúgvingum var við til at gera, at samstarvið millum lærarnar á báðum skúlunum bleiv munandi tættari enn áður. Hetta arbeiðið var eisini við til at styrkja fakfelagið. Løn og arbeiðsviðurskifti máttu skilmarkast av nýggjum. Í Danmark vóru teknisku skúlarnir farnir yvir til eina nýggja skipan við ársnormi, meðan lærararnir í Føroyum fylgdu gamla sáttmálanum.

Fyrsti føroyski sáttmálin við ársnormi 1. januar 1994 undirskrivaðu vit okkara fyrsta føroyska sáttmála. Sáttmálin var galdandi fyri allar leiðarar og lærarar á teknisku skúlunum. Tað vil siga, at felagið eisini hevði samráðingarrættin fyri akademisku størvini, ið komu, tí at skúlarnir fóru undir SIT og HT útbúgvingingarnar. DTL hevði tá, sum nú, bert samráðingarrætt fyri faklærarar (handverkarar) og leiðslu á teknisku skúlunum.

Vit mettu tað hava stóran týdning, at vit vóru savnað í sama felag, bæði fyri styrkina í felagnum og at løn og arbeiðstíð fylgdu somu meginreglum uttan mun til, um ein var handverkari, verkfrøðingur ella hevði aðra akademiska útbúgving. Í Danmark var støðan tann á teknisku skúlunum, at DTL hevði samráðingarrættin

fyri faklærarnar, meðan AC (Akademikernes Centralorganisation) samráddist vegna akademikararnar.

## Meginreglur í sáttmálanum

Sáttmálin var bygdur upp eftir leistinum við ársnormi. Tað vil siga, at í høvuðsheitum verða allar arbeiðsuppgávur skilmarkaðar og hava við sær tímar at útinna arbeiðsuppgávurnar. Arbeiðstíðin var sett til 2080 arbeiðstímar (klokkutímar), og tá ið frítíðin var drigin frá, var ársnormurin 1814 tímar. Í dag er hann 1790 arbeiðstímar (3 eyka frídagar).

Í prinsippinum vóru 230 tímar pr. lærara avsettir til aðrar uppgávur enn undirvísing. Hesir tímar vórðu býttir soleiðis, at teir 100 tímarnir áttu allir lærarar til lærarafundir og aðrar uppgávur, ið ikki skuldu skjalprógvast. Hartil fekk skúlin so 130 tímar pr. ársverk. Hesir vórðu ikki lutaðir út til hvønn einstakan lærara, men skuldu nýtast til ymiskar defineraðar arbeiðsuppgávur, og tí kundu teir falla ymiskt. Endamálið við hesum var, at lærarar, ið høvdu hug til at arbeiða meira við øðrum námsfrøðiligum uppgávum enn beinleiðis undirvísing, kundu fáa meira enn 130 tímar av hesi pulju, meðan teir, ið „bert" ynsktu at undirvísa, undirvístu tað meir.

Viðvíkjandi setanum, so lat sáttmálin upp fyri, at øll framtíðarstørv vórðu sáttmálasett við 15% eftirløn, ið kom omaná lønina. Higartil vóru allar setanir tænastumannalíknandi við eftirløn í Erhvervsskolernes pensionskasse.

Tá ið sáttmálin varð undirskrivaður, fingu vit borið so í bandi, at samráðingarnevndin og lønardeildin fóru í felag gjøgnum sáttmálan á fundi, har tey samdust um, hvussu sáttmálin skuldi umsitast. Hetta stig hevur uttan iva verið við til, at so fáar ósemjur hava verið øll árini um sáttmálan. Sáttmálin er í høvuðsheitum óbroyttur enn í dag.

## Onnur viðurskifti í sambandi við nýggja sáttmálan

Fyrst í áttatiárum varð setanarsteðgur settur í verk á teknisku skúlunum í Danmark. Hetta hevði havt við sær, at fleiri lærarar í Føroyum heldur ikki kundu setast í fast starv og tískil heldur ikki fáa nakra eftirløn.

Í sambandi við samráðingar um føroyskan sáttmála var eitt krav hjá okkum, at hesir lærarar fingu skipað viðurskifti. Sum ein partur av semjuni um sáttmála,

gjørdist úrslitið, at teir fingu setanarbræv og eftirløn eins og lærarar í føstum starvi. Hetta skuldi koma í gildi frá tí degi. ið teir byrjaðu at undirvísa á skúlanum.

## Verkfall í tríggjar vikur

Hin 1. januar 1993 hevði felagið saman við flestu feløgunum á almenna arbeiðsmarknaðinum gjørt avtalu við landsstýrið um ein lønarniðurskurð á 8,5%. Henda avtala skuldi vara árið út, men landsstýrið longdi avtaluna við lóg at galda til 1. mars 1995.

Í sambandi við sáttmálasamráðingar í 1995 vóru vit ein sjálvstøðugur partur av fakfelagssamstarvinum. Tað vóru tá 21 feløg á almenna arbeiðsmarknaðinum. Hóast vit samráddust sjálv, so hildu vit okkum til tey krøv, ið hesi feløg høvdu. Høvuðskravið hjá øllum feløgunum var at fáa lønarniðurskurðin frá 1993 aftur. Landsstýrið kravdi hinvegin, at lønarniðurskurðurin helt fram.

Úrslitið var, at vit fyri fyrstu ferð í søgu felagsins, fóru í verkfall á vári 1995 saman við hinum fakfeløgunum. Hetta gjørdu vit, hóast meginparturin av okkara limum var í tænastumannalíknandi starvi. Í praksis var hetta loyst við, at hesir lærarar møttu til arbeiðis, meðan sáttmálasettu lærararnir vóru í verkfalli. Tískil var skúlin stongdur tær tríggjar vikurnar, ið verkfallið vardi.

Hetta, at vit lýstu verkfall, hóast meginparturin av liminum vóru í tænastumannalíknandi størvum, hevði eitt sindur av tvídrátti við sær millum samráðingarnevndina í Føroyum og móðurfelagið DTL. Tvídrátturin var um lønarendurgjald í sambandi við verkfallið. Tað eydnaðist tó at finna eina semju, so at allir limir fingu sama útgjald.

Í kjalarvørrinum av verkfallinum gjørdi felagið eina avtalu við Mentamálaráðið um, hvussu undirvísingartímarnir í verkfalstíðini vórðu lisnir innaftur, og hvussu hesir tímar skuldu samsýnast. Hetta varð gjørt á tann hátt, at próvtøkurnar kundu haldast sama summar.

## Hóttanir um hópuppsagnir á TST

Eitt annað stríðsmál, ið samráðingarnevndin kom at standa á odda fyri at loysa í tøttum samstarvi við DTL, var fráboðan frá stjóranum á Tekniska skúla í Havn um uppsøgn av 7 lærarum í 1993. Grundgevingin fyri hesar hópuppsagnir var sambært leiðslu skúlans minkandi virksemi á skúlanum.

Felagið samráddist við stýri og leiðslu skúlans. DTL stóð fyri samráðingunum. Tað eydnaðist at fáa leiðslu skúlans at taka allar uppsagnirnar aftur, tí vit kundu prógva, at virksemið ikki var minkað so nógv, at hesir lærarar máttu fara úr starvi.

## Stovnanin av FTL

Eftir, at vit høvdu fingið føroyskan sáttmála, kjakaðust vit leingi um, hvussu okkara felag skuldi skipast frameftir. Tosað var um at loysa heilt við DTL og fáa okkara part av verkfalsgrunninum við í nýggja felagið á sama hátt, sum studentaskúlalærarnir høvdu gjørt, tá ið YF varð stovnað. Flestu limir ynsktu eitt sjálvstøðugt felag; men hildu samstundis, at felagið bleiv ov lítið og veikt í mun til arbeiðsgevaran, um felagið kvetti heilt við DTL.

Endin var, at samtykt varð at stovna FTL 20. september 1997 og at gera eina samstarvsavtalu við DTL. Lógin fyri FTL ásetti, at nevndin skuldi setast saman soleiðis, at formaður og næstformaður í KTL og TTL skuldu manna nevndina í FTL. Í fyrstu nevndini í FTL vóru hesi vald: Eyðgunn Samuelsen, forkvinna, Petur Z. Hentze næstformaður. Jákup Pauli Joensen og Herluf Simonsen vóru nevndarlimir.

Samstarvsavtalan merkti, at limirnir í FTL varðveittu eitt slag av hvílandi limaskapi í DTL. FTL skuldi gjalda eina ávísa upphædd pr. lim til DTL, afturfyri kundi nevndin í FTL fáa juridiska og aðra hjálp frá DTL, eins og limir tess framvegis vóru partur av verkfalskassanum hjá DTL. Samstarvsavtalan, ið varð undirskrivað í 1997, er dagførd nakrar ferðir; men er framvegis galdandi í dag.

Í dag er DTL lagt saman við fleiri feløg, ið tilsamans nevnist Uddannelsesforbundet. Limatalið í DTL var 3.500. Uddannelsesforbundet telur 10.500 limir. Samstarvsavtalan millum FTL og DTL er nú millum FTL og nýggja felagið tann sama sum við DTL (3.500 limir, nú 10.500). Í dag eru 65 limir í FTL. Nevndin í felagnum er henda: Jørgin Vágslíð formaður og Jeffri Olsen er næstformaður. Hini eru: Sjúrður Sólstein, Hanna Z. Hansen, Sigurd Vatnhamar og Jógvan Martin Djurhuus.

# Brot úr søguni um Lærarafelag Handilsskúlans

Tórður Johannnesarson

## LH verður stovnað

1. januar 1988 bleiv danski statsstuðulin til Føroyar til blokkstuðul. Inntil tá vóru danskar reglur og danskir sáttmálar galdandi á yrkisskúlunum. Men við blokkstuðlinum skuldu føroyskir myndugleikar standa fyri, hvussu blokkstuðulin bleiv brúktur. Ein avleiðing av hesum var, at landsstýrið vildi hava føroyskar sáttmálar, og tað vildi ikki samráðast við donsk fakfeløg. Hetta hevur helst gjørt sítt til, at LH varð stovnað. Nakrir handilsskúlalærarar høvdu frammanundan verið limir í danska felagnum HL.

LH bleiv stovnað 19. mai 1989. Á stovnandi aðalfundinum vóru Olav Absalonsen, Holger Arnbjerg, Bo Warberg, Annfinnur Zachariassen, Ragnar Magnussen, Sonja á Oyrabø, Terji á Lakjuni, Gloria Kalsø, Katrin Zachariasen, Mina Reinert, Klæmint Olsen, Martha Dalsgaard, Niklas Rasmussen. Árant Olsen og Tórður Jóansson vóru ikki á fundinum; men teir skrivaðu undir aftaná, og tað var galdandi sum innliman.

Limirnir komu úr handilsskúlunum í Havn og í Eysturoy. Í Havn hevði dagskúli verið eina tíð. Deildin í Fuglafirði fór at virka sum dagskúli í august 1989. Bygningurin á Kambsdali var ikki liðugur tá, og tey fluttu út á Dal eftir nýggjár 1990. Tríggir av lærarunum har høvdu starvast í Havn og vóru limir frammanundan. Og nýggir lærarar komu uppí so hvørt.

Olav Absalonsen skrivaði eitt uppskot um viðtøkur, sum bleiv lagað til eftir ráðgeving frá øðrum, eitt nú Klæminti Olsen, sum altíð var kritiskur og góður í ráðum, og frá Tórði Jóanssyni, ið hevði avgjørdar, men væl undirbygdar meiningar um, hvat skuldi standa í slíkum viðtøkum. Viðtøkurnar vóru einmælt samtyktar á stovnandi aðalfundinum.

Í fyrstu nevndini vóru Terji, Katrin og Olav. Í byrjanini vóru bara trý í nevndini, seinni bleiv nevndin víðkað til 4 limir. Olav Absalonsen var fyrsti formaðurin í LH. Heilt frá byrjan varð tosað um samanlegging av YF og LH. Fleiri fundir

vóru eisini í nítiárum um samanlegging millum YF og LH; men tíðin var ikki búgvin tá um stamstarv.

## Samráðingarrætturin kom at standa sína roynd

Samráðingarrætturin var ikki nakar trupulleiki tey fyrstu árini. Spurningurin um samráðingarrættin kom at standa sína roynd á heysti í 1996, tí at Føroya Handilsskúli royndi at seta lærara í starv eftir sáttmála, ið hinir lærararnir ikki gingu eftir. Tíbetur sat ein sterk nevnd í LH. Klæmint Olsen sáli var formaður hesa tíðina. Hann var fakfelagsmaður um ein háls. Hann var bæði gløggur og treiskur. Saman við Olavi, Fritleifi og øðrum, sum eisisni sótu í nevndini, vardi hann borg. Støðan var ikki sørt ørkymlandi fyri allar lærarar. Nevndin fyri Føroya Handilsskúla (tá sat ein nevnd, ikki sum nú eitt stýri) setti lærarar í starv sambært reglugerð skúlans. Men nevndin hevði útdelegerað hesa heimild til eina starvsnevnd, sum síðani hevði útdelegerað hana til stjóran. Motivið fyri hesi framferð var, at so fekk starvsfólkaumboðið í nevndini einki at vita um, hvat gekk fyri seg, og hevði ongan møguleika at tala at. Men starvsfólkini høvdu eitt vakið umboð, sum eisini var í LH-nevndini. Hann legði til merkis, at starvssetanir vóru ikki á skránni í nevndini, og heldur ikki í starvsnevndini, tí fundarfrágreiðingar frá starvsnevndini skuldu lesast upp í høvuðsnevndini, og har hevði einki verið nevnt um tað.

LH kærdi skúlan til Landsskúlafyrisitingina, sum tók ta støðu, at starvssetanir, sum vóru útdelegeraðar, vóru ólógligar: Tá ið tað stendur positivt í viðtøkunum, at nevndin setir lærarar, kann henda heimild ikki útdelegerast. Setanirnar máttu tí gerast av nýggjum, men skúlaárið var meira enn hálvrunnið, og tey settu vóru helst í góðari trúgv. Tí bleiv henda viðgerð eitt sindur surrealistisk, men eftir hetta var eingin, sum ivaðist um samráðingarrættin hjá LH.

Henda hendingin vísir, hvussu umráðandi tað er, at hava starvsfólkaumboð í stýrinum (tað, sum fyrr kallaðist nevnd) uttan atkvøðurætt fyri at skapa opinleika um tað, sum fer fram. At starvsfólkaumboðið fekk atkvøðurætt í 1999 var eitt stórt afturstig, tí tað gjørdi, at umboðið fór upp í stýrið sum vanligur limur, og høvuðsendamálið við starvsfólkaumboðnum at skapa opinleika og gjøgnumskygni fánaði burtur.

## Sáttmáli við Fíggjarmálastýrið – eitt drúgt stríð

Tað gekk felagnum sera striltið at fáa sáttmála í lag við Fíggjarmálastýrið. Einaferð undir kreppuni fyrst í 90'unum varð nevndin boðin á fund úti í Tinganesi. Nevndarlimirnir blivu spurdir, um teir eins og hini feløgini vildu fara 8% niður í løn. Nevndin segði nei takk, tí at pensiónirnar hjá lærarunum vóru ikki komnar upp á pláss, og at spurningarnir áttu at verið viðgjørdir í rættari røð. Tí var eingin meining at siga ja til tilboðið. So hendi ikki meira í tí umfarinum. Eftir nøkur ár í bíðistøðu, har landsstýrið ikki hevði tíð ella orku at samráðast, hevði nevndin fyrsta samráðingarumfar mitt í 90árum. Lítið kom burturúr, tí mótparturin visti ikki, hvat var galdandi, og hann hevði krav um, at limir í LH skuldu byrja frá null, og at teir ikki frammanundan høvdu rætt til pensión. Í 1996 var tó avtalað, at LH skuldi gera eitt uppskot til sáttmála, og at landsstýrið skuldi fáa pensiónirnar upp á pláss. Uppskot til sáttmála fekk Fíggjarmálastýrið í februar 1998, men tað vísti seg, at tey høvdu einki gjørt við pensiónsspurningin. Partarnir samráddust kortini við støði í uppskotinum hjá LH.

Á heysti 1999 trúðu nevndarlimirnir, at semja var komin undir land, tó at mótparturin framvegis einki hevði gjørt við pensiónirnar, sum annars var ein treyt frá LH. Tá krevur mótparturin knappliga stórar broytingar í arbeiðsviðurskiftum hjá limum felagsins við nýggjum arbeiðstíðarreglum. Nevndin mælti frá hesum, tí tað hevði stóran týdning at fáa staðfest verandi viðurskifti. Í byrjanini av 2000 fekk nevndin eitt uppskot sendandi, sum hvørki var fuglur ella fiskur, til dømis lønarniðurskurð upp á 20-30% – helst fyri at fáa pláss til pensiónirnar. Eftir at hava víst á, at limir í LH ikki kundu góðtaka uppskotið, boðaði nevndin frá, at samráðingarumstøðurnar nú vóru so nógv broyttar, at hendi einki á pensiónsøkinum, fór felagið at stevna eftir pensiónunum. Einki hendi, og nevndin stevndi fyri teir limirnar, sum eftir blokkin vóru settir í tænastumannalíknandi størv sambært kunngerð.

## Ein politisk bumba

Tíðliga á heysti 2001 gjørdi nevndin við Olavi á odda av at fara til hægsta myndugleika og bóðu um fund við løgmann fyri at vísa á, at limir felagsins í

áravís hava roynt at fáa ein einfaldan sáttmála, men til fánýtis. Nevndin hevði alla tíðina víst góðan vilja, men mótparturin útsetti og útsetti. Nevndarlimirnir vístu á, at teir høvdu víst tol og høvdu ikki hug at leypa framav, men at mark var fyri, hvussu leingi nevndin kundi sannføra limirnar um, at hon var á rættari kós. Á fundinum við løgmann var yvirtøkan av handilsskúlanum til umrøðu, sum nevndin metti at vera sjusk. Lønar- og setanarøkið var ikki tikið í álvara, og pensiónsmálið var vorðið risastórt – einar 15 milliónir máttu útvegast. Talan var sostatt um eina politiska og fíggjarliga bumbu. Løgmaður ásannaði hetta, og ætlaði hann at tosa við avvarðandi landsstýrismann. Eisini segði hann, at sjálvsagt átti handilsskúlin í minsta lagi at fylgja starvsfólkapolitikki landsins.

## Tiltøk verða sett í verk

Í november 2001 var ein rokmikil aðalfundur í LH. Tað var líkasum, at nú var tolið hjá limunum uppi. Nevndin hevði ikki nakran sáttmála við landsstýrið, og síðani fyrst í 1990-unum vóru starvssetanirnar ógreiðar, serliga við pensiónsviðurskiftunum. Myndugleikarnir høvdu viðurkent pensiónsrættindi til tey, sum høvdu ógreiðar setanir; men so søgdu teir knappliga, at hetta var ein samráðingarspurningur. Hetta síðsta var ein stór avbjóðing fyri báðar samráðingarpartarnar. Lærarar høvdu í mong ár arbeitt uttan pensiónsgjøld, og um hetta skuldi fáast í lag við afturvirkandi kraft, skuldi eykajáttan til.

Skúlaárið 2001-2002 var ein hørð tíð hjá nevndarlimunum í LH. Nevndin hevði sera gott arbeiðslag og legði dent á, at ósemjur millum nevndarlimir vóru viðgjørdar í nevndini, og tá ið ein avgerð var tikin, fóru tey út sum ein maður. Loyalitetur var ein sjálvfylgja. Kalpana Vijayavarathan kom upp í nevndina í november 2001. Hon var full í orku og áræði, og tað gav nevndini handlikraft, sum var neyðug hesa tíðina við áhaldandi ágangi móti limunum í felagnum.

Av tí at felagið einki hoyrdi frá Fíggjarmálastýrinum, setti nevndin tiltøk í verk í desember 2001, tá ið hon sendi kæru til løgmann og fíggjarmálaráðharra um álitisbrot í samráðingunum. Í januar 2002 noktaði nevndin limunum, sum vóru í uppgávunevndum, at útflýggja uppgávurnar til Mentamálastýrið. Somuleiðis varð noktað limunum at vera próvdómarar til próvtøkur í árshálvuni januar-juni 2002. Vanliga arbeiðið bleiv ikki niðurlagt. Samstundis stevndi LH

landsstýrið eftir pensiónum til tey, sum vóru sett í tænastumannlíknandi størv eftir 1. januar 1988 (sokallaði 13-bandin).

Undir arbeiðssteðginum hildu samráðingarnar fram, og hóast lagið var heldur øðrvísi enn áður, so var kravið frá mótpartinum framvegis nýggjar arbeiðstíðarreglur, men samstundis hevði Fíggjarmálastýrið einki gjørt við pensiónirnar. Tá ið ein tíð var liðin á vári 2002, boðar Fíggjarmálastýrið knappliga frá, at pensiónirnar skulu fáast upp á pláss við løgtingslóg, men tá var freistin at leggja uppskot fyri tingið júst farin.

## Nokta at hátíðarhalda yvirtøku av skúlaverkinum

Í mars 2002 skrivaði landsstýrismaðurin í mentamálum til skúlarnar um at hátíðarhalda yvirtøkuna av skúlaverkinum. Hetta fall saman við, at val skuldi vera í apríl 2002. Møguliga royndi táverandi landsstýrissamgonga at profilera seg við hesum. Hetta var meðan arbeiðssteðgurin hjá LH var, og nevndin nýtti hetta høvi at gera vart sína ónøgd, tí tað vóru júst hesar sokallaðu yvirtøkur, ið høvdu ført lærarar á handilsskúlunum út í óføri, tí tær vóru ikki nóg væl frágingnar. LH-nevndin sendi tíðindaskriv til fjølmiðlarnar, sum endaði soleiðis:

> *Heimastýrið yvirtók blokkin og sveik sínar skyldur, og tað ætlar landsstýrismaðurin í mentamálum, at handilsskúlalærarar skulu hátíðarhalda. Men tað verður av ongum!*

Dagin eftir valið, sum Sambandsflokkurin kom væl frá, gav ein rithøvundur ilt av sær í bløðunum og spurdi, hvør vann valið. Hann svaraði sjálvur og langaði út eftir ymsum samfelagsbólkum. Ein av hesum vóru lærararnir á handilsskúlunum, sum ikki vildu hátíðarhalda yvirtøkuna: „Tey krapylini vunnu valið!“, skrivaði hann.

## Næmingar mótmæla

Á vári í 2002 mótmæltu næmingarnir, ið skuldu hava endaligt HH-prógv. Av ókendum orsøkum vóru næmingar á Kambsdali illir inn á LH, og teir møttu upp á einum limafundi, sum LH helt í Havn, at mótmæla, men eingir næmingar í

Havn vóru har, hóast fundurin varð hildin í hølunum hjá Føroya Handilsskúla. Hinvegin høvdu næmingarnir í Havn verið úti í Fíggjarmálastýrinum á Argjum og handað landsstýrismanninum eitt mótmæli. Kanska var hetta seinna við til at loysa málið?

## Trýstið økist

So hvørt sum próvtøkan nærkaðist, øktist trýstið á allar partar, og tað var ikki sørt, at fjáltur kom á fólk. Tíðindi bórust um hóttanir um hópuppsagnir av øllum lærarum; men tað gjørdi, at nevndarlimirnir blivu bara meira avgjørdir í, at arbeiðssteðgurin skuldi halda fram.

Í tøkum tíma fyri próvtøkuna fekst semja millum felagið og Fíggjarmálastýrið; tað var 3. mai 2002. Løgtingsval hevði verið fáar dagar frammanundan, og politiska skipanin var sett undir trýst, tí vandi var fyri, at nógvir handilsskúlanæmingar ikki fóru at fáa HH-prógv.

Í semjuni bant landsstýrið seg til, at lærarar, sum annars lúka treytirnar í komandi sáttmála fyri at fáa eftirlønargjald, fáa hetta við afturvirkandi kraft frá setan, og harumframt viðurkendi landsstýrismaðurin eftirlønarrættin hjá 13 navngivnum persónum, og landsstýrismaðurin skuldi skipa fyri, at hesin eftirlønarrættur varð teimum tryggjaður við fyrivarni fyri, at neyðug lóggáva varð samtykt. Felagið játtaði afturfyri at steðga sakarmálinum móti landsstýrinum og at fara í gongd við at gera próvtøkuuppgávurnar, sum skuldu brúkast í mai/juni sama summar.

## Nýggjur sáttmáli í 2004

Í 2004 varð nýggjur sáttmáli undirskrivaður. Táverandi nevnd gjørdi semju við landsstýrið um, at pensiónsgjaldið skuldi vera 5% við afturvirkandi kraft frá 1. januar 1988; men frá 1. august 2004 skuldi tað vera 15,8%. Ein kann siga, at nógv var givið eftir av tí, sum sambært semjuni í 2002 skuldi vera ein pensión eftir komandi sáttmála. Tá ið vanliga pensónsgjaldið bleiv 15,8%, eru 5% afturvirkandi ikki nógv. Við hesum mistu nakrir limir umleið 5,7 milliónir í pensiónsgjøldum, sum teir høvdu vunnið.

## LH tikið av

Sum sagt, so høvdu fundir verið í fleiri umførum síðani 1990 millum YF og LH um samanlegging; men tíðin var ikki búgving fyrr enn í 2012. Samstundis varð LH tikið av. Nú eru flestu lærarar á studentaskúlunum, fiskivinnuskúlanum og handilsskúlunum limir í YF miðnám.

## Keldur

Skjøl frá fyrrverandi nevndarlimum í LH
Samrøður við fyrrverandi nevndarlimir í LH

# Fiskivinnuskúlin 25 ár á baki

Jákup Andreasen

**Fiskivinnuskúlin, sum byrjaði í 1989, fekk eina trilvandi byrjan. Skúlin byrjaði sum ein yrkisskúli, sum skuldi útbúgva starvsfólk á millumleiðarastigi til fiskavirkis- og alivinnuna, men í dag er skúlin ein studentaskúli í nýggju gymnasialu breytaskipanini.**

Í fyrru helvt av 80-unum varð dúgliga kjakast um at seta á stovn fiskivinnuundirvísing og fiskivinnuútbúgving í Føroyum. Politiska ynskið var, at ungdómurin skuldi fáa betri kunnleika til føroysku høvuðsvinnuna, og at tey ungu skuldu kunna fáa útbúgving á økinum.

Frammanundan vóru fleiri smærri royndir gjørdar at fáa gongd á fiskivinuundirvísing. Í 1968 kundu næmingarnir í 8. og 9. flokkunum velja fiskivinnu sum vallærugrein. Í 1971 samtykti landsstýrið at skipa fyri styttri skeiðum í fiskavirking á Klaksvíkar Sjómansskúla. Í 1974 setti Fróðskaparsetrið við góðkenning frá landsstýrinum eina nevnd, sum skuldi gera uppskot til eina millumteknikaraútbúgving á fiskivinnuøkinum. Onki spurdist tó burtur úr hesum ætlanum.

Í 1974 gjørdist fiskivinna vallærugrein í HF-útbúgvingini og í 1978 í HH-útbúgvingini á Handilsskúlanum. Í árunum 1979 til 1981 arbeiddi Tekniski Skúli í Tórshavn við ætlanum um at skipa eina útbúgving av fiskavirkingaratstøðarum, sum heldur onki spurdist burturúr. Í 1983 gjørdist fiskivinna lærugrein í FHS-útbúgvingini á Handilsskúlanum.

## Fiskivinnuskúlin verður fyrireikaður

Í 1982 fekk Landsskúlafyrisitingin álagt at fara undir fyrireikingar, so ein fiskivinnuútbúgving kundi setast á stovn í Føroyum. Sama árið setti landsskúlastjórin eina nevnd at arbeiða við uppskoti um fiskivinnuútbúgvingar. Nevndin, sum varð mannað við fólki frá Landsskúlafyrisitingini og vinnufeløgum, legði fram álit í september 1983.

Álitið frá nevndini gjørdist grundarlag fyri løgtingslóg um Føroya yrkisskúla fyri fiskaídnað og havbúnað frá 5. mai 1987, sum skúlin í veruleikanum altíð hevur itið. Í oktober 1988 varð lýst eftir skúlastjóra og umsitingar- og praktikkleiðara. Bæði størvini vóru sett um ársskiftið 1988-1989.

## Ongin skúlabygningur

Fyrstu tíðina hevði skúlin ongi høli, og tí starvaðist skúlaleiðslan á Landsskúlafyrisitingini teir fyrstu mánaðirnar.

Landsstýrið hevði gjørt av, at skúlin skuldi byrja sítt virksemi í Vestmanna, og tí var neyðugt at finna egnaði høli til nýggja skúlan. Hetta var ikki nøkur løtt uppgáva, tí hóskandi høli vóru ikki til. Á vári 1989 keypti landið eini stór sethús, sum skuldu umbyggjast til skúlabrúks. Umbyggingin tók longri tíð enn væntað, men fyrst í september mánaði 1989 var komið so mikið áleiðis, at til bar at taka ímóti fyrstu næmingunum.

Skjótt gjørdist ov trongligt í hesum húsunum, og sum fráleið leigaði skúlin trý sethús afturat fyri at kunna húsa øllum næmingunum.

## Útbúgvingarbygnaður

Stórur áhugi var fyri at søkja inn á skúlan í byrjanini, og fyrsta árið søktu um 60 næmingar. 36 vórðu tikin inn, og tá avtornaði møttu 27 næmingar. Hesi vórðu skipað í tveir flokkar. Teir næmingarnir, sum høvdu í minsta lagi tvey ára vinnulívsroyndir gingu støðisárið á skúlanum og hildu so fram eitt ár afturat á skúlabonki, áðrenn tey fingu prógv. Tey, sum ikki luku treytina um vinnuroyndir, gingu trý ár í skúla, har tey vóru í starvsvenjing tað mittasta árið. Fiskavirki, alibrúk og onnur virki tóku væl ímóti næmingunum, sum høvdu tørv á starvsvenjing.

Longu í 1992 varð útbúgvingarbygnaðurin broyttur. Tá varð starvsvenjingarárið strikað, og útbúgvingin skipað við einum støðisári og síðan tvey ára skúlagongd burturav. Á próvnum hjá næmingunum stóð „Fiskivinnutøkningur'

Lærugreinarnar hjá næmingunum, sum byrjaðu í 1994, vórðu á fyrsta sinni skipaðar í gymnasialu stigaskipanini. Tá hesi fingu prógv í 1997 varð heitið á próvnum „Prógv í hægri fiskivinnuútbúgving' Frá 1994 kundu næmingarnir eisini

velja eina tvey ára atstøðisútbúgving í fiskivinnu, sum var meira praktiskt rættað. Bara fáir næmingar valdu henda møguleika, og seinni varð atstøðisútbúgvingin tikin av.

Um ár 2000 fekk skúlin áheitan frá vinnuni um at skipa yrkisútbúgvingar innan fiskavirking og aling. Skúlin legðist ikki á boðini og farið varð undir at skipa neyðuga grundarlagið. Teir fyrstu lærlingarnir byrjaðu á skúlanum í 2002. Yrkisútbúgvingarnar tóku góð trý ár, og vóru skipaðar við skúlagongd fyrsta árið. Annað árið vóru lærlingarnir á læruplássinum, og triðja árið varð skift ímillum lærupláss og skúla. Seinni skipaði skúlin eisini yrkisútbúgvingar innan landbúnað og fiskireiðskap – serliga trol, men áhugin fyri hesum útbúgvingum var lítil og ongin.

Sjálvt um vinnuvirkini søgdu seg hava stóran áhuga at seta lærlingar í eini kanning frammanundan, so vísti áhugin seg at vera lítil, tá avtornaði. Næmingarnir vístu seg heldur ikki at hava stóran áhuga fyri hesum nýggja tilboðnum. Teir seinastu lærlingarnir vóru lidnir á skúlanum í 2010.

Seinastu árini hevur trý ára gymnasiala útbúgvingin verið tann berandi parturin av Fiskivinnuskúlanum. Umsøkjaratalið hevur verið svingandi og var serliga lágt um ár 2000. Seinnu árini hevur umsøkjaratalið verið rættiliga støðugt og hevur ligið um 30-40 umsóknir hvørt árið. Av hesum eru einir 22-26 næmingar byrjaðir á skúlanum.

Í 2013 gjørdist útbúgvingin á Fiskivinnuskúlanum partur av nýggju gymnasialu breytaskipanini, og næmingarnir ganga á tilfeingisbreytini. Nýggja breytin er serliga lagað til føroyska samfelagið og ætlað teimum, sum hava áhuga fyri náttúru, náttúrutilfeingi, umhvørvi og burðardyggari nýtslu av livandi tilfeinginum. Teir fyrstu næmingarnir á tilfeingisbreytini taka prógv í 2016.

Skúlin hevur í fleiri umførum skipað fyri skeiðum til vinnuna, m.a. skeiðum til alivinnuna og í innaneftirliti og matvørutrygd.

## Royndir at bøta um hølistørvin

Hølisviðurskiftini hjá skúlanum vóru út av lagi vánalig frá byrjan, men royndir vórðu gjørdar at útvega skúlanum frægari høli.

Í skrivi til skúlamyndugleikarnar í 1997 mælti skúlin til at leiga ein part av eini virkishøll í Vestmanna. Hølini vóru partvíst innrættað, men neyðugt

var at umbyggja og byggja afturat inni í høllini, um hetta skuldi vera nøktandi loysn. Tingast var aftur og fram um leigu, keyp og treytir, men ætlanin gjørdist av ongum.

Í 2000 setti Signar á Brúnni, táverandi landsstýrismaður, limir í nevnd við breiðari umboðan fyri føroysku fiskivinnuna at gera álit um útbúgvingar innan fiskivinnuna. Í álitinum frá nevndini varð mælt til at seta á stovn fiskivinnu- og havbúnaðarmiðstøð við eini útbúgvingareind (sum m.a. fevndi um verandi fiskivinnuskúla), eini menningareind og eini kunningareind.

Á løgtingsfíggjarlógini og í eykafíggjarlóg í 2002 vórðu pengar settir av at keypa høllina í Vestmanna og at innrætta bygningin til skúlabrúks. Partarnir samdust um keypsprísin, men Mentamálaráðið legði ávísar treytir við keypinum. Byggiumsitingin hjá landinum varð síðan biðin um at kanna bygningin og undirlendið. Tá avtornaði mælti byggiumsitingin frá at keypa bygningin til ætlaða endamálið. Tí gjørdist keypið av ongum.

## Nýggjur skúli í 2009

Í juli 2002 setti Óli Holm, landstýrismaður nevnd at gera álit um hølisviðurskiftini hjá Fiskivinnuskúlanum. Nevndin læt landstýrismanninum álit í januar 2003, har mælt varð til at byggja nýggjan skúla og sjódepil í Vestmanna. Nevndin mælti til at byrja við at byggja sjálvan skúlan sum 1. byggistig. Fyrra stigið skuldi fevna um 1200 fermetar og varð mett at kosta um 22 mió. kr í dagsins prísi.

Seinni varð mælt til at byggja um 1000 fermetrar afturat til sjálvan sjódeplin. Hetta seinna byggistigið, sum í stóran mun skuldi vera ein tænastumiðstøð til vinnuna, gjørdist tó ongantíð veruleiki.

Í november 2003 setti Annita á Fríðriksmørk, landsstýriskvinna bygginevnd at fyrireika bygging av nýggum skúla. MAP-arkitektar vórðu valdir at fyrireika byggingina. Arkitektarnir mæltu í fyrstu syftu til at byggja 1550 fermetrar fyri 27,3 mió. kr. Bygningurin var væl størri, og prísurin væl hægri, enn hølisnevndin frammanundan hevði mælt til. Tí varð skorið í hølisskránni, og bygningurin minkaður til góðar 1200 fermetrar.

Hetta uppskotið fekk undirtøku í Mentamálaráðnum, og í mai 2005 samtykti Løgtingið í verklagslóg at heimila bygging av nýggjum skúla fyri í mesta lagi 22 mió. kr. Gamla kostnaðarmetingin frá 2003, sum heldur ikki var serliga neyv,

vísti seg skjótt ikki at halda, hóast roynt var at spara. Tí varð skúlabyggingin boðin út heilar fýra ferðir, áðrenn tað eydnaðist at fáa skúlan bygdan. Tá hevði Løgtingið játtað 29 mió. kr. tilsamans til sjálvan skúlabygningin.

Í juni 2007 varð byggisáttmáli undirskrivaður við M.T. Højgaard, og í mars 2009 flutti skúlin inn í nýggjan og stásiligan skúlabygning á ferjuleguni í Vestmanna.

## Samanumtøka

Fiskivinnuskúlin hevur nú virkað í 25 ár. Hølisviðurskiftini hjá skúlanum vóru ógvuliga vánalig tey fyrstu 20 árini, men hetta broyttist munandi, tá nýggi skúlin varð tikin í brúk. Flestu næmingarnir, sum tóku prógv á skúlanum fyrstu árini, vóru tilkomin fólk, sum brúktu prógvið til at finna sær starv í vinnuni. Síðst í 90-unum minkaði umsøkjaratalið. Fá av teimum, sum tóku prógv á skúlanum fyrstu árini, fóru undir víðari útbúgving.

Síðan er umsøkjaratalið vaksið nógv aftur, og nú eru tað í flestu førum ungdómar, sum koma á skúlan at taka eina gymnasiala útbúgving. Flestu teirra ætla sær at útbúgva seg víðari.

Um 300 fólk hava tikið prógv av Fiskivinnuskúlanum síðan 1990, og nógv tey flestu hava tikið 3 ára HIF-prógv (hægri prógv innan fiskivinnu). Hesi síggjast nú aftur í vinnuni. Fleiri teirra eru í størvum, sum skúlin upprunaliga varð ætlaður til, meðan onnur eru farin heilt aðrar vegir.

Frá á sumri 2013 hevur Fiskivinnuskúlin verið partur av nýggju gymnasialu breytaskipanini og bjóðar næmingum at ganga á tilfeingisbreytini. Í løtuni ganga 66 næmingar í trimum flokkum á skúlanum, sum nú heldur er ein tilfeingisskúli enn ein fiskivinnuskúli. Tí verður navnið „Tilfeingisskúlin" brúkt sum undirheitið til upprunaliga navnið.

# Handilskúlin – móttøka 5. mars 2014

Røða: Heðin Samuelsen

Sum ein, sum hevði ein lítlan leiklut í, at hesin skúlin varð bygdur, nýti eg høvið til at siga eitt lítið sindur um forsøguna.

Í hondini havi eg eitt lítið, ljósareytt rit, dagfest 7. november 1973: **Mål, strategi og byggeplaner for 70'erne,** sum varð sent føroysku myndugleikunum o.ø. og tí treka danska direktoratinum fyri vinnuútbúgvingar.

Tað var undirskrivað av hesum nevndarlimum: Jógvan Sundstein, formanni, Petur Christiansen, Klaus Hermann, Hanna Lisberg, Karl Jacobsen, Hans Hansen, Andreas Restorff, Sam Hansen, Páll á Dul, Knút Olsen, Hans Andr. Jacobsen, Ditleif Eldevig og Georg Thomsen – umframt deildarleiðarunum: Arnhold Abrahamsen, Jóhannes Enni, Tóri Skaalum og Hanus undir Leitinum.

Hetta ritið var støðið undir bæði hesum bygninginum, skúlanum á Kambsdali og – meiri óbeinleiðis – nýggja Marknagilsdeplinum – vil eg í hvussu so er halda.

Nevndu persónar umframt lærararnir á handilskúladeildunum um alt landið møttust í november 1973 til ein ógvuliga týdningarmiklan fund við Áir, ið vardi tveir dagar, at viðgera støðuna og framtíðina.

Úrslitið var hetta ritið, sum, burtursæð frá støðulýsing, málsetningi, tørvsmetingum o.ø. fevnir um:

**Nýtt virksemi**, m.a. at fara undir FHS (HH fingu vit longu í 1978 í Fiskasølubygninginum) og merkomútbúgvingar.

**Skúlabygging**: Fyrst í Havn (standa liðugur í august 1975), so í/á Kambsdali (standa liðugur í august 1976) og síðani í Suðuroy. Eg minnist at talan var á fundinum um at byggja hann í Hovi. Umframt skuldi skúlaheim byggjast til hesar skúlar.

Kann ikki lata vera við at umrøða ein lítlan tilburð, sum mær var fyri á vári 1975 (stendur í bókini „Handilsskúlin, hálvrunnin øld", sum eg skrivaði við góðari hjálp frá Poul Johs. Lindberg):

Poul E. Petersen, kendi lærarin og ítróttaráðgevin og eisini hissini lærari á

handilsskúlanum, stendur við reyðmálaðu hús síni við Perskonugøtu og klývur rabarburøtur. Komi framvið. Báðir steðga á til eitt lítið kurteisisprát: „Hvussu gongst við handilsskúlanum"? spyr Pól. „Ikki veit eg" var svarið, „eg væntaði so vist, at tað skuldi ikki taka meiri enn eitt ár at fáa gongd á at byggja, men enn røkist ikki fyri nøkrum, og soleiðis er við so mongum øðrum málum eisini'

„Mínar royndir siga mær", svarar Pól, „at frá tí, tú fært eitt hugskot, til tað gerst veruleiki, ganga 30 ár í miðal. Tí mást tú ikki gevast, men brynja teg við toli!" Meiri var ikki talað, men kanska hugsað.

Tankin um at byggja og hava dagskúla var ikki nýggjur, tí føroyingar vóru leingi tey einastu í kongaríkinum, sum bara høvdu kvøldskúla. Meðan Djóni í Geil var skúlastjóri, bjóðaði kommunan soleiðis skúlanum í 1963 eitt byggilendi sunnanvert plantaguna. Helst var tað rivalisering millum Havnina og hinar handilsskúlarnar í Føroyum, sum forðaði fyri, at ikki varð komið víðari við at byggja. Tann sundurdrátturin varð loystur í 1968, tá ið allir skúlarnir skipaðu seg sum **Føroya Handilsskúli.**

Rembingarnar á vinnuskúlaøkinum seinast í 60-árunum og 70-árunum vóru ógvisligar:

Tekniskir skúlar og skúlaheim skuldu byggjast bæði í Havn og Klaksvík. Skúlaheimið í Havn stóð liðugt 1975, og fekk kommunan í lag í 1978, at Tekniski skúli kundi hýsast *fyribils* í hallum við Velbastaðvegin. Danir vildu hava, at bert ein felags vinnuskúli var í Føroyum. Tað gjørdi sítt til, at stígur kom í.

Maskinskúlin vildi eina tíð eisini sleppa at byggja saman við Tekniska skúla og Handilsskúlanum á matriklinum, sum kommunan hevði ætlað øllum skúlunum, men sum Tekniski skúli nú vildi hava fyri seg sjálvan. Mikið stríð stóðst av hesum, men eftir at Egon gjørdist stjóri, og Tekniski skúli og Handilsskúlin byrjaðu at spæla fótbólt móti hvørjum øðrum, gjørdist samstarvið rættiliga gott.

Í 70-árunum vóru álit eftir álit skrivað í øllum ælabogalitum um byggimál og skúlastrukturar v.m. sum ov leingi og fløkjasligt er at greiða frá her. Tað var eisini í hesum árunum at tankin um at yvirtaka umsitingina av øllum skúlamálum og hugsanin um samanrenningina av miðnámsskúlunum kom fram.

Aftur til Poul hjá Elinborg ella summa summarum: Tað tók 20 ár at fyrireika og byggja fyrsta handilsskúlan. Tað verða 50 ár farin, tá ið Tekniski skúli

væntuliga fær síni ynski uppfylt og 35-40 ár at mýkja eina bygnaðarliga samanrenning av Tekniska skúla, Handilsskúlanum og Studentaskúlanum. Nevniliga við Marknagilsdeplinum. Sig so tað!

Eg kann nevna trý viðurskifti, hví tað gekst lutvíst skjótt, hóast nógva mótgongd frá danskari og aðrari síðu, og stríð hjá Handilsskúlanum, at sleppa at fara undir bygging:

Vit høvdu eina virkuliga visionera, virkna og væl virkandi nevnd.

Vit høvdu myndugleikarnir við okkum: Landsstýrið, Løgtingið, Ríkisumboðið, Landsskúlafyrisitingina og Tórshavnar kommunu umframt deildir skúlans uttan fyri Havnina.

Og so nøkur frímerki eisini, billi eg mær eisini inn.

Tað gekk soleiðis fyri seg: Á einum fundi fyri danskar handilsskúlar á vári 1981 (haldi eg tað var) í Køge var eisini ein íðin frímerkjasavnari, sum var formaður fyri HK og „Bygge- og strukturudvalget“ hjá danska direktoratinum, sum m.a. umsat byggimál. Haðani høvdu vit fingið at vita, at tað lá illa fyri við okkara umsókn. Nú vóru góð ráð dýr. Eg fann tí uppá at hava nøkur frímerkir, sum pápi mín hevði savnað, við mær, setti meg við barrdiskin soleiðis av tilvild við síðina av Benzon – soleiðis æt hann – og setti meg at kanna hesi frímerki, uttan annars at gera vart við meg. Við eitt sigur Benzon. „Må jeg se?“ „Gerne!“ var svarið. „Meget interessant“, var tað næsta hann segði. „Vil du ha dem?“ sigi eg. „Må jeg virkelig?“ „Ja, ta’ dem bare. Dem har jeg ikke forstand på alligevel' Viku seinni fekk eg takkarbræv saman við einari forvitnisligari bók. Og tríggjar vikur eftir hevði Bygge- og strukturudvalget givið donsku fíggjarnevndini tilmæli um bygging av hesum skúla.

Spakin varð settur í 4. januar 1982 og 17. august 1983 byrjaði skúlagongdin. Og 29. oktober sama ár handaði formaðurin fyri bygginevndina, Bernd Johansen, dugnaliga formanninum fyri skúlanum, Jógvani Sundstein, symbolskt lykil til skúlan við eftirfylgjandi glæsiligari móttøku og veitslu, har Eilif Samuelsen, landsstýrismaðurin, sum dugnaði skúlanum so væl á mangan hátt, eisini var millum tey 300 innbodnu. Hann (altso skúlin – ikki Eilif) kostaði 18 mill. kr., sum ætlað. Kortini leyp ein ½ millión av, við tað at vit bíðaðu eitt sindur við at selja kredittfelagsobligatiónirnar, sum upprunaliga vóru mettar til kurs 65, til kursurin kom uppá 105,57, sum man vera eindømi.

Byggiráðgevar vóru Árni Winther, Preben Hansen, Sofus M. Jacobsen og Viggo Akraberg Hansen. Ov langrøkjut verður at nevna arbeiðstakararnar. Men byggingin var eitt satt fyridømi um gott arbeiðslag og væla arbeiði. Sagt verður t.d., at tað, sum leyp av frá timburarbeiðinum, rúmtist í einari trillubøru.

Ein sjafførur, sum skuldi koyra meg oman í býin, hevði hesa viðmerking til útsjóndina av bygninginum hjá Árna: „Tann, sum hevur ábyrgdina av hasum bygninginum, átti at verið hongdur. Hatta er ljótasti bygningur í landinum. Nei, kanska er SMS ljótari.“ Hann bráðtagdi, tá ið eg fortaldi honum um mín lut í miséruni.

Tað er gott, at øll onnur og danska arkitektablaðið høvdu eina aðra meining.

Eg minnist við takksemi øll tey nevndu og fleiri, sum eg ikki havi nevnt. Eg minnist serliga við takksemi idealistisku lærararnar, sum fylgdu við frá gamla handilskúlanum. Og inspektørarnar Leiv Harryson og Ragnar Magnussen fyri teirra fantastiska ídni og dugnaskap at fáa gerandisdagin at glíða so lætt, eftir at vit fluttu inn, og øll hini fyri tað sama, eitt nú fyrsti húsavørðurin og fryntligu damurnar í køkinum og vaskikonurnar. Og annars allar nýkomnu lærararnar. Og eg minnist við takksemi teir næmingar, sum eg lærdi at kenna. Ongin skal billa mær inn, at tað finnast truplir næmingar.

Takk fyri innbjóðingina og fyri, at tit lurtaðu. Gævi framtíð skúlans verður **Bjørt**. Hetta seinasta var eisini reklama fyri dóttrini.

# Søgan um Tekniska Skúla í Klaksvík

Rúni Heinesen

Í 1935 tekur Klaksvíkar Handverkarafelag stig til at seta á stovn tekniskan skúla. Fyrsti fundurin var 18. september. Í gerðabókini sæst, at nevndin skipar seg við Jóhannesi Gaard sum formanni. Á sama fundi ger nevndin av at seta Jóhan Rasmussen (Jóhan í Grótinum) sum fyristøðumann. Setanin var fyribils fyri veturin 1935/36. Eisini verður avgjørt, at undirvísingin í motorlæru, sum hevði verið vetrarnar síðan miðskeiðis í 20-árunum, skuldi halda fram á nýggja stovninum. Jóhannes og Jóhan vóru drúgvir í starvinum. Teir hildu á til ávikavist 1955 og 1962. Fram til 1961 var øll skúlagongd skipað sum kvøldundirvísing í vetrarhálvuni. Fyrstu árini í leigaðum hølum í bygdini, og seinni, t.e. 30. september í 1953, varð nýggi bygningurin undir sjálvsognarstovninum við Skúlaveg vígdur til skúlavirksemi. Eftir Jóhannes Gaard hava formenninir verið: Sámal Petersen (1955-1958), aftur Jóhannes Gaard (1959-1965), Karl Hansen (1965-1969) og Einar Mortensen (1969-1972). Í tíðarskeiðnum frá 1972 til 1988 vóru formenninir: Jens Juul Sólbjørg, Andrias Elttør, Páll Josephsen, Karl Hansen, Sigurd Syderbø, Einar Mortensen, Oliver Olsen og Christian Jørgensen. Jan Ellebye Andersen var formaður frá 1993 til 2013, og nú er Frimodt Rasmussen formaður. Fyristøðumenn eftir Jóhan í Grótinum hava verið: Andreas Thomsen (1962-1966), Asbjørn Joensen (1966-1993) og Rúni Heinesen frá 1994.

## Dagundirvísing

Frá 1961 varð virksemið umskipað til dagundirvísing. Fyrstu mongu árini var undirvísingin nærum bert ástøðilig. Tað handaliga gekk fyri seg úti á læruplássunum. Í tíðarskeiðnum 1960/70 varð tó við Einari Mortensen sum formanni gjørd íløga í eitt el-laboratorium, sum húsaðist í kjallaranum við Skúlaveg. Virksemið varð um hetta mundið, inntil blokkurin kom, fíggjað úr statskassanum. Í 1976 verða skúlaheim, undirvísingarhøli og høli til fyrisiting

tikin í brúk við Borðoyarvík. Partur av praktiska virkseminum var í leigaðum hølum í KÍ-høllini fram til 1987, tá stór útbygging við framkomnari útgerð til smiðju-, el- og timburyrkið stóð liðug til undirvísingina. Skúlin varð tá javnsettur við aðrar tekniskar skúlar í ríkinum og kundi bjóða skúlagongd til lærlingar í smiðju-, elektrikara-, timburmans- og snikkarayrkinum. Fyri at tryggja støðið fóru námsfrøðiliga útbúgvingin og fakliga eftirútbúgvingin fram í donskum umhvørvi. Nevndarlimirnir umboðaðu handverksvinnuna og kommunurnar í Norðoyggjum og Eysturoynni. Lærlingarnir komu eisini úr hesum økjum. Frá 60-árunum til seint í 80-árunum var maskinistútbúgving á skúlanum.

## SIT

Fyrst í 90-árunum rakti fíggjarkreppan handverksvinnuna sera hart. Talið á lærlingum minkaði niður í næstan einki, og skúlamyndugleikin gjørdi av at miðsavna skúlagongdina hjá lærlingum á Tekniska Skúlanum í Tórshavn. Samstundis varð avgjørt at fara undir støðisútbúgving í tøkni, SIT, havandi í huga, at handverksvinnan hevði tørv á lærlingum, eftir at kreppan var av.

Innihaldið í SIT-útbúgvingini var 1. árið tað sama sum skúlagongdin hjá lærlingum. Møguligt var at halda fram 2. árið á SIT, sum serliga er rættað ímóti miðallongum tøkniútbúgvingum, eitt nú maskinmeistaraútbúgvingini og útbúgvingunum í byggitøkni og veik- og sterkstreymstøkni. Fyrstu árini var ósemja millum vinnuna og skúlamyndugleikararnar um nýggju útbúgvingina, men síðst í 90-árunum slætnaði sjógvurin aftur.

## Hægri tøkni

Í 1992 byrjaði fyrsti flokkurin á nýggju gymnasialu útbúgvingini, nevnd Hægri Tøkni (HT). Útbúgvingin varð skipað eftir sama leisti sum tann danska, HTX. Í mun til aðrar studentsútbúgvingar varð høvuðsdentur lagdur á tøkni og náttúrulærugreinir. Eftir at hava húsast ymsastaðni í býnum, fekk HT-útbúgvingin sítt egna studentsumhvørvi á heysti í 2008, tá ið nýggju hølini vórðu tikin í nýtslu.

## Tøknibreytin

Í 2013 varð HT-útbúgvingin løgd inn undir nýggju gymnasialu lógina saman við øðrum studentsútbúgvingum. Nú er heitið Tøknibreytin.

Matvøruútbúgvingin, sum er skipað undir SIT-lógini, hevur nú 4 ár á baki. Hon heldur til í hølunum á Garðavegi, har skipskokkaskeiðið var fyrr. Eftir ætlan flytur hon í nýggj høli við Borðoyarvík í 2015. Samstundis flytur Klaksvíkar HF-skeið sítt virksemi undir somu lon.

Á Tekniska Skúla í Klaksvík eru nú um 40 ársverk, harav 30 beinleiðis innan undirvísing. Maritimi stovnurin, Sjónám, við um leið 10 ársverkum, verður eisini stjórnaður av Tekniska Skúlanum. Sostatt er nærum alt undirvísingarvirksemið eftir fólkaskúlan í Norðoyggjum samskipað í einum bygnaði.

# Cournot – og lógin um eftirspurning

Olav Absalonsen

Antoine Augustine Cournot var føddur í 1801 eystarlaga í Frankaríki. Han nam sær útbúgving í støddfrøði í París. Frá 1823 starvaðist hann sum skrivari hjá einum heryvirmanni, og í frítíðini tók hann tvær doktaraútbúgvingar – í støddfrøði og astronomi. Frá 1834 hevði hann størv sum professari og rektari á universitetum í Frankaríki.

Meðan hann var professari í Lyon, skrivaði hann bókina 'Kanning av støddfrøðiligum meginreglum fyri ástøðið um vælstand', sum kom út í 1838. Sambært Lionel Robbins er hetta fyrsta stórverk í støddfrøðiligari búskaparfrøði, og nógv av innihaldinum í hesi bókini hava aðrir av órøttum fingið heiðurin fyri at hava uppfunnið í 20. øld. Sambært Agnari Sandmo er henda bókin ein varði í menningini av búskapi sum vísind, og er hetta helst fyrstu ferð, at støddfrøðin verður nýtt sum amboð í búskaparligari modellering.

## Lógin um eftirspurning

Eitt týðandi íkast hjá Cournot til búskaparfrøðina er tað, sum hann nevndi lógina um eftirspurning og ástøðið um, hvussu prísir verða til á marknaði við einum ella fáum útbjóðarum. Greining av eftirspurningi var ikki eitt evni, sum búskaparfrøðingar frammanundan høvdu lagt nakað í at arbeiða við.[1] Men í arbeiðnum hjá Cournot hevði eftirspurningur ein stóran leiklut. Hann fanst hvassliga at undanfarnum ástøðingum, ið skrivaðu, sum um teir hildu, at eftirspurningur var tað sama sum seld mongd, meðan aðrir sóu út til at halda, at eftirspurningur eftir einari vøru var tað sama sum ynski um at eiga hana.

1 Tó hevði John Stuart Mill skrivað eina grein um eftirspurning, men hon kom ikki út fyrr enn í 1844.

Bæði sjónarmiðini føra til niðurstøður við ongari meining. Eftirspurningur má sipa til ta mongdina, sum einstaklingar veruliga vilja keypa fyri ávísan prís. Lægri prísurin er, størri er mongdin, tey vilja keypa. Hetta er lógin um eftirspurning, har eftirspurd mongd er ein funktión av prísinum, og kann verða skrivað sum:

$$M = f(p)$$

har M er eftirspurd mongd, og p er prísur. Men hvussu kunnu vit vita, hvussu ein slík funktión sær út? Cournot segði, at vit kunnu kanna á marknaðinum, hvørjar mongdir verða seldar fyri ymiskar prísir; so kunnu vit seta hesar eygleiðingar inn í eina krossskipan og tekna eina farmynd. Men tað er trupult at gera sovorðnar eygleiðingar, og í veruleikanum kann væntast, at samanhangið millum prís og mongd broytist alla tíðina. Men tað, at tað er trupult at gera empiriskar kanningar av eftirspurningi, kann ikki brúkast sum grundgeving fyri, at funktiónir av eftirspurningi ikki kunnu brúkast í ástøðiligum samanhangi. Vit vita nøkulunda, hvussu ein slík funktión kann síggja út; vit kunnu til dømis ganga út frá, at hon er fallandi. Í teoriini kunnu vit eisini rokna við, at hon er kontinuerlig, um marknaðurin er nóg stórur. Cournot royndi at lýsa hetta við praktiskum dømi um marknaðin fyri sukur í Frankaríki. Hann legði eisini dent á, at funktiónin er treytað av, at allir aðrir faktorar, sum kunnu ávirka eftirspurningin, eru óbroyttir, tá ið prísurin broytist.

Men hann gjørdi einki burturúr at byggja eftirspurningsfunktiónina á eina teori um brúkaraatferð, sum búskaparfrøðingar seinni gjørdu; hugtakið marginal nytta er ikki við í viðgerðini hjá Cournot.[2] Hann gjørdi eisini eina mynd, sum vísir eftirspurda mongd sum funktión av prísinum. Sambært Agnari Sandmo er hetta helst fyrstu ferð, at henda mynd er teknað – í hvussu er í tilfari, sum er útgivið. Tað áhugaverda við hesi mynd er, at prísurin er á x-ásini, og mongdin er á y-ásini, sum eisini er tann mest logiski mátin, tá ið prísurin verður sæddur sum tann ótreytaði variabilin, og mongdin sum tann treytaði. Seinni í 19. øld fann kendi Cambridge professarin Alfred Marshall upp á at nýta ta

2 Sí grein um Jules Dupuit í Miðnámsriti nr. 2, 2014.

øvutu funktiónina, sum síðani bleiv tað vanliga í búskaparfrøði, og sum vit eisini kenna frá lærubókum í dag.[3]

## Monopolprísur

Cournot lýsir monopol á sama hátt, sum vit kenna tað í lærubókum nú á døgum. Hann gongur út frá, at monopolisturin vil hava størst møguligan vinning. Fyrst tekur hann dømi, har broytiligi kostnaðurin er null. Hetta kundi til dømis verið ein, sum eigur keldu við vatni, ið er serliga gott fyri heilsuna. Monopolisturin vil tí seta ein prís, sum gevur so stóra inntøku sum møguligt. Inntøkan er $p \cdot M$ ella $p \cdot F(p)$, ið er tað sama sum vinningur (skiftisíkast), tá ið eingin broytiligur kostnaður er. Hetta ber í sær, at monopolprísurin er tann prísur, har tann avleidda funktiónin av inntøkuni er null: $F(p)+p \cdot F'(p)=0$.

Hetta er tað sama sum at siga, sum vit siga í dag, at inntøkan er størst, tá ið markinntøkan (marginalinntøkan) er null. Við hesi hugsan kom Cournot ógvuliga nær einum hugtaki, sum kom fram eina hálva øld seinni: her kundi hann bara havt definerað príselastisitet sum $p \cdot F'(p)/F(p)$, og so hevði hann havt uppfunnið hetta týðandi hugtak, og hann kundi lýst optimum hjá monopolistinum sum tað punktið, har príselastisiteturin er -1.

Síðani fer Cournot víðari og víðkar dømið við broytiligum kostnaði, og kemur til ta niðurstøðu, at optimum hjá monopolistinum er har, sum markinntøka og markkostnaður møtast. Sum støddfrøðingur er hann greiður um, at í teoriini kann hetta antin merkja maksimum ella minimum, men tað er bara maksimum, sum er áhugavert í praksis. Hann kannar eisini, hvussu hækkandi eindarkostnaður ávirkar monopolprísin, og hvussu skattur, ið verður lagdur á framleiðslu per eind, ávirkar prísin og framleiðslunøgdina hjá monopolistinum. Sambært Agnari Sandmo er Cournot langt framman fyri sína tíð í hesi greining.

## Duopol

Seinni í bókini viðger Cournot tað, sum hann kallar óavmarkaða kapping,

3 Orsøkin hjá Marshall at seta prísin á ta loddrøttu ásina og mongdina á ta vatnrøttu var hugtakið útboðsprísur sum funktión av tí mongd, ið er framleidd. Útboðsprísurin er prísurin, sum framleiðarin skal hava fyri eina ávísa mongd. Um eftirspurningskurvan eisini verður fatað sum eftirspurningsprísur, verður tað natúrligt at hugsa um útboðs- og eftirspurningsprísir sum treytaðar variablar og mongdina sum ótreytaðan variabil hjá virkjum og brúkarum, og ekvilibrium sum jávnvág millum útboð og eftirspurning.

ið er tað, sum vit í dag kalla fullkomna kapping. Framleiðararnir hava eina kostnaðarfunktión við hækkandi markkostnað, og tá ið teir ikki kunnu ávirka marknaðarprísin, so er markinntøkan tað sama sum prísurin, soleiðis at vinningurin er størstur har, sum markkostnaðurin er tað sama sum prísurin. Cournot var tann fyrsti at koma við einari greiðari framseting av hesum fyribrigdi, tó at hann ikki nýtti orðini markkostnaður og markinntøku, men lat støddfrøðina tala fyri seg.

Tað, sum Cournot kanska er mest kendur fyri, eru tær innovatiónir, hann gjørdi við at greina kapping millum fáar framleiðarar, har hvør einstakur er nóg stórur at kunna ávirka marknaðarprísin. Høvuðsdømið hjá honum er við tveimum framleiðarum, og er henda greining kend undir heitinum Duopol myndil Cournot.

Cournot brúkar sama dømið, sum hann hevði í sambandi við monopol, men nú eru tveir framleiðarar (eigarar), sum eiga hvør sína keldu við vatni, ið er serliga gott fyri heilsuna. Dygdin á vatninum er tann sama hjá báðum, soleiðis at fyri keyparan ger tað tað sama, hvørjum hann keypir frá. Um báðir skulu yvirliva á marknaðinum, mugu teir tí selja vatnið fyri sama prís. Gera teir ikki tað, fer tann, ið selur fyri lægri prís, at taka allan marknaðin. Spurningurin er tí: Hvussu nógv skal hvør av teimum framleiða, og hvat verður marknaðarprísurin?

Tað er skjótt at blíva ørkymlaður av hesum spurningi. Hvør av duopolistunum, sum vit kunnu kalla framleiðarar, má rokna við, at vinningurin, hann fær, tá ið hann velur at framleiða ávísa nøgd, er treytaður av, hvat hin duopolisturin ger, og hann má eisini rokna við, at hin duopolisturin hugsar tað sama. Cournot loysti spurningin soleiðis: hvør av duopolistunum velur sína optimalu framleiðslu við tí treyt, at framleiðslan hjá hinum er givin. Eigari 1 hevur onga ávirkan á, hvat eigari 2 ger. Tað einasta hann kann gera, tá ið eigari 2 hevur gjørt av, hvussu nógv hann bjóðar út, er at velja ta nøgd, sum er best fyri hann.

Cournot vísti, at hetta førdi til eina teori um prísformatión, og at prísurin á einum duopoli leggur seg onkustaðni millum monopolprísin og prísin við fullkomnari kapping. Hetta er eisini kent undir heitinum Cournot ekvilibrium. Hann lýsti eisini, at so hvørt sum útbjóðarar økjast í tali, so lækkar marknaðarprísurin so líðandi og nærkast prísinum við fullkomnari kapping.

Teoriirnar hjá Cournot um monopol og duopol bygdu á hugtøk og háttaløg, ið

vóru fullkomiliga nýggj, tá ið tey komu fram, og sum ikki fingu ta viðurkenning, tey høvdu uppiborið fyrr enn væl inni í 20. øld. Búskaparfrøðingar tá høvdu lítlan kunnleika til støddfrøðina, sum Cournot nýtti, og í teirra eygum hevði bókin lítlan týdning í búskaparfrøði. Men Cournot livdi kortini nóg leingi at uppliva, at eitt nýtt ættarlið av búskaparfrøðingum gav bókini ans og viðurkendi hana sum eitt av mest originalu og slóðbrótandi verkum í hesum partinum av búskaparligari teori. Til dømis hevði landsmaður hansara Léon Walras (1834-1910) lisið bókina hjá Cournot og heiðraði hann í bók, sum kom út í 1874. Cournot doyði í 1877.

## Keldur

Robbins, Lionel (1998), A History of Economic Thought. The LSE Lectures, edited by Steven G. Medema and Warren J. Samuels. Princeton: Princeton University Press.

Sandmo, Agnar (2011), Economics Evolving – A History og Economic Thought. Princeton: Princeton University Press.

# Jules Dupuit og cost-benefit greiningar av almennum verkætlanum

Olav Absalonsen

**Henda grein greiðir frá 170 ára gomlum hugsanum, sum enn eru nýtiligar í sambandi við almennar verkætlanir – eisini til undirsjóvartunlar í Føroyum.**

Jules Dupuit var føddur í Suður-Frankaríki í 1804. Hann tók útbúgving sum verkfrøðingur, og í 1824 fekk hann starv innan fyrisiting av vegum og brúgvum í Frankaríki. Seinni fekk hann leiðandi starv hjá býarumsitingini í París, har hann hevði við vegir, kanalir, vatnveiting og renovatión at gera.

Nógv av tí, sum Dupuit skrivaði, var innan verkfrøði, men við aldrinum bleiv hann meira áhugaður í búskaparligum spurningum av praktiskum slagi, sum hann hevði rent seg í sum verkfrøðingur og umsitingarleiðari. Tað vóru tveir spurningar, sum hann gav serligan ans:

1. Hvussu skal ein rokna samfelagsliga vinningin av einari verkætlan sum til dømis at gera ein veg ella eina brúgv?
2. Hvat er tann rationelli prísurin, sum skal verða kravdur fyri at brúka ein veg ella eina brúgv?

Ólíkur flestu búskaparfrøðingum um hetta mundið var Dupuit fyrst og fremst áhugaður í reglum fyri at taka avgerðir í almenna geiranum, og hansara íkast til búskaparfrøðina hevði praktisk endamál. Sambært Agnar Sandmo verður hann mettur sum ein av grundleggjarunum av normativari búskaparteori

ella vælferðarbúskapi, har málið við akademiskari gransking er at koma við tilmælum um politiskar avgerðir, sum kunnu fremja samfelagsliga vælferð.

Innan búskap er Dupuit serliga kendur fyri tvær greinir, sum hann skrivaði í 1844 og í 1849. Hann nevnir, at greinirnar seinni skuldu vera partar í einum størri verki um búskaparliga greining í almenna geiranum, men tíverri bleiv henda bók ongantíð til nakað.

## Samlað samfelagsnytta av almennari verkætlan

Í 1844 greinini viðger Dupuit, hvussu ein kann koma til eina meting av samfelagsliga vinninginum av einari almennari verkætlan sum til dømis einari brúgv. Hann staðfestir, at tað er vanliga lætt at rokna kostnaðin fyri verkætlanina, men at tað kann vera sera trupult at meta um inntøkuna. Í nógvum førum gevur verkætlanin onga pengainntøku, og tí er neyðugt at gera eina alternativa meting av samfelagsliga vinninginum av ætlanini. Hann meinti, at hetta má vera roknað sum nyttan av ætlanini. Men hvussu skuldi henda útrokning gerast? Dupuit vísir til Jean-Baptiste Say, sum sigur, at nytta er evnini, sum ognin hevur at nøkta menniskjaligan tørv. Men hetta er for abstrakt til at hava nakað praktiskt virði. Eisini gongur hetta ímóti tí fatan, at nytta er eitt objektivt fyribrigdi. Sambært Dupuit er nytta sostatt subjektiv, og tá ið tú skalt meta um nyttuna av einari ogn, so veldst um eginleikar og umstøður av persónligum slagi. Hann gjørdi tí hesa *definitión av nyttu* av vøru ella tænastu:

> *Tað mesta, sum hvør einstakur brúkari er sinnaður at ofra fyri at útvega sær vøruna ella tænastuna.*

Við hesari definitiónini kann nytta verða gjørd upp í pengum, og kann hon tí brúkast sum amboð at meta um virðið á einari verkætlan. Hvussu stórur hugurin er at gjalda er ymiskur og treytaður av, hvørjar vanar og tørv brúkarin hevur, og hvussu evnini hjá honum eru at gjalda. Tá ið vit hyggja at nyttuni, sum ymiskir brúkarar hava av somu verkætlan, mugu vit viðganga, at greiningin helst er til fyrimun fyri tey ríku, tí tey hava betri evni at gjalda. Men sambært Dupuit kann búskapur ikki byggja á annað enn hugin ella viljan at gjalda.

Síðani fer Dupuit víðari at nýta hugtakið um nyttu at greina vinningsførið av almennum verkætlanum, og hann lýsir hetta teoretiskt við einum dømi um eina

brúgv, ið er gjørd at ganga eftir. Frammanundan er avgjørt, at tað kostar einki at nýta brúnna, soleiðis at eingin pengainntøka er, sum kann samanberast við kostnaðin. Hvussu kunnu vit so gera av, um brúgvin er samfelagsliga lønandi ella ikki? Mett verður, at um tað einki kostar at nýta brúnna, verður hon brúkt 2.080.000 ferðir um árið. Um prísurin at ganga um brúnna hevði verið 1 centime ella 0,01 francs, hevði talið á brúkarum minkað við 330.000. Øll hesi høvdu helst viljað goldið minni enn 0,01 francs, og Dupuit rundar hetta av til 0,01 francs. Fyri hesi er nyttan at nýta brúnna 0,01 x 330.000 = 3.300 francs.

Um vit nú hækka prísin til 0,02 francs, minkar nýtslan av brúnni við 294.000 afturat; við sama roknihátti sum omanfyri er nyttan hjá hesum at nýta brúnna 5.880 francs. Dupuit heldur fram við hesum hugsaða dømi at hækka prísin upp í 15 centimes, og tá er talið á brúkarum komið niður á null. Hann telur so øll nyttutølini saman (3.300 + 5.880 + ...), sum verður 102.000 francs. Hetta er ein meting av, hvussu nógv samfelagið er sinnað at gjalda, sum er tann samfelagsliga inntøkan av verkætlanini. Um árligi kostnaðurin til viðlíkahald pluss renta er minni enn hetta talið, eigur brúgvin at vera gjørd.

Tað, sum Dupuit ger her, er at samanbera kostnaðin við økið undir eftirspurningskurvuni. Sambært Agnar Sandmo er hetta fyrstu ferð, at ein cost-benefit greining av einari almennari verkætlan er grundað á væl undirbygda teori.

## Eftirspurningur og optimalur prísur

Í døminum omanfyri er frammanundan gjørt av, at tað skuldi ikki kosta nakað at nýta brúnna. Dupuit viðger spurningin, hvussu nógv tað almenna átti at tikið fyri at nýta eina almenna tænastu sum eina brúgv ella eina kanal. Ein privatur eigari hevði kravt ein prís, sum gav so stóra inntøku sum møguligt, men tað kann ikki vera málið hjá einum almennum eigara, sum eigur at miða eftir so stórari nyttu sum møguligt. So leingi sum eingin eyka kostnaður er av at fara um brúnna, eigur prísurin at vera null sum í døminum.

Um tann almenni stovnurin má krevja eina ávísa upphædd fyri at dekka fasta kostnaðin, hevði tað verið ein góð loysn, at ein og hvør galt ein ávísan brotpart av tí, sum hann hevði viljað goldið. Grundin fyri hesi loysn er, at hon hevði ikki hildið nøkrum frá at brúkt brúnna, tí nyttan hjá hvørjum einstøkum hevði altíð verið størri enn kostnaðurin. Men henda prísdifferentiering er neyvan nýtilig,

og í praksis er tí helst neyðugt at krevja ein prís, sum er so høgur, at inntøkan kann dekka fasta kostnaðin, sjálvt um hetta ger, at færri fara at brúka brúnna, og nyttan av henni tí verður minni.

Sambært Lionel Robbins er hugtakið hjá Dupuit um marginalt nyttuvirði byrjanin til teoriina um consumer surplus. Hann útleiðir eina fallandi eftirspurningskurvu út frá hypotesuni um fallandi marginala nyttu, sum verður lýst í pengavirðum sum hugurin at gjalda. So leingi sum marginala nyttan er hægri enn prísurin, er skilagott hjá tí einstaka at keypa meiri av vøruni ella tænastuni.

## Undirsjóvartunlar

Teoriin hjá Dupuit at greina vinningin av einari almennari verkætlan kann eisini verða brúkt til avgerðir um undirsjóvartunlar og aðrar tunlar. Sum lesarin helst longu hevur hugsað, so hevði tað sambært Dupuit verið lítið høpi í at latið eitt privat virki gjørt og rikið ein møguligan Eysturoyartunnil: Tann samfelagsliga nyttan av honum hevði verið nógv minni, enn um tað almenna ger hann. Og hvat hann hevði hildið um, at Eysturoyartunnilin og Sandoyartunnilin skulu vera í sama felag, man lítil ivi vera um: Hvør tunnil sær skuldi staðið sína roynd í einari cost-benefit greining.

## Keldur

Robbins, Lionel (1998), A History of Economic Thought. The LSE Lectures, edited by Steven G. Medema and Warren J. Samuels. Princeton: Princeton University Press.

Sandmo, Agnar (2011), Economics Evolving – A History og Economic Thought. Princeton: Princeton University Press.

# Joseph Alois Schumpeter – um íverksetaran

Tórður Johannesarson

**Schumpeter varð føddur 8. februar 1883 í Trest í táverandi Eysturríki/ Ungarn, nú Kekkia. Hann las løgfrøði frá 1901-1906. Í 1909 bleiv hann professari í mannfrøði á fróðskaparsetrinum í Czernowits í núverandi Ukraina. Hann fekk síðan arbeiði á fróðskaparsetrinum í Graz frá 1911-1918. Eftir fyrra heimsbardaga sat hann sum fíggjarmálaráðharri í 1919-1920. Eitt skifti var hann bankastjóri. Schumpeter starvaðist frá 1925 til 1932 á fróðskaparsetrinum í Bonn, tá ið hann flutti til USA og undirvísti á Harvard, til hann andaðist 8. januar 1950.**

## Búskaparvøkstur um aldaskiftið 1900

Íverksetarahugtakið bleiv lýst av m.a. Jean Baptiste Say (1767-1832), men hann fór ikki í dýpdina við hugtakinum. Grundfatanin av hugtakinum íverksetari fekk eitt gjøgnumbrot um 1900. Orsøkin var búskaparvøksturin, sum hevði verið seinast í 19. øld. Ástøðingar royndu at greina henda vøkstur. Um hesa tíðina fóru einstaklingar í hópatali at stovna nýggj virki, sum vuksu og skaptu búskaparvøkstur. Ein av hesum ástøðingum, sum royndi at skilja búskaparvøksturin um aldaskiftið, var Schumpeter.

## Hugtøkini adaptiv/kreativ og íverksetarin

Í 1911 gav Schumpeter út bókina „The Theory of Economic Development.“ Hann hevði ikki nomið sær útbúgving í búskapi, men verður mettur sum týðandi og nýmótans nationalbúskaparfrøðingur. Hann tók útgangsstøði í neoklassisku læruni. Tann klassiska nationalbúskaparfrøðin og seinni ein stórur partur av neoklassisku búskaparfrøðingunum høvdu í búskaparligu greiningini tríggjar aktørarar, jarðeigarar, kapitalistar og arbeiðarar. Schumpeter legði ein aktør afturat, nevniliga íverksetaran, sum eg vendi aftur til.

Í bókini „The Theory of Economic Development“ kom hann við tveimum ástøðum. Tað fyrra snúði seg um hugtøkini kreativ/adaptiv og kreativa destruktión. Hann helt, at tað eru tveir mátar, sum vit bera okkum at uppá, tá ið ein broyting/menning hendir. Hann kallar hesar hættir fyri adaptiv ella kreativ. Við adoptiv meinast, at vit bera okkum siðbundið at, tá ið broytingar henda – vit passa okkum til broytingarnar. Vit kunnu eisini velja at svara aftur upp á broytingar kreativt. Tá hátta vit okkum øðrvísi, enn vit plaga at gera. Eitt kreativt svar upp á eina broyting kann ikki síggjast frammanundan, og hetta vil broyta komandi hendingar í allar ævir. Hann nevnir eisini hugtakið kreativ destruktión. Hetta merkir, at vit oyðileggja/bróta niður gamlan hugsanarhátt, tí at vit hava funnið ein nýggjan máta at gera tingini uppá.

Seinna ástøðið hjá Schumpeter í bókini frá 1911 var íverksetarahugtakið. Sum sagt legði hann tann fjórða aktørin aftur at teimum trimum, nevniliga íverksetaran. Hesin var tann innovativa megin í búskapinum og hevði evnini at síggja og gjøgnumføra tær nýggju samansetingarnar, sum ofta førdu til minkaðan kostnað í búskapinum og sum síðan kundi skapa búskaparvøkstur. Schumpeter sá íverksetaran sum tann praktiska aktørin, sum handlaði. Hesin vildi skapa arbeiði ella virksemi við at seta í verk eina ella fleiri nýskapanir út frá egnari hugsan ella hugsanum hjá øðrum. Tað kundi eisini verið frá uppfinningum, sum hann sjálvur ella onnur høvdu funnið uppá.

Íverksetarin var øðrvísi enn kapitalisturin. Í mun til henda átti íverksetarin einki og mátti aloftast fíggja síni hugskot við lánum frá bankunum. Schumpeter helt tað vera sera týðandi fyri búskaparligu menningina, at bankarnir stuðlaðu íverksetaranum. Teir skuldu lata honum váðafúsan kapital og máttu sleppa vanahugsanini um ta gomlu framleiðsluna, har vinningurin er útgangsstøðið.

## Munurin millum siðbundna handilsmannin og íverksetaran

Hann helt, at tann vanligi handilsmaðurin, sum fæst við handil við vinningsmotivi, ikki er tann, sum kemur við nýggjum og slóðbrótandi framleiðsluháttum. Hjá siðbundna handilsmanninum er vanliga vinningsmotivið altíð knýtt at tí roknandi ella tí, sum kann roknast út. Hann velur heldur tann lítla og trygga vinningin enn tann stóra og ótrygga. Tá onkur kemur við einum nýggjum

framleiðsluhátti, merkir tað eisini ofta, at ein nýggj vøra spyrst burturúr. Hetta kann geva møguleika fyri stórum vinningi; men samstundis er eitt slag av happadrátti í hesum. Tað órokniliga ger, at tað mugu serligar týpur av fólki til at seta slíkt í verk. Íverksetarar seta framleiðslufaktorar saman á nýggjan hátt og skapa nýggjar vørur. Teir kunnu tí ikki metast við vanligar handilsmenn. Teir virka óheftir av gamlari framleiðslu og spreingja rammuna fyri vanligum vinningsmotivi. Grundtankin hjá íverksetaranum kann verða stýrdur av dreyminum um framtíðar samfelagið, av tøkniligum eldhugi ella reinum ævintýrhugi.

## Íverksetarin kann enda sum kapitalistur

Schumpeter helt ikki, at íverksetarar vóru leiðarar. Teir høvdu ikki serligt tev fyri at fáa fólk at fylgja sær. Tað er ikki heilt greitt hjá honum, um drívmegin hjá íverksetaranum er vinningur. Summastaðni sigur hann, at íverksetarin ikki søkir vinning. Motivini hjá íverksetaranum eru sambært honum:

1. Ynskið um at vera sjálvstøðugur.
2. Viljin til at sigra.
3. Gleðin í at loysa trupulleikar og við at skapa okkurt nýtt.

Hóast alt, so greinar Schumpeter íverksetaravinningin. Hann sigur, at vinningurin ikki er ein serstøk løn fyri avrikið, men kemur bert av monopolstøðuni á marknaðinum, sum ger tað gjørligt fyri íverksetaran at taka ovurprís fyri vøruna. Íverksetarin er ein persónur, sum vil realisera seg sjálvan og vil uppnáa eina sjálvstøðuga støðu. Hann søkir ikki neyðturviliga váða, tvørturímóti vil hann minka um váðan sum mest. Innovatiónin er knýtt at eini vissari mongd av váða, sum ikki slepst undan, og henda førir við sær broyting í búskaparligu skipanini. Við síni hugsan órógva íverksetararnir javnvágina og skapa kaos. Hetta kaos er tó nakað, sum førir búskaparligu skipanina framá og verður nevnt kreativ destruktión.

Sambært Schumpeter komu íverksetararnir ongantíð at gerast ein serstøk samfelagsstætt. Hann vísti á, at tá ið tað eydnaðist hjá íverksetaranum, so

bleiv hann ofta kapitalistur. Tá ið hann kom til pengar, so vildi hann heldur røkja sín kapital enn at broyta og at menna. Aðrar kreftir tóku við og drógu íverksetaravirksemið framá.

Á eldri árum ivaðist Schumpeter í, um íverksetarin hevði sama leiklut, sum hann áður hevði havt, tí sum kapitalisman mentist, tóktist tað, sum at framburður og nýhugsan stavaðu alt meira frá skipaðari gransking og menningararbeiði á stórum virkjum enn frá fríum framtakssemi. Íverksetaraástøðið fánaði í 30unum, men varð uppafturtikið í 1980unum og ment av m.ø. Kent, Sexton og Vesper. Eisini nú á døgum eru nøkur av gandaorðunum í sambandi við búskaparvøkstur íverksetan og íverksetari.

## Keldur

Jørgen Ravn Elkjær, „Entreprenørbegrebet,“ https://tidsskrift.dk/index.php/nationaloekonomisktidsskrift/article/view/25735/49538

Lage Rosengren, „Schumpeter åter aktuell,“ www.ne.se/rep/schumpeter-åter-aktuell-nyutgiven-antologi-om-kreativ-förstörelse

Miðnámsrit er greinasavn, sum viðger námsfrøðiligar og fakligar spurningar, sigur søguna hjá føroysku miðnámsskúlunum, rekir fakfelagsrørsluna hjá miðnámsskúlalærarum og mangt annað forvitnisligt. Greinskrivararnir koma m.a. inn á nýggja próvtalsstigan, opinleika um ársmet, skúlabøkur á føroyskum og meting í undirvísing og læring.

Tað hendir nógv spennandi á miðnámsskúlaøkinum og í føroyska skúlanum sum heild. Nógv hevur stóran almennan áhuga, og tí geva vit hesa bók út. Til rannsakan og sjálvrannsakan.